# LANDSGRANNSKOÐANIN

Fíggjarárið 2005

FRÁGREIÐING
UM FRÁVIK MILLUM JÁTTAN OG NÝTSLU O.A.

LATIN
LØGTINGSGRANNSKOÐARUNUM
sambært § 12 í Ll. nr. 25/1999
"um grannskoðan av landsroknskapinum v.m."

OKTOBER 2006

Traðagøta 43 ▪ Postrúm 2053 ▪ FO-165 Argir
☏ (298) 35 51 00 ▪ 🖷 (298) 35 51 01 ▪ 💻 gralands@post.olivant.fo
www.LG.fo

# Innihaldsyvirlit

**1 INNGANGUR 7**

**2 FÍGGJARMÁL 9**

**2.1 ÚTREIÐSLUR/MEIRNÝTSLA 9**
2.1.1 BYGNINGUR TIL ALMENNAR STOVNAR Í KLAKSVÍK (LØGUJÁTTAN) 3.11.1.35. 9
2.1.2 ÚTGJALD ÚR TRYGDARGRUNNINUM (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 3.21.7.10. 9
2.1.3 RENTUR AV LANDSINS SKULD 20.50.1.01. 10
2.1.4 RENTUINNTØKUR AV INNISTANDANDI 20.50.2.01. 10
**2.2 INNTØKUR/FRÁVIK 11**
**2.3 IVAMÁL UM JÁTTANARSKIPANINA 13**
2.3.1 INNGANGUR 13
2.3.2 JÁTTANARSKIPANIN Í ÁTTATI- OG FYRST Í NÍTIÁRUNUM 13
2.3.3 TILMÆLI UM NÝGGJA JÁTTANARSKIPAN Í 1995 14
2.3.4 NÝGGJ JÁTTANARSKIPAN Í 1997 14
2.3.5 FRAMHALDANDI IVI UM TILKNÝTI HJÁ STOVNUM-/GRUNNUM TIL FÍGGJARLÓG O.A. 14
2.3.6 ÁLIT UM LANDSSTOVNAR OG –GRUNNAR Í 2001 15
2.3.7 ÁLIT UM OG UPPSKOT TIL NÝGGJA JÁTTANARLÓG Í 2006 15
2.3.8 NÝSKAPANDI LÓGARGREINIR Í LÓGARUPPSKOTINUM 15
2.3.9 TILMÆLI 17
**2.4 AÐRAR VIÐMERKINGAR 17**
2.4.1 UMSITING AV TRYGDARGRUNNINUM (RAKSTRARJÁTTAN) 3.21.7.11. 17
2.4.2 VIÐLÍKAHALD (RAKSTRARJÁTTAN) 3.11.1.13. 18
2.4.3 ALMENT UM HØVUÐSKONTUR TIL FELAGS VIÐLÍKAHALD O.A. 19
2.4.4 SØGULIGT UM HØVUÐSKONTUR TIL FELAGS VIÐLÍKAHALD 20
2.4.5 UM AT SPJAÐA FYRISITINGARÚTREIÐSLUR 21
2.4.6 UM AT VEITA EYKAJÁTTAN TIL LÓGARBUNDNAR ÚTREIÐSLUR 23
2.4.7 ALMENT UM "ÚTREIÐSLUNEUTRALITET" Á FÍGGJARLÓGINI 23

**3 LØGMANSFYRISITINGIN 25**

**3.1 MEIRNÝTSLA 25**
3.1.1 LØGMANSSKRIVSTOVAN (RAKSTRARJÁTTAN) 2.11.1.02. 25
**3.2 MINNINÝTSLA 25**
3.2.1 STJÓRNARSKIPANARNEVND (RAKSTRARJÁTTAN) 2.11.1.40. 25
**3.3 AÐRAR VIÐMERKINGAR 25**
3.3.1 VIÐLÍKAHALD (RAKSTRARJÁTTAN) 2.11.1.12. 25
3.3.2 MENNINGARHJÁLP 2.13.3.01. 26
3.3.3 MENNINGARHJÁLP, UM LÓGARGRUNDARLAGIÐ 27
3.3.4 ALMENT UM STUDNINGSUMSITING 29

**4 FISKIVINNA 31**

**4.1 MEIRNÝTSLA 31**
4.1.1 TILBÚGVING (RAKSTRARJÁTTAN) 5.11.1.43. 31
4.1.2 LIMAGJALD Í ALTJÓÐA FELAGSSKAPUM 5.34.1.07. 31
4.1.3 GJALD TIL RÆKJUFLOTAN (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 5.34.4.14. 31
4.1.4 TRYGDARMIÐSTØÐIN (RAKSTRARJÁTTAN) 5.35.1.03. 32
**4.2 MINNINÝTSLA 32**
4.2.1 INNTØKUTRYGD HJÁ FISKIMONNUM (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 5.34.4.01. 32
4.2.2 FISKIVINNUMENNING Á LANDI 5.34.4.16. 33
4.2.3 ÚTLÁN 5.34.5.01 33
4.2.4 EFFEKTIVAR VEÐHALDSÚTREIÐSLUR 5.34.5.07. 35
4.2.5 SJÓVINNUFYRISITINGIN (SKIPASKRÁSETINGIN) (RAKSTRARJÁTTAN) 5.35.1.01. 35
**4.3 AÐRAR VIÐMERKINGAR 35**
4.3.1 VIÐLÍKAHALD (RAKSTRARJÁTTAN) 5.11.1.05. 35

**5 VINNUMÁL 37**

**5.1 MEIRNÝTSLA 37**
5.1.1 SØLA AV SEISMISKUM KANNINGARÚRSLITUM 6.32.1.04. 37
5.1.2 EL-NEVNDIN (RAKSTRARJÁTTAN) 6.37.1.10. 37
5.1.3 LÁNSAFTURGJALD 6.37.6.01. 37
5.1.4 PARTABRØV, YMISK VIÐURSKIFTI 6.37.6.11. 37
5.1.5 POSTVERK FØROYA (LØGUJÁTTAN) 6.38.3.03. 37
5.1.6 KRINGVARPSSENDISTØÐIR (RAKSTRARJÁTTAN) 6.38.3.07. 38
5.1.7 POSTVERK FØROYA, EFTIRLØNIR (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 6.38.3.08. 38
**5.2 MINNINÝTSLA 39**
5.2.1 VINNUMÁLARÁÐIÐ (RAKSTRARJÁTTAN) 6.11.1.06. 39
5.2.2 OLJUFYRISITINGIN OG JARÐFRØÐISAVNIÐ (RAKSTRARJÁTTAN) 6.32.1.02. 39
5.2.3 ENDURGJALD TIL SKIPASMÍÐ 6.37.2.04. 40
5.2.4 GRANSKINGARLUND (LØGUJÁTTAN) 6.37.5.06. 40
5.2.5 HAVNIR (LØGUJÁTTAN) 6.38.1.14. 40
5.2.6 FLOGFERÐSLA (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 6.38.2.10. 41
5.2.7 P/F FLOGSAMBAND 6.38.2.11. 41
5.2.8 FLOGFERÐSLA (LØGUJÁTTAN) 6.38.2.13. 41
5.2.9 POSTVERK FØROYA, UMSKIPAÐ TIL PARTAFELAG 6.38.3.02. 41
5.2.10 KRINGVARPSSENDISTØÐIR (LØGUJÁTTAN) 6.38.3.10. 43
5.2.11 BARSILSSKIPAN (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 6.39.4.01. 43

**6 ÚTBÚGVING OG GRANSKING 45**

**6.1 MEIRNÝTSLA 45**
6.1.1 VIÐLÍKAHALD (RAKSTRARJÁTTAN) 7.11.1.14. 45
6.1.2 YMSAR FELAGSÚTREIÐSLUR (RAKSTRARJÁTTAN) 7.23.1.07. 48
6.1.3 SKÚLABÓKAGRUNNURIN (RAKSTRARJÁTTAN) 7.23.1.16. 48
6.1.4 FÓLKASKÚLIN (RAKSTRARJÁTTAN) 7.23.2.01. 48
6.1.5 SERNÁMSDEPILIN (RAKSTRARJÁTTAN) 7.23.2.02. 49
6.1.6 FØROYA LÆRARASKÚLI (RAKSTRARJÁTTAN) 7.23.6.13. 49
6.1.7 YMISKAR VERKÆTLANIR (RAKSTRARJÁTTAN) 7.23.6.23. 50
6.1.8 LISTASØVN (RAKSTRARJÁTTAN) 7.24.3.22. 50
6.1.9 KRINGVARP FØROYA (LANDSFYRITØKA) 7.24.4.06. 50
6.1.10 LÁNSAFTURGJALD 7.24.8.01. 50
**6.2 MINNINÝTSLA 50**
6.2.1 KRINGVARP FØROYA (LØGUJÁTTAN) 7.24.4.03. 50
6.2.2 STUÐUL TIL FÓLKASKÚLAR 7.23.2.03. 50
6.2.3 SKÚLATILBOÐ UTTAN FYRI FÓLKASKÚLAN (LØGUJÁTTAN) 7.23.2.08. 51
6.2.4 MIÐNÁMSSKÚLIN Í SUÐUROY (LØGUJÁTTAN) 7.23.3.06. 51
6.2.5 TEKNISKI SKÚLI Í KLAKSVÍK (LØGUJÁTTAN) 7.23.3.07. 51
6.2.6 FISKIVINNUSKÚLIN (LØGUJÁTTAN) 7.23.3.08. 51
6.2.7 SKÚLADEPIL Í MARKNAGILI (LØGUJÁTTAN) 7.23.3.09. 51
6.2.8 STUDNINGUR TIL LÆRUPLÁSS (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 7.23.3.14. 51
6.2.9 ALMANNA- OG HEILSUSKÚLI FØROYA (LØGUJÁTTAN) 7.23.6.08. 52
6.2.10 LESTRARSTUÐUL (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 7.23.7.04. 52
6.2.11 UNGDÓMS- OG BYGDAHÚS 7.24.1.25. 52
6.2.12 SJÓNLEIKARHÚS 7.24.2.16. 53
6.2.13 SAVNSHÚS (LØGUJÁTTAN ) 7.24.3.09. 53
6.2.14 FØROYA NÁTTÚRUGRIPASAVN (LØGUJÁTTAN) 7.24.3.14. 53
6.2.15 KIRKJUBØMÚRURIN (LØGUJÁTTAN) 7.24.3.23. 53
6.2.16 ÍTRÓTTAANLEGG 7.24.6.12. 53
**6.3 AÐRAR VIÐMERKINGAR 54**
6.3.1 PRÓVTØKUR (RAKSTRARJÁTTAN) 7.23.1.31. 54
6.3.2 SPJAÐING AV UMSITINGAR-/FYRISITINGARÚTREIÐSLUM 55
6.3.3 YMISKAR LØGUJÁTTANIR 55

**7 INNLENDISMÁL 57**

**7.1 MEIRNÝTSLA 57**
7.1.1 INNLENDISMÁLARÁÐIÐ (RAKSTRARJÁTTAN) 15.11.1.39. 57
7.1.2 SKÓGRØKT LANDSINS (RAKSTRARJÁTTAN) 15.33.2.04. 57
7.1.3 STRANDFARASKIP LANDSINS (LANDSFYRITØKA) 15.38.2.01. 57
**7.2 MINNINÝTSLA 57**
7.2.1 LÁNSAFTURGJALD 15.11.2.07. 57
7.2.2 TRÆPLANTING 15.33.2.05. 57
7.2.3 STRANDFARASKIP LANDSINS (LØGUJÁTTAN) 15.38.2.02. 58

**8 ALMANNAMÁL 59**

**8.1 MEIRNÝTSLA 59**
8.1.1 VANLUKKUTRYGGINGARRÁÐIÐ (RAKSTRARJÁTTAN) 8.21.1.13. 59
8.1.2 BARNAVERND (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 8.21.3.01. 59
8.1.3 BARNAPENINGUR VEITTUR Í FORSKOTI (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 8.21.3.04. 60
8.1.4 ÆTTLEIÐINGARSTUÐUL (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 8.21.3.13. 60
8.1.5 DAGPENINGASKIPANIN (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 8.21.4.01. 60
8.1.6 VANLIG FORSORG (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 8.21.7.01. 60
8.1.7 FÓLKAPENSJÓN (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 8.21.8.01. 62
8.1.8 FYRITÍÐARPENSJÓN (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 8.21.8.05. 63
**8.2 MINNINÝTSLA 63**
8.2.1 ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ (RAKSTRARJÁTTAN) 8.11.1.08. 63
8.2.2 JAVNSTØÐUNEVNDIN (RAKSTRARJÁTTAN) 8.11.1.22. 63
8.2.3 ALV-SKÚLIN (RAKSTRARJÁTTAN) 8.21.1.08. 64
8.2.4 STUÐUL TIL RAKSTUR TIL BARNAVERNDARSTOVUNA 8.21.3.02. 64
8.2.5 BØRN OG UNG (RAKSTRARJÁTTAN) 8.21.3.08. 64
8.2.6 SERFORSORG (RAKSTRARJÁTTAN) 8.21.6.01. 65
8.2.7 BÚSTOVNAR O.A. (LØGUJÁTTAN) 8.21.6.02. 65
8.2.8 ELDRARØKT (RAKSTRARJÁTTAN) 8.21.6.04. 65
8.2.9 NÁMSFRØÐINGAR Í FRAMHALDSÚTBÚGVING (RAKSTRARJÁTTAN) 8.21.9.04. 66
**8.3 AÐRAR VIÐMERKINGAR 67**
8.3.1 SPJAÐING AV UMSITINGAR-/FYRISITINGARÚTREIÐSLUM HJÁ HJÁLPARTÓLAMIÐSTØÐINI 67

**9 HEILSUMÁL 69**

**9.1 MEIRNÝTSLA 69**
9.1.1 KOMMUNULÆKNASKIPANIN (RAKSTRARJÁTTAN) 8.20.2.04. 69
9.1.2 APOTEKSVERKIÐ (LANDSFYRITØKA) 8.20.2.08. 70
9.1.3 LANDSSJÚKRAHÚSIÐ (RAKSTRARJÁTTAN) 8.20.3.04. 70
9.1.4 SØLA AV ÍBÚÐABYGNINGUM (LØGUJÁTTAN) 8.20.3.05. 71
9.1.5 LANDSSJÚKRAHÚSIÐ, ÚTBYGGING (LØGUJÁTTAN) 8.20.3.08. 71
9.1.6 KLAKSVÍKAR SJÚKRAHÚS (RAKSTRARJÁTTAN) 8.20.3.10. 71
9.1.7 SUÐUROYAR SJÚKRAHÚS (RAKSTRARJÁTTAN) 8.20.3.15. 71
9.1.8 EFTIRLØNIR INNAN HEILSUVERKIÐ (LÓGARBUNDIN JÁTTAN) 8.20.3.17. 71
9.1.9 VIÐGERÐARSTOVNURIN HEILBRIGDI (RAKSTRARJÁTTAN) 8.20.4.02. 72
**9.2 MINNINÝTSLA 72**
9.2.1 HEILSUÁTØK 8.20.1.06. 72
9.2.2 ÍLEGUSAVNIÐ (RAKSTRARJÁTTAN) 8.20.2.11. 72
**9.3 AÐRAR VIÐMERKINGAR 72**
9.3.1 SERVIÐGERÐ UTTANLANDS (RAKSTRARJÁTTAN) 8.20.3.20. 72
9.3.2 VIÐLÍKAHALD (RAKSTRARJÁTTAN) 8.11.1.18. 75

# 1 INNGANGUR

Yvirskipaðu reglurnar um grannskoðanina av landsroknskapinum eru ásettar í § 45 í stýrisskipanarlógini. Neyvari reglur eru ásettar í Ll. nr. 25 frá 21. apríl 1999 "um grannskoðan av landsroknskapinum v.m." (grannskoðanarlógin).

Sambært § 11, stk. 3, í grannskoðanarlógini skal hvør landsstýrismaður í seinasta lagi 6 mánaðir eftir fíggjarárslok lata Landsgrannskoðanini eina frágreiðing um frávik ímillum játtanartøl og roknskapartøl.

Landsgrannskoðanin hevur gjøgnumgingið frágreiðingarnar um frávik sambært landsroknskapinum 2005, og hevur síðani havt samskifti við avvarðandi landsstýrismenn/aðalráð um ymiskar spurningar.

Í hesi frágreiðing hevur Landsgrannskoðanin fyri hvørt málsøki víst á og umrøtt stovnar/høvuðskontur, har talan er um meirnýtslu ella minninýtslu, og tikið við viðmerkingar og frágreiðingar frá avvarðandi landsstýrismanni/aðalráði. Harumframt hevur Landsgrannskoðanin í frágreiðingini umrøtt onnur viðurskifti, ið viðvíkja grannskoðanini av landsroknskapinum.

Við hesum verður frágreiðingin latin løgtingsgrannskoðarunum sambært § 12 í grannskoðanarlógini, sjálvt um samlaða ársfrágreiðingin um grannskoðan av landsroknskapinum ikki er liðug. Hetta fyri at Tingið í størri mun kann nýta frágreiðingina í sambandi við fíggjarlógarviðgerðina.

Sambært § 18 kunnu løgtingsgrannskoðararnir lata Løgtinginum frágreiðingina, sum sambært tingskipanini verður viðgjørd eftir § 80, stk. 2, sum skriv til Løgtingið.

Tórshavn, 16. oktober 2006

Leivur Harryson

# 2 FÍGGJARMÁL

## 2.1 Útreiðslur/meirnýtsla

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Meirnýtsla |
|---|---|---|---|
| Bygningur til almennar stovnar í Klaksvík (løgujáttan) | - 1.000 | - 725 | 275 |
| Útgjald úr Trygdargrunninum (lógarbundin játtan) | -1.000 | 174 | 1.174 |
| Rentur av landsins skuld | 132.000 | 137.815 | 5.815 |
| Rentuinntøkur av innistandandi | -41.700 | -29.709 | 11.991 |

### *2.1.1 Bygningur til almennar stovnar í Klaksvík (løgujáttan) 3.11.1.35.*

Á fíggjarlógini var játtanin til inntøkur 2.500 t.kr. og til útreiðslur 1.500 t.kr. Meirnýtslan er 275 t.kr.

### *2.1.2 Útgjald úr Trygdargrunninum (lógarbundin játtan) 3.21.7.10.*

Á fíggjarlógini var játtanin til inntøkur 1.500 t.kr. og til útreiðslur 500 t.kr. Meirnýtslan er 1.174 t.kr. Sambært landsroknskapinum vóru inntøkurnar 4 t.kr. og útreiðslurnar 178 t.kr.

Høvuðsorsøkin til meirnýtsluna er, at rentuinntøkurnar av inniognini (um 74 mió.kr.) hjá Trygdargrunninum ikki eru inntøkuførdar á hesari høvuðskontu.

Rentuinntøkur

Í uppskotinum til løgtingsfíggjarlógina 2005 vóru rentuinntøkurnar ikki tiknar við hjá Trygdargrunninum, men sambært landsstýrismanninum vóru tær tiknar við á høvuðskontu 20.50.2.01. "Rentuinntøkur av innistandandi". Tó var ikki nevnt í viðmerkingunum, hvør upphædd stavaði frá Trygdargrunninum. Sambært landsstýrismanninum er tað helst tí, at Fíggjarnevndin metti rentuinntøkurnar til 1,5 mió.kr. og setti fram broytingaruppskot um at játta rentuinntøkur á játtanini "Útgjald úr Trygdargrunninum". Broytingaruppskotið varð samtykt.

Á løgtingsfíggjarlógini 2006, og í fíggjarlógaruppskotinum 2007, eru rentuinntøkurnar ikki tiknar við á játtanini "Útgjald úr Trygdargrunninum".

Í oktober 2006 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Fíggjarmálaráðið og Føroya Gjaldstova halda tað roknskaparliga vera rættast, at játtanin og inntøkan av inniognini hjá Trygdargrunninum verða skrásett á høvuðskontu 20.50.2.01. "Rentuinntøkur av innistandandi."

Inniogn

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í februar 2006 umrøddu vit inniognina hjá Trygdargrunninum, sum við árslok 2003 var um 71 mió.kr.

Í apríl 2006 vórðu 74,3 mió.kr. fluttur frá peningastovnskontum til kontu í Landsbankanum.

Spurdur, hvat ætlanin var við hesari peningaupphædd, svaraði landsstýrismaðurin í juni 2006:

> *"Endalig avgerð er ikki tikin til henda spurning. Trygdargrunnurin er tikin inn í fíggjarlógina og tikin við í landsroknskapinum, og kundi hetta talað fyri at tikið peningin inn í landskassans vanliga gjaldføri, men ásannast má tó, at peningurin er kravdur inn við serligari løgtingslóg til serligt endamál. Inntil løgtingslógin um Trygdargrunnin møguliga verður broytt, haldi eg, at rættast er at hava nevndu upphædd setta til síðis."*

Landsgrannskoðanin hevur síðani spurt landsstýrismannin, nær støða fer at verða tikin til henda spurning.

Í oktober 2006 hevur landsstýrismaðurin svarað, at ætlanin er í hesari tingsetuni at taka endaliga avgerð um at taka Trygdargrunnin av. Tað fer at hava við sær, at lógin um Trygdargrunnin verður tillagað soleiðis, at landið átekur sær skyldurnar og yvirtekur ognirnar.

### *2.1.3 Rentur av landsins skuld 20.50.1.01.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 132 mió.kr. Meirnýtslan er 5,8 mió.kr.

Á fíggjarlógini 2005 vóru upprunaliga játtaðar 127,5 mió.kr. Á eykajáttanarlógini november 2005 varð játtanin hækkað 4,5 mió.kr.

Broytingin í kursvirðinum á brævalánunum pr. statusdagin verður bókað sum kursmunur saman við rentuútreiðslunum. Hesin roknskaparhátttur kann hava við sær ávís sveiggj í rentuútreiðslunum. Kursmunurin hevur ávirkað roknskapin 2005 við um 3,6 mió.kr. netto (inntøka), í 2004 var hinvegin talan um eina nettoútreiðslu um 17,5 mió.kr.

Hesin kursmunur er hvørki vinningur ella tap, uttan so at brævalán verða afturkeypt í úrtíð. Er tað ikki ætlanin, kann verða sagt, at talan er um "óneyðugar" bókingar av kursmunum, ið grugga tíðaravmarkanina av rentuútreiðslum millum árini. Tá brævalán er skrivað út og selt, veit Landsstýrið, hvønn kurs tað er selt fyri. Brævalánið skal rindast aftur til kurs 100, og tí kennir Landsstýrið eisini samlaða kursmunin. Hesin kursmunur kundi verið javnaður út liniert millum árini, brævalánið varir. Landsgrannskoðanin hevur tí reist spurningin, um ikki hesin bókingarháttur hevði verið rætta mannagongdin.

Í juni 2006 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at talan er um eina roknskaparliga meginreglu, ið hevur verið nýtt í mong ár. Landsstýrismaðurin heldur tað ikki verða rætt at broyta roknskaparmeginreglu á hesum øki. Galdandi roknskaparregla gevur eina rættvísandi mynd av rakstri og fíggjarstøðu við ársenda.

### *2.1.4 Rentuinntøkur av innistandandi 20.50.2.01.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar inntøkur 41,7 mió.kr. Minniinntøkan er 12 mió.kr.

Á fíggjarlógini 2005 vóru upprunaliga játtaðar 46,2 mió.kr. Á eykajáttanarlógini november 2005 varð játtanin lækkað 4,5 mió.kr. vísandi til nýggja meting av rentuinntøkunum.

Spurdur, hví inntøkurnar vórðu heilar 12 mió.kr. lægri, enn mett varð í november 2005, hevur landsstýrismaðurin víst á, at játtanin gjørdist nakað samantvinnað og torskild. Yvirskotið frá Landsbankanum og umsitingargjaldið til Landsbankan varð samlað tikið við undir hesi játtan, tí ætlanin var at leggja Landsbankan og Hagstovuna saman. Stovnarnir vórðu ikki lagdir saman, og tí varð roynt at skilja hesar upphæddir út aftur í sambandi við eykajáttanina.

Eisini hevur landsstýrismaðurin víst á, at metingin hjá Landsbankanum um kursjavning gjørdist øðrvísi.

## 2.2 Inntøkur/frávik

Talvurnar niðanfyri vísa játtan á fíggjarlóg og roknskapartøl fyri inntøkur í 2005.

mió.kr.

| | 20.52.1. Skattainntøkur | Játtanin | Roknskapur | Meir-/minni |
|---|---|---|---|---|
| 01 | Vanligur landsskattur | 1.294,0 | 1.321,1 | 27,1 |
| 06 | Kolvetnisskattur, persónar | 4,0 | 1,4 | - 2,6 |
| 07 | Felagsskattur | 100,0 | 104,4 | 4,4 |
| 08 | Kolvetnisskattur, feløg | - | 0,4 | 0,4 |
| 11 | Kapitalvinningsskattur | 45,0 | 30,1 | -14,9 |
| 13 | Avgjald av kapitaleftirlønum | 9,0 | 12,2 | 3,2 |
| 25 | Arvaavgjald | 4,0 | 5,2 | 1,2 |
| 28 | Gjald til barsilsskipanina | 29,5 | 30,3 | 0,8 |
| 30 | Gjald frá Búnaðarstovuni | 2,7 | 2,3 | - 0,4 |
| | **Tilsamans** | **1.488,2** | **1.507,4** | **19,2** |

Størstu frávikini eru “Vanligur landsskattur” og “Kapitalvinningsskattur”, sum eru ávikavist 27,1 mió.kr. hægri og 14,9 mió.kr. lægri, enn mett var.

mió.kr.

| | 20.52.2. Avgjøld og tollur | Játtan | Roknskapur | Meir-/minni |
|---|---|---|---|---|
| 01 | Meirvirðisgjald | 915,0 | 989,2 | 74,2 |
| 04 | Tollavgjald | 30,0 | 31,2 | 1,2 |
| 07 | Punktgjald | 190,0 | 153,3 | - 36,7 |
| 10 | Lønhæddargjald | 12,0 | 12,7 | 0,7 |
| 13 | Brennioljugjald | 63,0 | 64,1 | 1,1 |
| 16 | Framleiðsluavgjald | 22,0 | 18,7 | - 3,3 |
| 19 | Skrásetingargjald | 58,0 | 94,5 | 36,5 |
| 22 | Vegskattur (vektgjald) | 51,0 | 52,3 | 1,3 |
| 25 | Ferðaavgjald | 11,0 | 12,3 | 1,3 |
| 28 | Umhvørvisavgjald á smyrjiolju | 2,2 | 2,3 | 0,1 |
| | **Tilsamans** | **1.352,0** | **1.428,3** | **76,3** |

Størstu frávikini eru “Meirvirðisgjald” og “Punktgjald”, sum eru ávikavist 74,2 mió.kr. hægri og 36,7 mió.kr. lægri, enn mett var.

mió.kr.

| | 20.52.3. Ymiskar inntøkur | Játtan | Roknskapur | Meir-/minni |
|---|---|---|---|---|
| 01 | Útluting frá Fíggingargrunninum frá 1992 | 50,0 | 49,7 | -0,3 |
| 04 | Útluting frá almennum partafeløgum | 10,0 | 10,1 | 0,1 |
| 10 | Aðrar inntøkur | 7,3 | 7,6 | 0,3 |
| | **Tilsamans** | **67,3** | **67,4** | **0,1** |

t.kr.

| | 20.52.3.10. Aðrar inntøkur | Játtan | Roknskapur | Meir-/minni |
|---|---|---|---|---|
| 01 | Loyvisgjald | 50 | 0 | - 50 |
| 02 | Skeinkiloyvi, avgjald | 65 | 105 | 40 |
| 04 | Navnaprógv | 10 | 9 | - 1 |
| 05 | Bøtur | 1.000 | 28 | - 972 |
| 07 | Burturlutingargjald | 1.100 | 1.034 | - 66 |
| 09 | Løggilding av el-innleggjarum, avgjald | 75 | 110 | 35 |
| 11 | Víddargjald | 3.000 | 6.028 | 3.028 |
| 12 | Nýtslugjald (royalties, oljugjøld) | - | 325 | 325 |
| 13 | Afturgjald vegna skuldarumskipan | 2.000 | 0 | -2.000 |
| 60 | Óvanligar inntøkur | - | - 71 | -71 |
| | **Tilsamans** | **7.300** | **7.568** | **268** |

Størsta frávikið er “Víddargjald” og “Afturgjald vegna skuldarumskipan”, sum eru ávikavist 3.028 t.kr. hægri og 2.000 t.kr. lægri, enn mett var.

Undirkonta 13: Afturgjald vegna skuldarumskipan

Á fíggjarlógini var upprunaliga eingin játtan á kontu 20.53.2.10.13 “Afturgjald vegna skuldar-umskipan”. Á eykajáttanarlógini apríl 2005 varð kontan stovnað. Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina er inntøkan ein avleiðing av Ll. nr. 29 frá 8. apríl 2005 “um umskipan av landsskatta-, mvg- og tollskuld v.m. hjá fólki”. Hildið varð, at landskassin fór at fáa nakað av skuld inn, um landskassin fekk heimild at taka lut í skuldarsemjum, men tað var ringt at meta um hvussu nógv. Fyrstu upphæddirnar kundu koma inn í 2005, og Fíggjarmálaráðið metti tær varisliga til 2 mió.kr.

Sambært landsroknskapinum eru ongar inntøkur í 2005, og Landsgrannskoðanin bað í mai 2006 landsstýrismannin um eina frágreiðing.

Í juni 2006 ásannaði landsstýrismaðurin, at inntøkurnar frá skuldarumskipanum høvdu verið minni, enn roknað var við, men væntandi fór nakað av peningi at koma inn í 2006.

Sambært landsroknskapinum eru tó ongar inntøkar bókaðar í 2006, og Landsgrann-skoðanin hevur tí spurt, hvussu nógvur peningur fer at koma inn í 2006.

Í oktober 2006 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at sum tað sær út nú, kemur einki inn á hesi inntøkujáttan, tí játtanin fevnir bert um aðra skuld til landskassan enn skatt og mvg. Higartil hava skuldarumskipanirnar, sum fyri tað mesta eru vinnulán og veðhald, ikki givið grundarlag fyri afturgjaldi, og hildið verður heldur ikki, at tær fara at geva nakað í framtíðini. Tó er í nøkrum førum pant tikið í ogn, sum tó ikki fellur til gjaldingar, fyrr enn ognin verður seld ella búgvið skift. Nakað av peningi kemur helst inn í skatti og mvg, men hesin peningur verður skrásettur sum minking av avseting móti tapi á ávikavist høvuðskontum 20.52.1.01. “Vanligur landsskattur” og 20.52.2.01. “Meirvirðisgjald”.

Í fíggjarlógaruppskotinum 2007 er ikki roknað við nakrari inntøku á hesari kontu.

mió.kr.

| | 20.54.1.01. Heildarveiting o.t. | Játtan | Roknskapur | Meir-/minni |
|---|---|---|---|---|
| 01 | Heildarveiting | 615,7 | 615,5 | - 0,2 |
| 02 | Endurgjøld | 14,2 | 15,5 | 1,3 |
| | **Tilsamans** | **629,9** | **631,0** | **1,1** |

## 2.3 Ivamál um játtanarskipanina

### *2.3.1 Inngangur*

Í nærum 15 ár hava Landsgrannskoðanin og løgtingsgrannskoðararnir gjørt vart við, at virksemið hjá fleiri almennum stovnum/grunnum ikki er við á fíggjarlógini, og at grundleggjandi ásetingar í stýrisskipanarlógini um fíggjarlóg, roknskap og grannskoðan verða ikki hildnar.

Í seinasta uppskoti til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2004 (Lm. nr. 54-6/2005), ið varð samtykt 21. apríl 2006, hildu løgtingsgrannskoðararnir, at *"tað framvegis er ivasamt:*

- *Um allar inntøkur landsins eru við í landsroknskapinum.*
- *Um allar ognir og øll skuld er við í landsroknskapinum.*
- *Um allir skattir/gjøld verða kravd inn sambært ásetingunum í stýrisskipanarlógini.*
- *Um allar veitingar og umsitingarútreiðslur verða goldnar við heimild í fíggjarlógini.*
- *Hvussu landsins gjaldføri skal verða gjørt upp og umsitið.*

*Í fleiri uppskotum til samtyktar hava løgtingsgrannskoðararnir víst á, at málið um tilknýtið hjá landsstovnum/-grunnum til fíggjarlóg og landsroknskap tykist vera endað sum ein løgfrøðiligur stríðsspurningur um niðurstøðurnar í álitinum, sum Fíggjarmálaráðið gjørdi í november 2001.*

*Formansskapur Løgtingsins hevur sett ein arbeiðsbólk at fyrireika uppskot til eina játtanarlóg. Løgtingsgrannskoðararnir vóna, at við hesari lóg fæst greiða á mongu ivamálunum á hesum øki."*

Niðanfyri hava vit roynt at kunna um søguligu gongdina, og um tey mongu stig, ið eru tikin, til at loysa hetta drúgva mál, sum tó enn ikki er endaliga loyst.

### *2.3.2 Játtanarskipanin í áttati- og fyrst í nítiárunum*

Ein stórur partur av játtanunum á fíggjarlógini vóru avsetingar í grunnar. Veruliga nýtslan í grunnunum varð skrásett á ymiskum kontum á fíggjarlógini, og tí var hvørki meir- ella minninýtsla staðfest í játtanarroknskapinum. (Í 1992 vórðu 67 av 92 landskassagrunnum tiknir av, og í 1997 vórðu 15 grunnar tiknir av.)

Einstaka játtanin á fíggjarlógini var í flestu førum gjøllari greinað í einum fylgiskjali, sum kundi vera skriv ella taluppseting frá einum stovni ella frá Landsstýrinum. Hesi fylgiskjøl vórðu savnað saman, avritað og latin Løgtinginum saman við fíggjarlógaruppskotinum. Tá ið fíggjarlógin var samtykt, kom ofta fyri, at fylgiskjøl, viðmerkingar/broytingar frá Landsstýrinum og frá meirilutanum í Fíggjarnevndini ikki hingu saman. Ofta bar ikki til at síggja, hvørjar fyritreytir lógu aftan fyri eina játtan, og hvat endamálið var við játtanini.

Eingin játtanarlóg ella skrivlig játtanarskipan var galdandi í hesum tíðarskeiði. Í sambandi við viðgerðina av fíggjarlógaruppskotinum 1990, og síðani eisini 1991 og 1992, varð í álitinum frá Fíggjarnevndini tikið samanum nakrar meginreglur fyri, hvussu ein játtan skuldi skiljast, og hvørjar bindingar talan var um. Hesar høvuðsreglur vóru galdandi fyri játtanir til "umsitingarrakstrarstøð":

1. Játtanin er ein blokkur til rakstrarstaðið.
2. Játtaðar ósettar normeringar kunnu ikki setast uttan við loyvi frá Landsstýrinum, og treytað av at stovnurin kann halda seg innanfyri samlaðu játtanina til stovnin.
3. Ongin nýnormering verður játtað uttan við loyvi Fíggjarnevnds Løgtingsins.
4. Tað er ábyrgd stovnsleiðaranna at syrgja fyri, at givnar játtanir verða hildnar. Um – sum undantøk vegna t.d. broyttar fortreytir – ein játtan ikki kemur at halda, er tað skylda stovnsleiðaranna at siga Landsstýrinum frá hesum. Landsstýrið vil so, saman við Fíggjarnevndini, taka neyðug stig.

5. Broyting av leigumálum og EDV-skipanum, leasing v.m. kann bert fremjast innan galdandi játtan og við loyvi frá Landsstýrinum.

Í januar 1990 sendi Landsstýrið út skriv til allar almennar stovnar, har m.a. frammanfyristandandi høvuðsreglur vórðu endurtiknar og nakað útgreinaðar.

### *2.3.3 Tilmæli um nýggja játtanarskipan í 1995*

Í mai 1995 gjørdu Grannskoðanardeild Landskassans, Føroya Gjaldstova og Fíggjar- og Búskapardeildin eitt felags tilmæli um at broyta játtanarskipanina, og á fundi 10. mai 1995 tóku landsstýrismenn og Fíggjarnevndin undir við, at arbeiðið við at broyta fíggjarlógarmannagongdina skuldi halda fram við støði í hesum tilmæli.

Í tilmælinum varð nomið við nakrar høvuðstrupulleikar í verandi skipan:

*at* verandi fíggjarlógaruppseting ikki gevur nóg greitt yvirlit yvir almenna virksemið, og ikki gevur nóg fullfíggjaða mynd av útreiðslum og inntøkum landskassans, og at virksemið hjá fleiri almennum stovnum ikki er við á fíggjarlógini,

*at* innihald og endamál við teimum einstøku játtanunum ikki er nóg væl lýst,

*at* politisk og umsitingarlig ábyrgd ikki í nóg stóran mun kann staðfestast í sambandi við nýtslu av almennum peningi, av tí at ongar formellar reglur eru fyri, hvørjar heimildir og skyldur fyrisitingin hevur í umsitingini av fíggjarjáttanum.

Í tilmælinum varð skotið upp at royna at loysa hesar trupulleikar við at fara yvir til meginreglurnar í tí skipan, ið verður nýtt í Danmark. Talan er um reglur um, hvussu fíggjarlógin verður sett upp, krøv til lýsing og útgreining av játtanum, og reglur um heimild og skyldu hjá fyrisitingini í sambandi við umsitingina av fíggjarjáttanum.

Mælt varð til beinanvegin at fara undir at gera eitt uppskot til endamálsuppbýti á fíggjarlógini at leggja fyri Fíggjarnevndina. Uppskotið skuldi gerast við støði í fíggjarlógini fyri 1995. Somuleiðis skuldi ein budgettleiðbeining leggjast fyri Fíggjarnevndina at góðkenna.

### *2.3.4 Nýggj játtanarskipan í 1997*

Við fíggjarlógaruppskotinum 1996 varð ein roynd gjørd at broyta fíggjarlógaruppsetingina, men fíggjarlógaruppskotið 1997 var fyrsta árið, tá fíggjarlógin og viðmerkingarnar vóru sett upp eftir nýggjum leisti. Stundir og orka høvdu ikki verið at gera veruliga budgettleiðbeining, og eitt uppskot til endamálsuppbýti á fíggjarlógini var ikki frammanundan lagt fyri Fíggjarnevndina, so sum ætlanin var. Í staðin fyri ætlaðu budgettleiðbeiningina var í almennu viðmerkingunum víst til nakrar játtanarmeginreglur (Játtanarskipanin), ið vóru galdandi fyri m.a. ymisku játtanarsløgini.

Fíggjarlógaruppskotið 1997 var tó eitt stórt framstig á fleiri økjum, ein nýggj kontu- og roknskaparskipan var eisini tikin í nýtslu í 1997, og roknskaparkunngerðin var komin í gildi. Men høvuðstrupulleikarnir við gomlu skipanini, sum víst var á í tilmælinum frá mai 1995, vórðu tó ikki allir loystir við nýggju játtanarskipanini, og onnur ivamál tóku seg upp.

### *2.3.5 Framhaldandi ivi um tilknýti hjá stovnum-/grunnum til fíggjarlóg o.a.*

Ein av hesum framhaldandi trupulleikum var, at virksemið hjá fleiri almennum stovnum-/grunnum ikki var við á fíggjarlógini. Stýrisskipanarlógin og løgtingslóg um landsins almenna roknskaparhald áseta, at alt virksemið hjá Landsstýrinum og hjá øllum landsstovnum skal vera játtað á fíggjarlóg ella aðrari játtanarlóg, og at ein samlaður landsroknskapur skal verða gjørdur, sum fevnir um allar inntøkur og útreiðslur landsins, umframt aktiv og passiv.

Sambært § 45, stk. 4, í stýrisskipanarlógini skulu løgtingsgrannskoðararnir, umframt árliga landsroknskapin, eisini fara ígjøgnum roknskapin hjá "almennum stovnum, sum hava sjálv-

støðugan roknskap". Landsstýrinum er álagt at leggja hesar roknskapir fyri tingið til kunningar og at lata løgtingsgrannskoðarunum roknskapirnar, sum síðani skulu leggja teir fyri tingið til samtyktar, saman við viðmerkingum sínum.

Í 1999 boðaði løgmaður frá, at hann fór at taka stig til at seta ein arbeiðsbólk at gjøgnumganga viðurskiftini hjá stovnum og grunnum, sum ikki eru við á fíggjarlógini og í landsroknskapinum. Løgmaður vendi sær í hesum sambandi til landsstýrismannin í fíggjarmálum, sum saman við løgmanni gjørdi av at biðja fólk í umsitingini gera arbeiðið. Fíggjarmálaráðið fekk síðani ábyrgdina av at fáa arbeiðið gjørt.

### *2.3.6 Álit um landsstovnar og –grunnar í 2001*

Í november 2001 læt Fíggjarmálaráðið úr hondum eitt álit "um landsstovnar og –grunnar, tilknýti til fíggjarlóg, landsroknskap og grannskoðanarviðurskifti". Niðurstøðan í álitinum er, at tað er í stríð við stýrisskipanarlógina, tá ið fleiri landsstovnar og –grunnar ikki verða tiknir við á fíggjarlógina og í landsroknskapin, og eisini er tað í stríð við stýrisskipanarlógina, tá ið roknskapirnir hjá hesum grunnum/stovnum ikki verða lagdir fyri Løgtingið.

Í juni 2002 kunnaði løgmaður um, at álitið frá Fíggjarmálaráðnum varð lagt fram og gjøgnumgingið á landsstýrisfundi 11. desember 2001. Har varð avrátt at gera neyðugar broytingar samsvarandi álitinum, og skuldu tær við á fíggjarlógina 2003.

31. januar 2003 varð málið eisini viðgjørt á fundi millum løgtingsgrannskoðararnar, løgmann og landsstýrismannin í fíggjarmálum. Løgmaður helt tá, at í seinasta lagi 1. september 2003 mátti Landsstýrið taka endaliga støðu til ognarrætt og framtíðar tilknýti til fíggjarlóg og landsroknskap, soleiðis at neyðugar broytingar í fíggjarlógaruppskotinum fyri 2004 og aðrar lógarbroytingar kundu verða framdar fyri árslok 2003. Henda tíðarætlan helt heldur ikki.

Í januar 2004 kunnaði Løgmansskrivstovan um, at miðfyrisitingin hevði arbeitt við málinum í 2003. Málið kom tó ikki víðari, av tí at val varð skrivað út 5. desember 2003.

Í september 2004 helt Fíggjarmálaráðið, at semja var í landsumsitingini um eina nýggja játtanarskipan, ið ætlanin var at lýsa sum rundskriv frá landsstýrismanninum í fíggjarmálum. Uppskotið til rundskriv varð sent Løgtingsins umsiting til viðmerkingar. Umsitingin boðaði frá, at hon kundi ikki taka undir við fleiri av ásetingunum í rundskrivinum, og var av tí áskoðan, at rættast var at gera eina játtanarlóg.

### *2.3.7 Álit um og uppskot til nýggja játtanarlóg í 2006*

Í februar 2005 legði Fíggjarnevndin fram uppskot til samtyktar (Lm. nr. 38/2004) um, at Formansskapur Løgtingsins setti ein serkønan arbeiðsbólk at fyrireika uppskot til eina játtanarlóg, ið skuldi áseta treytir og mannagongdir fyri játtanum. Løgtingið samtykti uppskotið 1. mars 2005.

24. februar 2006 lat arbeiðsbólkurin løgtingsformanninum eitt álit. Arbeiðsbólkurin lýsti og viðgjørdi ivamál og trupulleikar við verandi játtanarskipan, og vísti á, hvussu trupulleikarnir kunnu verða loystir við einari játtanarlóg. Saman við álitinum lat arbeiðsbólkurin Formansskapinum eitt uppskot til játtanarlóg. Í álitinum lýsti arbeiðsbólkurin eisini játtanarskipanirnar í Danmark, Grønland, Íslandi, Noregi og Svøríki, umframt aðalreglurnar fyri ríkisfíggjarætlan og ríkisroknskap í OECD-londum.

3. mars 2006 legði løgtingsformaðurin síðani fram uppskot til løgtingslóg "um landsins játtanarskipan" (Lm. nr. 81/2005).

### *2.3.8 Nýskapandi lógargreinir í lógaruppskotinum*

Í lógaruppskotinum vóru fleiri broytingar í mun til verandi játtanarskipan, og niðanfyri hava vit víst á nakrar nýskapandi lógargreinir:

## Brot úr kapittul 1: Játtanarlógir og aðalreglur um játtan

**§ 4.** Allur beinleiðis og óbeinleiðis skattur, sum kravdur verður inn við heimild í lóg, verður førdur á fíggjarlógina.
*Stk. 2.* Beinleiðis og óbeinleiðis skattur fevnir um øll kravd gjøld, uttan beinleiðis mótveiting.

**§ 5.** Við á fíggjarlógina verða tiknir stovnar og grunnar o.t., hvørs útreiðslur ella roknskaparligu hall verða goldin við studningi frá landinum ella við gjøldum ella aðrari inntøku sambært lóg, ella sum eru ella partvís eru stovnaðir við kapitalinnskoti frá landinum.
*Stk. 2.* Stk. 1 verður tó ikki nýtt, um reglur eru í aðrari lóg, sum víkja frá hesum.

## Brot úr kapittul 2: Játtanararbeiðið og játtanareftirlit

**§ 8.** Fyri 1. apríl leggur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum fram uppskot til løgtingssamtykt, sum fevnir um ein samlaðan játtanarkarm fyri fíggjarlógina næsta ár, býtt á greinar.
*Stk. 2.* Ein frágreiðing (Búskaparfrágreiðing I), sum lýsir og metir um búskaparstøðu Føroya, herímillum tann almenna geiran (land og kommunur), verður løgd við uppskotinum til løgtingssamtykt.
*Stk. 3.* Hvør landsstýrismaður skal innan fyri tillutaða játtanarkarmin gera sín part av fíggjarlógaruppskotinum.

**§ 9.** Samstundis sum fíggjarlógaruppskotið verður lagt fram, leggur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum fram frágreiðing (Búskaparfrágreiðing II), sum gjølligari lýsir og metir um innihaldið í fíggjarlógaruppskotinum og greiðir frá játtanareftirlitinum í fíggjarárinum.

## Brot úr kapittul 3: Uppseting og innihald í fíggjarlógaruppskotinum

**§ 12.** Við átekning kann heimild verða givin at gera avtalur, sum hava við sær útreiðslur í fylgjandi fíggjarárum, og gjørdar kunnu verða ítøkiligar lógarásetingar, viðvíkjandi játtanum.
*Stk. 2.* Átekningar kunnu bara verða tiknar við á fíggjarlóg ella eykajáttan smbr. § 2, stk. 1, nr. 1. og 2, og hava bara gildi í sama fíggjarári.

## Brot úr kapittul 4: Játtanarsløg

**§ 14.** Játtanirnar á fíggjarlógini kunnu liðast í hesi játtanarsløg, sum serligar ræðisreglur galda fyri:

1. Rakstrarjáttan
2. Løgujáttan
3. Lógarbundin játtan
4. Stuðulsjáttan

*Stk. 2.* Játtanarslagið skal síggjast á høvuðskontuni.
*Stk. 3.* Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum tekur støðu í ivaspurningum um játtanarsløg.

**§ 22.** Løgujáttan verður nýtt í sambandi við bygging, ognan ella avhending av bygningum, løgum og skipum o.ø. og í sambandi við stór viðlíkahaldsarbeiði.
*Stk. 2.* Hóast ásetingina í § 13 kann tað við átekning verða givin heimild at flyta óbrúktar løgujáttanir til seinni fíggjarár.
*Stk. 3.* Í viðmerkingunum til løgujáttanir skal verða ein frágreiðing um tað ávísa løguarbeiðið og upplýsingar um útreiðslurnar fyri alla verkætlanina liðaðar á fíggjarár.
*Stk. 4.* Viðmerkingar til inntøkujáttanir skulu lýsa grundarlagið undir inntøkumetingum.

**§ 24.** Stuðulsjáttan verður nýtt til stuðul, sum ikki er lógarbundin, til lán og til útreiðslur fyri veðhøld.
*Stk. 2.* Verður stuðul, lán og innloyst veðhøld afturrindað, verða tey tikin við undir stuðulsjáttan.
*Stk. 3.* Sama um gjald heilt ella fyri ein part verður goldið í einum seinni fíggjarári, so verða tilsagnir um stuðul og lán útreiðsluførdar í tí fíggjarári, tá ið bindandi tilsøgn er givin. Tilsagnarupphæddir, ið ikki eru útgoldnar við ársenda, verða fluttar til fíggjarstøðuna, har tær standa støðlaðar, til tilsøgnin endaliga verður avgreidd.
*Stk. 4.* Viðmerkingar til stuðulsjáttanir skulu lýsa neyvt endamál, móttakaraskara, útrokningarhátt, samantalda studningsupphædd og útgjaldingartíð.

## Brot úr kapittul 5: Stuðulsfyrisiting

**§ 25.** Til tess at tryggja skynsama stuðulsfyrisiting skulu reglur vera ásettar um:

1. Endamálið við stuðlinum

2. Móttakaraskara og útrokningargrundarlag
3. Útgjaldshátt og útgjaldstíð
4. Málsviðgerð
5. Viðtøkur fyri sjálvsognarstovnar
6. Eftirlit
7. Fíggjarætlan, roknskap og grannskoðan
8. At geva ella taka aftur tilsøgn og at afturrinda stuðul
9. Upplýsingarskyldu og atgongd til kanning á staðnum og kanning av roknskapartilfari
10. Møguliga sekt við bót fyri at bróta reglurnar

*Stk. 2.* Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum ásetur reglur, sum víst í stk. 1.
*Stk. 3.* Í tann mun slíkar reglur ikki longu eru ásettar í ella sambært lóg, verða reglurnar, ásettar eftir stk. 2, nýttar.

<u>Brot úr kapittul: Aðrar ásetingar</u>

**§ 26.** Tað liggur á landsstýrismanninum í fíggjarmálum at síggja til, at hvør einstakur landsstýrismaður altíð heldur ásetingarnar í hesi lóg og reglur, gjørdar sambært lógini.

**§ 27.** Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum fær heimild at áseta neyvari reglur um:

1. Uppseting og innihald í uppskoti til fíggjarlóg.
2. Rakstrarjáttan, herímillum hvørjar inntøkur og utreiðslur, ið kunnu verða tiknar við.
3. Fíggjarligan rakstur av inntøkufíggjaðum virksemi
4. Fíggjarligan rakstur av stuðulsfíggjaðum virksemi, og meginreglur fyri, nær hesar inntøkur verða skrásettar
5. Løgujáttan
6. Lógarbundna játtan
7. Stuðulsjáttan
8. Avmarkingar í flytingum millum standardkontur

Lógaruppskotið varð 15. mars 2006 beint í serliga § 25 nevnd. Uppskotið kom ikki aftur úr nevnd, áðrenn Tingið fór heim, og fall tí burtur.

### *2.3.9 Tilmæli*

Sum víst á frammanfyri, kom uppskotið frá løgtingsformanninum til eina lóg um "landsins játtanarskipan" ikki aftur úr serligu § 25-nevndini.

Landsgrannskoðanin heldur tað vera umráðandi, at hetta mál ikki verður slept, og vil loyva sær at mæla løgtingsformanninum til, at reisa málið av nýggjum skjótast til ber.

Vísandi til tað, sum verður ført fram í frágreiðingini undir Løgmansfyrisitingini undir yvirskriftini "Alment um studningsumsiting", harmast eisini løgmaður um, at hóskandi reglur ikki enn eru settar í gildi um játtanarviðurskifti, serliga tí, at nøktandi reglur um studning og studningsumsiting hava manglað í fleiri ár. Løgmaður vísir á, at málið um at seta í gildi nýggja lóg um játtanarreglur liggur í Løgtinginum, og tað má tí ganga sína gongd, áðrenn onnur stig verða tikin av Landsstýrinum.

## 2.4 <u>Aðrar viðmerkingar</u>

### *2.4.1 Umsiting av Trygdargrunninum (rakstrarjáttan) 3.21.7.11.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 225 t.kr. til Trygdargrunnin (rakstrarjáttan) 3.21.7.11., minninýtslan er 50 t.kr.

Hvussu umsitingin av Trygdargrunninum skal verða fíggjað, er ein spurningur, ið áður hevur verið umrøddur. Í uppskotinum til eykajáttanarlóg november 2004 varð skotið upp at

hækka játtanina 115 t.kr. til væntaðu meirnýtsluna. Fíggjarnevndin mælti tá frá at veita eykajáttan, vísandi til, at *"tá fyrisitingin er partur av Toll & Skatt, heldur nevndin ikki, at grundarlag er fyri at mæla til meirjáttan."* Broytingaruppskot um at strika eykajáttanina varð samtykt.

Í september 2005 kunnaði landsstýrismaðurin um, at umhugsað eigur at verða, um játtanin í framtíðini skal verða løgd afturat játtanini hjá Toll- og Skattstovu Føroya.

Í uppskotinum til fíggjarlóg 2007 er játtanin flutt til Toll- og Skattstovu Føroya.

### *2.4.2 Viðlíkahald (rakstrarjáttan) 3.11.1.13.*

Høvuðskontan ber heitið "Viðlíkahald", og játtanin í 2005 var 377 t.kr. Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógaruppskotið er *"játtanin til at viðlíkahalda bygningar og ognir, sum landsstýrismaðurin í fíggjarmálum varðar av"*. Mettu viðlíkahaldsútreiðslurnar eru í viðmerkingunum "játtaðar" á standardkontu 16 "Leiga, viðlíkahald og skattur".

Sundurgreiningin á standardkontur í viðmerkingunum til fíggjarlógina er ikki bindandi, men eftirsum talan er um eina høvuðskontu, ið er markað til viðlíkahald, má Løgtingið rokna við, at játtanin í høvuðsheitum verður brúkt til viðlíkahald (standardkonta 16), soleiðis sum hetta útreiðsluslag er allýst í konteringarleiðbeiningini til Kontuskipan Landsins, og ikki til beinleiðis keyp av vørum og tænastum (standardkonta 14) ella keyp av útbúnaði (standardkonta 15). Verður tilfarsparturin av viðlíkahaldsarbeiðinum gjørdur upp fyri seg, skal tilfarið verða bókað undir standardkontu 14.

Sambært landsroknskapinum eru á høvuðskontu 3.11.1.13. "Viðlíkahald" m.a. nýttar 274 t.kr. til at keypa neyðstreymsgeneratorskipan til Fíggjarmálaráðið.

Útreiðslan til at keypa neyðstreymsgeneratorskipanina, tilsamans 365 t.kr., er í 2005 og 2006 bókað undir standardkontu 15, á StRk 1520 "Telduútbúnaður og edv-menning". Vit kunnu í hesum sambandi eisini nevna, at í juni 2006 er á hesari høvuðskontu m.a. bókað rokning, kr. 16.288, fyri arkivhillar o.a. til Stýrið fyri Toll- og Skattstovu Føroya. Rokningin er bókað á StRk 1540 "Innbúgv, maskinur o.l."

Landsgrannskoðanin hevur víst á, at útreiðslurnar til neyðstreymsgenerator og arkivhillar eru farnar til vørur, tænastur og útbúnað, ið vanliga ikki er at rokna sum viðlíkahald, ella tilfar í sambandi við viðlíkahald, soleiðis sum hetta hugtak er allýst í konteringarleiðbeiningini til Kontuskipan Landsins.

Í oktober 2006 hevur Fíggjarmálaráðið greitt frá, at tá ið umræður viðlíkahald, er tað altíð ein spurningur, hvussu stórur partur av viðlíkahaldinum er ábót. So er eisini í hesum føri. Endamálið við neyðstreymsgeneratorinum er at tryggja atgeingið til EDV-skipanirnar í Fíggjarmálaráðnum. Hetta endamál er rokkið í størri mun enn við battarískipanini, sum í 1997 varð hildin at vera nøktandi. Talan er tó ikki um at brúka játtanina til nakað heilt annað, hóast tøknin er ein onnur, og úrslitið er nógv betri. Talan er framvegis at tryggja atgeingi til EDV-skipanirnar.

Viðvíkjandi arkivhillunum heldur Fíggjarmálaráðið, at spurningur kann verða settur við, um henda útreiðsla átti at verið bókað á hesi høvuðskontu.

<u>Kontuskipan Landsins, viðlíkahaldsútreiðslur</u>

Sambært konteringarleiðbeiningini til Kontuskipan Landsins, sum sambært Gjaldstovuni skal verða fylgd, eru nevndu útreiðslusløg m.a. allýst soleiðis:

Standardkonta 14 "keyp av vørum og tænastum":

> *"Á hesi standardkontu verður skrásett keyp av vørum og tænastuveitingum o.ø., ið fara til nýtslu og/ella framleiðslu í einum 1-árs skeiði (1-árs meginregla er galdandi)."*

Standardkonta 15 "keyp av útbúnaði, netto":

> *"Á hesi standardkontu verða bókaðar tær keypsútreiðslur av tí útbúnaði t.d. maskinur, innbúgvi og øðrum rakstrargøgnum, ið varir meir enn 1 ár, og sum hevur eitt ávíst virði (vegleiðandi virði*

*er 4.000 kr., meirvirðisgjald ikki íroknað). Í sambandi við keypið verður eisini roknað við útreiðslum sum t.d. uppseting, flutningi og serfrøðingahjálp."*

Standardkonta 16 "leiga, viðlíkahald og skattur":

*"Á hesi standardkontu verða konteraðar allar tær útreiðslur, ið stava frá leigu, langtíðarleigu og viðlíkahaldi av hølum, bygningum og løgum."*

StRk 1651 "umvælingar- og viðlíkahaldsútreiðslur, bygningar" er allýst soleiðis:

*"Henda konta fevnir bæði um viðlíkahald innan- og uttandura av bygningum og rúmum og um umvælingar- og viðlíkahaldsútreiðslur, ið verða gjørdar av handverkarum (fremmandum), og sum ikki eru í starvi hjá tí almenna. Tað kunnu t.d. vera útreiðslur til handverkarar, tøknikarar, múrarar, snikkarar, timburmenn, málarar, glarmeistarar og elektrikarar. Um tilfarsparturin, t.d. timbur, jarn, metal og máling, av viðlíkahaldsarbeiðinum verður gjørdur upp fyri seg sjálvan, skal hann bókast undir standardkontu 14.*

*Um umvælingin ella viðlíkahaldið eru partar av leiguútreiðslunum, verða hesar útreiðslurnar tiknar við sum húsaleiga saman við leiguútreiðslunum undir kontu 16.10."*

StRk 1654 "umvælingar- og viðlíkahaldsútreiðslur av maskinum, innbúgvi og øðrum útbúnaði" er allýst soleiðis:

*"Henda konta fevnir um viðlíkahald og umvæling av skrivstovulutum, maskinum, innbúgvi og øðrum útbúnaði.*

*Henda konta fevnir bæði um viðlíkahald, umvælingar- og viðlíkahaldsútreiðslur, ið verða gjørdar av handverkarum (fremmandum), og sum ikki eru í starvi hjá tí almenna. Tað kunnu t.d. vera útreiðslur til handverkarar, tøknikarar, snikkarar, timburmenn, málarar, glarmeistarar og elektrikarar. Um tilfarsparturin, t.d. timbur, jarn, metal og máling, av viðlíkahaldsarbeiðinum verður gjørdur upp fyri seg sjálvan, skal hann bókast undir standardkontu 14".*

### 2.4.3 Alment um høvuðskontur til felags viðlíkahald o.a.

Á øllum málsøkjum, uttan undir innlendismálum, eru høvuðskontur markaðar til felags viðlíkahald. Í skrivi til landsstýrismannin í fíggjarmálum í mai 2006 kunnaðu vit um, at nakrar av hesum játtanum í ávísan mun verða brúktar til at keypa vørur, tænastur og útbúnað, ið ikki er at rokna sum viðlíkahald, ella tilfar í sambandi við viðlíkahald. Vit vístu á fleiri dømi m.a.:

Løgmansfyrisitingin

- hurðaskipan
- innbúgv (m.a. mahogni skriviborð)
- kantklippari

Fiskimálaráðið

- flytan av innbúgv, telefon og alarmskipan
- kunngerð í Útvarpi Føroya
- innbúgv (m.a leðursofa, sofaborð)
- vindeygavask
- ruskkoyring
- systemvegg við tilhoyrandi hurðum og glasrútum

Mentamálaráðið

- innbúgv (m.a. skriviborð, sofastólur og -borð, fundarborð og stólar)
- uppvaskimaskina
- trygdarskipan

- 400 fundarstólar við skriviplátu til Føroya Læraraskúla

Tað tykist, sum ivamál eru um, hvørt ein útreiðsla er at rokna sum viðlíkahald, og hvørt talan er um útreiðslur, ið skulu verða bókaðar á stovnin sjálvan ella á høvuðskonturnar til felags viðlíkahald. Nøkur aðalráð hava umrøtt spurningin við Byggiumsiting Landsins, og hava eftirlýst eina reglugerð.

Landsgrannskoðanin heldur tað neyvan vera rætt, at Byggiumsiting Landsins skal gera reglugerð fyri, hvat skal verða konterað sum viðlíkahaldsútreiðslur. Tann uppgávan liggur, sambært roknskaparkunngerðini, hjá Fíggjarmálaráðnum/Gjaldstovuni. Ein møgulig broyting av allýsingini av verandi útreiðslusløgum kann sjálvandi verða gjørd í samráð við Byggiumsiting Landsins, men formliga má Fíggjarmálaráðið/Gjaldstovan standa fyri møguligum broytingum av verandi kontuskipan/konteringarvegleiðing.

Landsgrannskoðanin hevur í frágreiðingum til landsstýrismannin í fíggjarmálum í mai 2006 víst á, at á fleiri málsøkjum tykjast høvuðskonturnar til felags viðlíkahald oftani vera nýttar til annað enn viðlíkahald, og vit reistu spurningin, um ikki hesar útreiðslur áttu at verið hildnar av vanligu rakstrarjáttanunum.

Um høvuðskonturnar til felags viðlíkahald heldur landsstýrismaðurin, at tørvur er á hesari samlijáttan til virksemi, sum er millumting millum vanligan rakstur og løgujáttan. Talan er um virksemi, ið viðvíkur føstu karmunum ella installatiónunum, sum er ov smátt at taka við á løgujáttan, men ov stórt ella kemur ov sjáldan fyri til at taka við undir vanligt virksemi.

Vísandi til frágreiðingarnar hjá Landsgrannskoðanini ásannar landsstýrismaðurin, at tað má haldast at vera alt ov tilvildarligt og ógreitt, hvat verður skrásett undir høvuðskontunum markaðar til felags viðlíkahald. Fleiri av dømunum eru at rokna sum vanligt keyp av útbúnaði ella afturvendandi keyp av tænastum, ið av røttum skuldi verið skrásett undir vanligum rakstri. Tað kundi talað fyri, at tørvur er á einari reglugerð, sum útgreinar, hvat kann verða skrásett sum viðlíkahald. Sambært landsstýrismanninum er tað ein uppgáva hjá Fíggjarmálaráðnum, men hann heldur tað vera týdningarmikið, at Byggiumsiting Landsins tekur lut í hesum arbeiðnum.

### *2.4.4 Søguligt um høvuðskontur til felags viðlíkahald*

Í framhaldi av almennu viðmerkingunum um umrøddu høvuðskontur til felags viðlíkahald kann Landsgrannskoðanin vísa á, at hetta fyribrigdi byrjaði við uppskotinum til fíggjarlógina 1994, har tað í almennu viðmerkingunum m.a. stendur:

> *"Uppskotið til fíggjarløgtingslóg er sett nakað øðrvísi upp enn fyrr. Allar størri viðlíkahaldsútreiðslur eru settar fyri seg, og eru tær tils. 91,5 mió.kr. Landsstýrið heldur tað vera alneyðugt, hóast trongar fíggjarstøður, at halda samfelagsins ognir viðlíka. Játtanir eru settar av til viðlíkahald av vegum, havnum og øðrum, sum Landsverkfrøðingurin umsitur, skúlum, sjúkrahúsum og øðrum almennum bygningum."*

Í fylgiskjølum til uppskot til fíggjarløgtingslóg fyri 1994 stendur m.a.:

**"VIÐLÍKAHALD AV LANDSINS OGNUM:**

*Í samband við viðlíkahald av landsins ognum liggur ábyrgdin í dag hjá leiðsluni av tí stovninum, sum húsast í bygningum. Henda mannagongd hevur ført við sær, serstakliga tey seinastu árini, at viðlíkahald av bygningunum er ofta spart burtur, tá stovnurin skal spara í rakstri, við tí úrsliti, at fleiri bygningar eru í ringum standi.*

*Tá ognirnar ikki verða hildnar viðlíka, verða avleiðingarnar eftir stuttari tíð, at bygningarnir verða niðurslitnir, og tá krevjast stórar íløgur, um bygningarnir skulu gerast nýtiligir aftur.*

*Viðlíkahald av ognunum kann býtast upp soleiðis:*

*1. **"Dagligt viðlíkahald"**, sum fevnir um smærri brek her og nú, sum húsavørðurin sjálvur umvælir. Útreiðslan til tað dagliga viðlíkahaldi, sum húsavørðurin umsitur, eigur at vera ein partur av rakstrinum hjá tí einstaka stovninum.*

*2. **“Skipað viðlíkahald”**, sum fevnir um eina nágreiniliga gjøgnumgongd av ognini, og har arbeiðini verða sett í verk eftir einari viðlíkahalds/umvælingarskipan, og raðfest yvir t.d. 5 ár. Við eini tílíkari skipan skuldu størri óvæntað brek ikki komið fyri. Ein viðlíkahaldsskipan vil vera ein stór hjálp hjá húsavørðinum í sínum dagliga arbeiði.*

*Endamálið við eini viðlíkahaldsskipan er, at Landsstýrið skal tryggja sær, at tær almennu ognirnar verða hildnar í góðum standi, og varðveita síni virðir, og at arbeiðini kunnu samskipast, so tey fíggjarliga og tekniskt geva besta úrslit.*
*Skipanin fevnir m.a. um:*

1. *raðfesting av umvælingum*
2. *raðfesting av útreiðslum til íløguætlan*
3. *fíggjarstýring*
4. *regluligt bygningseftirlit*
5. *tekniskir umvælingarháttir/rætningslinjur*
6. *rakstrarætlan fyri installatiónir o.l., orkusparing*

*Neyðugt verður at broyta mannagondina, tá viðlíkahaldsarbeiðini skulu setast í verk, og kann hetta gerast við at íløgan til tað skipaða viðlíkahaldið verður fíggjað av einum felags rakstrarstaði á fíggjarløgtingslógini, tó verða størri viðlíkahaldsarbeiðir sett á egin rakstrarstøð, og verða rakstrarstøðini umsitin av Landsskrivstovuni.”*

### 2.4.5 Um at spjaða fyrisitingarútreiðslur

Undir “Útbúgving og Gransking”, hevur Landsgrannskoðanin m.a. víst á, at samanumtikið ivast vit í, um játtanin til umsitingar-/fyrisitingarútreiðslur til Mentamálaráðið í nóg stóran mun er gjøgnumskygd. Vísandi til viðmerkingar okkara til høvuðskontu:

- 7.11.1.14. “Viðlíkahald”,
- 7.23.1.07. “Ymsar felagsútreiðslur”,
- 7.23.2.01. “Fólkaskúlin” og
- 7.23.1.31. “Próvtøkur”

verður spurningurin eisini reistur, um játtanin til sjálvt “Mentamálaráðið” í veruleikanum átti at verið einari 4-5 mió.kr. hægri.

Eisini á øðrum málsøkjum er spurningurin um at spjaða fyrisitingarútreiðslur umrøddur, og Landsgrannskoðanin hevur millum ár og dag gjørt fleiri stovnar varugar við, at tað er ikki rætt at blanda umsitingar-/fyrisitingarútreiðslur á einum stovni saman við øðrum játtanum, ið ein stovnur umsitur. Á s. 71 - 72 í frágreiðing okkara í oktober 2005 til løgtingsgrannskoðararnar høvdu vit m.a. hesar viðmerkingar um at spjaða fyrisitingarútreiðslur:

> *T.d. hevur Almannastovan ásannað, at tað ikki er rætt at kontera ávísar konsulentútreiðslur undir avlamisveitingar, ella ávísar ferðaútreiðslur undir forsorgarhjálp, hóast Almannastovan í fyrsta umfari vísti á, at talan var um serútreiðslur, sum vóru avleiddar av umsitingini av ávikavist avlamis- og forsorgarveitingum. – Tílíkar útreiðslur skal Almannastovan halda av rakstrarjáttanini til Almannastovuna.*
>
> *Landsstýrismaðurin hevur eisini í skrivi 17. februar 2005 ásannað, at talan er ikki um útreiðslur, sum koma undir játtanina til forsorgarútreiðslur (hjálparamboð v.m. § 18), tá Hjálpartólamiðstøðin rindar fyri sakkøna hjálp frá Landsverki og Húsalánsgrunninum í sambandi við bústaðarbroytingar hjá viðskiftafólkum, ella rindar flutningsútreiðslur, tá ið hjálpartól skulu verða latin viðskiftafólkum. Talan er í báðum førum um umsitingarútreiðslur á játtanini “Hjálpartólamiðstøðin”, hóast talan er um útreiðslur, sum eru avleiddar av at umsita eina aðra játtan.*
>
> *Vit kunnu eisini nevna, at í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í februar 2002 vísti Landsgrannskoðanin á, at Almanna- og Heilsumálaráðið 31. juli 2000 hevði sent rokningar fyri byggiumsiting til hesar løgukontur, sum Ráðið sjálvt hevði ræðisrættin yvir:*

| | | |
|---|---|---|
| *8.20.3.08.* | *Landssjúkrahúsið, útbygging* | *kr. 120.000* |
| *8.21.6.02.* | *Bústovnar, serforsorg* | *kr. 100.000* |
| *8.21.6.16.* | *Eldrasambýli* | *kr. 100.000* |

*Ráðið greiddi frá, at talan var um løn til tekniska stjóran. Peningurin var bókaður á felags íløgu- og viðlíkahaldskontur, ið tekniski stjórin skuldi taka sær av. Vit vístu á, at tað var ivasamt, um Ráðið kundi útreiðsluføra løn hjá einum starvsfólki í Ráðnum á aðrar játtanir. Á henda hátt ber til at seta starvsfólk, uttan at tað ávirkar nettoútreiðslu- og lønarkarmin. Landsstýrismaðurin boðaði í februar 2002 frá, at hann var samdur við okkum, at mannagongdin var ivasom.*

*Landsgrannskoðanin kann leggja afturat, at útreiðslur, til lýsingar í útlendskum bløðum eftir kommunulæknum og samsýningar til "vikarbureau", verða hildnar á játtanini til kommunulækna-skipan, høvuðskonta 8.20.2.04. Í 2004 eru nýttar 119 t.kr. til lýsingar og 60 t.kr. til konsulenttænastu. Frá januar til september 2005 eru nýttar 74 t.kr. til lýsingar og 398 t.kr. til "formidlingsgebyr" til eitt "rekrutteringsbureau".*

*Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina 2004 "er ikki nóg mikið bert at lýsa í útlendskum læknatíðarritum, neyðugt er at vera meira virkin á annan hátt, t.d. við at keypa sær tænastu frá fyritøkum fyri at fáa loyst trupulleikan. Kostnaðurin av at loysa trupulleikan á hendan hátt er varliga mettur til 200 t.kr. fyri hvønn kommunulækna, og tískil verður neyðugt at hækka játtanina til kommunulæknaskipanina."*

*Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina 2005* "er avtala gjørd við eina fyritøku um eina sonevnda rekrutteringsavtalu um kommunulæknar. Kostnaðurin av at loysa trupulleikan á henda hátt er varliga mettur til 270 t.kr. fyri hvønn kommunulækna."

*Landsgrannskoðanin heldur tað hevði verið skilabetri, um hesar útreiðslur vórðu hildnar av játtanini til Ráðið. Eitt "rekrutteringsbureau" avlastar í ávísan mun starvsfólk í Almanna- og Heilsumálaráðnum, ið hava ábyrgdina av at fyrisita játtanina. Velur Ráðið at fara yvir til eina dýrari fyrisiting, er tað væl náttúrligt, at tað sæst aftur á játtanini til Ráðið.*

*Á sama hátt kundi Almanna- og Heilsumálaráðið lutað ein stóran part av sínum útreiðslum millum eitt ótal av øðrum játtanum, Ráðið varðar av, t.d. lønarútreiðslur í mun til, hvussu nógvir arbeiðstímar hjá hvørjum starvsfólki eru farnir til at fyrisita ymiskar játtanir t.d. heilsuátøk, útbúgving av yngri læknum, landssjúkrahúsið, serviðgerð uttanlands, almannapensión, forsorg-arhjálp, heimarøkt, ymsar studningsjáttanir, løgujáttanir o.s.fr.*

*Nevnast kann eisini, at á løgtingsfíggjarlógini 2005 eru á kontu 8.21.6.01.21. "Stovnsuppihald o.a. í Danmark" játtaðar 50 t.kr., og í fíggjarlógaruppskotinum 2006 er skotið upp at játta 100 t.kr. til at fylgja betur við viðurskiftunum hjá føroyingum, sum búgva á stovni í Danmark. Sambært skrivi 19. oktober 2005 frá landsstýrismanninum til Trivnaðarnevndina hevur* "Heimarøktin og Serforsorgin fingið sáttmála við ein føroying, sum hevur arbeiðsrelateraðar uppgávur í umsitingini í Danmark. Sáttmálin snýr seg um eftirlit við tilboðunum, sum føroyingar fáa á stovnum í Danmark." *Landsgrannskoðanin heldur, at eisini í hesum føri er talan um fyrisitingarútreiðslur, sum skuldu verið játtaðar á høvuðskontu 8.21.6.08. "Meginskrivstovan fyri eldri og brekað".*

*Landsgrannskoðanin heldur ikki roknskapin vera nóg gjøgnumskygdan, um ein stovnur/ráð pilkar út nakrar av sínum útreiðslum, og spjaðir tær meira ella minni tilvildarliga út á aðrar játtanir, ið stovnurin hevur ræði á. Hetta kann eisini verða við til at fjala hækkandi fyrisitingarútreiðslur.*

*Í ávísum førum kann vera skilagott at luta fyrisitingarútreiðslur sundur millum fleiri játtanir, um tað verður gjørt fyri at gera roknskapin rættari og meira gjøgnumskygdan, sæð út frá einum heildarsjónarmiði. Um eitt tílíkt útreiðslubýti skal verða sett í verk, má talan verða um eina væl skipaða og eina væl grundaða og almenna konteringarmannagongd, ið meginregluliga helst skal vera galdandi fyri allar stovnar og øll aðalráð í somu støðu.*

*Vit hava í oktober 2005 biðið Gjaldstovuna um viðmerkingar til tað, sum stendur frammanfyri. Gjaldstovan hevur svarað , at "vit síggja meir og meir, at stovnar, sum umsita stórar játtanir, leggja fyrisitingarútreiðslur undir hesar játtanir. Gjaldstovan heldur ikki, at hetta er beint, tí hetta verður brúkt í samanhangi við, at stovnarnir játtanarliga eru trýstir. Úrslitið er sjálvandi, at tað,*

*sum hildið verður, er fyrisiting, í veruleikanum ikki er rætta myndin av fyrisiting, tá ið samanum kemur. Søguligar samanberingar, sum er tað týdningarmesta politiska stýringaramboðið, verða eisini órógvaðar, tí tað, sum avgerðartakarin vanliga roknar fyri góða stýring ella sparingar, í ávísan mun er bókførsla á eini aðrari høvuðskontu."*"

Í mai 2006 bóðu vit um viðmerkingar frá landsstýrismanninum í fíggjarmálum.

Í svarskrivi sínum í oktober 2006 tekur landsstýrismaðurin undir við, at fyrisitingarútreiðslur í mest møguligan mun eiga at verða savnaðar undir aðalráðunum. Fíggjarmálaráðið mælir til, at umrøddu høvuðskontur og aðrar verða gjøgnumgingnar, fyri at fáa staðfest, í hvønn mun fyrisitingarútreiðslur eru á hesum játtanum, og í hvønn mun hesar útreiðslur eiga at verða fluttar til avvarðandi aðalráð.

### *2.4.6 Um at veita eykajáttan til lógarbundnar útreiðslur*

Í 2005 er ofta komið fyri, at Fíggjarnevndin hevur mælt frá at veita eykajáttan, tá talan er um lógarbundnar útreiðslur. Fíggjarnevndin hevur víst á, at talan er um vanligar framrokningar, ið ikki er rætt at játta, men sum mega verða staðfestar í roknskapinum. Í mai 2006 bóðu vit um viðmerkingar frá landsstýrismanninum í fíggjarmálum.

Í svarskrivi sínum í oktober 2006 vísir landsstýrismaðurin á, at sambært játtanarskipanini skal landsstýrismaður biðja um eykajáttan, um framskrivingar vísa, at nóg mikið ikki varð sett av, tá ið fíggjarlógin varð løgd fram. Tað verður gjørt, fyri at Løgtingið kann taka støðu til, um vøksturin í útreiðslunum stavar frá broyttum fortreytum/metingum í árinum, sum kunnu góðtakast, ella kravið er, at landsstýrismaðurin leggur fyri Løgtingið eitt uppskot um at broyta lóggávuna, soleiðis at sparing kann verða framd fyri at halda játtanina.

Landsstýrismaðurin vísir eisini á, at umbønir um eykajáttan, har peningurin í veruleikanum longu er brúktur, og har landsstýrismaðurin ikki uttan drál er komin við umbøn til eykajáttan, eru í ósamsvari við játtanarreglurnar. Tær eiga ikki at verða játtaðar og skulu ikki verða lagdar fyri Løgtingið, men vera meirútreiðslur at staðfesta í landsroknskapinum. Sostatt er landsstýrismaðurin samdur við sjónarmiðinum hjá Fíggjarnevndini.

### *2.4.7 Alment um "útreiðsluneutralitet" á fíggjarlógini*

Á s. 58 í frágreiðing okkara til løgtingsgrannskoðararnar í oktober 2005 umrøddu vit m.a. spurningin um útreiðsluneutralitet:

> *"Seinastu árini er tað ofta komið fyri, at meira ella minni ítøkiligar løgujáttanir verða settar á fíggjarlógina, og tað tykist, sum fleiri av hesum játtanum síðani verða nýttar til at tryggja "útreiðsluneutralitet", soleiðis at løgujáttanir verða lækkaðar á eykajáttanarlógum fyri at nýta peningin til rakstrarútreiðslur.*
>
> *Í § 43, stk. 1, í stýrisskipanarlógini er ásett, at* "eingin útreiðsla má verða goldin, uttan at heimild er fyri henni í teirri fíggjarlóg, ella aðrari játtanarlóg, ið er í gildi, tá ið ávíst verður." *Lógargreinin ásetir ikki, at væntaðar minniútreiðslur skulu við á eykajáttanarlógir.*
>
> *Í álitinum til uppskotið til eykajáttanarlóg november 2002 førdi minnilutin í Fíggjarnevndini m.a fram,* "at eykajáttanarlógin við meirinntøkum minnir mest um tað, sum á fremmandum máli verður kallað "kreativ" bókføring. Meirinntøkur og ikki nýttar játtanir í einum fíggjarári koma í landskassaroknskapin og telja sostatt við í endaliga úrslitinum fyri viðkomandi fíggjarár. Tí hava vit ásetingina í stýrisskipanarlógini um, at landskassaroknskapurin skal verða lagdur fyri Løgtingið áðrenn 30. juni árið eftir."
>
> *Í álitinum til uppskotið til eykajáttanarlóg desember 2003 førdi sami minnilutin aftur fram, at uppskot meirilutans (um at taka við allar staðfestar minniútreiðslur)* "als einki hevur við heimildarspurningin at gera, men bert tænir endamálinum at pynta upp á úrslitið."
>
> *Landsgrannskoðanin hevur biðið landsstýrismannin (í mentamálum) greiða frá, hvørja støðu hann hevur til hesi sjónarmið. Sambært landsstýrismanninum heldur hann seg ikki vera tann rætta at*

*viðmerkja málið. Landsstýrismaðurin vísir til rundskriv frá Fíggjarmálaráðnum um eykajáttanir, har ásett er, at allar eykajáttanir skulu vera útreiðsluneutralar."*

Í mai 2006 bóðu við landsstýrismannin í fíggjarmálum um hansara sjónarmið. Í svarskrivi sínum í oktober 2006 tekur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum undir við fleiri sjónarmiðum, ið verða førd fram ímóti útreiðsluneutraliteti, herímillum at meirinntøkur av inntøkujáttanum og minniútreiðslur av rakstrarjáttanum í prinsippinum ikki skulu verða tikin við fyri at pynta eina eykajáttan.

Tó heldur landsstýrismaðurin tað vera rætt at hava útreiðsluneutralitet í teimum førum, tá talan er um veruligar umraðfestingar innan rakstur, og tá talan er um umraðfestingar av løgum innan løgukarmin. Her verður útreiðsluneutraliteturin nýttur sum stýringsamboð til at kunna Løgtingið um umraðfestingarætlanir Landsstýrisins. Í nøkrum førum hevur verið loyvt at taka við bæði meir- og minniútreiðslur av lógarbundnum játtanum, mest fyri at tryggja eina ávísa javnvág. Arbeitt hevur verið við at stramma upp reglurnar fyri, hvat kann verða tikið við sum útreiðsluneutralar eykajáttanir, men landsstýrismaðurin ásannar, at ábøtur framvegis kunnu gerast á økinum.

# 3 LØGMANSFYRISITINGIN

## 3.1 Meirnýtsla

### *3.1.1 Løgmansskrivstovan (rakstrarjáttan) 2.11.1.02.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 13.073 t.kr. Meirnýtslan er 122 t.kr.

## 3.2 Minninýtsla

### *3.2.1 Stjórnarskipanarnevnd (rakstrarjáttan) 2.11.1.40.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 1.450 t.kr. Minninýtslan er 668 t.kr.

## 3.3 Aðrar viðmerkingar

### *3.3.1 Viðlíkahald (rakstrarjáttan) 2.11.1.12.*

Høvuðskontan ber heitið "Viðlíkahald", og sambært viðmerkingunum til fíggjarlógaruppskotið er "*endamálið við hesi rakstrarjáttan at røkja landsins ognir í Tinganesi og úti á Reyni*". Mettu viðlíkahaldsútreiðslurnar eru í viðmerkingunum "játtaðar" á standardkontu 16 "Leiga, viðlíkahald og skattur".

Sundurgreiningin á standardkontur í viðmerkingunum til fíggjarlógaruppskotið er ikki bindandi, men eftirsum talan er um eina høvuðskontu, ið er markað til viðlíkahald, má Løgtingið rokna við, at játtanin í høvuðsheitum verður brúkt til viðlíkahald (standardkonta 16), soleiðis sum hetta útreiðsluslag er allýst í konteringarleiðbeiningini til Kontuskipan Landsins, og ikki til beinleiðis keyp av vørum og tænastum (standardkonta 14) ella keyp av útbúnaði (standardkonta 15). Verður tilfarsparturin av viðlíkahaldsarbeiðinum gjørdur upp fyri seg, skal tilfarið verða bókað undir standardkontu 14.

Sambært landsroknskapinum eru m.a. nýttar:

1. kr.174.000 til ADK-hurðaskipan
2. - 28.480 til innbúgv (mahogni skriviborð)
3. - 4.800 til kantklippara.

Útreiðslan til at keypa innbúgv og kantklippara er í 2005 bókað undir standardkontu 15, á StRk 1540 "Innbúgv, maskinur og útbúnaður".

Útreiðslan til hurðaskipan er bókað undir standardkontu 16, StRk 1654 "Umvælingar- og viðlíkahaldsútreiðslur av maskinum, innbúgvi og øðrum útbúnaði".

Landsgrannskoðanin hevur víst á, at umrøddu útreiðslur eru farnar til vørur, tænastur og útbúnað, ið vanliga ikki er at rokna sum viðlíkahald ella tilfar í sambandi við viðlíkahald, soleiðis sum hetta hugtak er allýst í konteringarleiðbeiningini til Kontuskipan Landsins.

Løgmaður heldur hesar útreiðslur vera viðlíkahald, tí:

1. skift verður frá einari vanligari ruko-lyklaskipan til eina ADK-hurðaskipan,
2. talan er um 2 serviðgjørd skrivaraborð til avgreiðsluna,
3. kantklipparin er eitt amboð til viðlíkahald av kantinum á grasplenuni.

Sambært løgmanni hevur Løgmansskrivstovan í fleiri ár nýtt hesa siðvenju, tá tað snýr seg um at bóka á viðlíkahaldskontuna hjá Løgmansskrivstovuni, ein siðvenja, sum Løgmansskrivstovan hevur hildið vera hóskandi til endamálið at varðveita ognir landsins. Tí er Løgmansskrivstovan eitt sindur ivasom um sjónarmiðið hjá Landsgrannskoðanini um, at útreiðslurnar neyvan eru at rokna sum viðlíkahald. Løgmaður mælir til, at Landsgrannskoðanin tekur málið upp við Fíggjarmálaráðið.

Spurningurin um viðlíkahald er meira alment viðgjørdur í frágreiðingini undir fíggjarmálum.

### *3.3.2 Menningarhjálp 2.13.3.01.*

Á fíggjarlógini (høvuðskonta 2.13.3.01.) vóru játtaðar 7.200 t.kr. Minninýtslan er 1.076 t.kr.

Á fíggjarlógini 2005 vóru upprunaliga játtaðar 2.700 t.kr. Við fíggjarnevndarskjali 5. januar 2005 varð játtanin hækkað 3 mió.kr., til hjálp í sambandi við flóðalduna í Indiska havinum.

Á eykajáttanarlógini november 2005-2 varð játtanin hækkað 1,5 mió.kr. til hjálp til Pakistan í sambandi við jarðskjálvtan í oktober 2005.

**Stuðulsveitingar**

Sambært landsroknskapinum er játtanin nýtt til at stuðla hesum tiltøkum:

| | | |
|---|---|---|
| 1. | World Food Programme: Pakistan | 1,8 mió.kr. |
| 2. | Barnabati: Barnaheim í Sri Lanka | 1,7 mió.kr. |
| 3. | Mercy Corps: Flóðaldan | 1,0 mió.kr. |
| 4. | Reyði Krossur | 0,8 mió.kr. |
| 5. | Stuðul til einstakling/Neyðstødd í Rumenia | 0,1 mió.kr. |
| 6. | Sat-7 Media, Kýpros | 0,1 mió.kr. |
| Tilsamans | | 5,5 mió.kr. |

Vit hava biðið løgmann greiða gjøllari frá summum av útreiðslunum:

Ad 3. Mercy Corps: Flóðaldan 1,0 mió.kr.

Í juni 2006 kunnaði løgmaður um, at peningurin hevur verið nýttur til at umvæla og byggja fiskibátar, at útgera bátarnar, umvæla atløgubryggjur og byggja landingarstøðir og fiskimarknaðir uppaftur í Banda Aceh landslutinum í Indonesia.

Ad 5. Stuðul til einstakling/neyðstødd í Rumenia: 0,1 mió.kr.

Í juni 2006 kunnaði løgmaður um, at ein einstaklingur hevur í mong ár sjálvboðin flutt klæðir, skógvar o.a. úr Føroyum til neyðstødd i Rumenia. Landsstýrið helt tað vera rætt at stuðla hesum arbeiði. Peningurin skuldi nýtast til flutningsútreiðslur, brennievni og vegagjøld.

Nógvir einstaklingar og samkomur hava seinnu árini veitt hjálp til neyðstødd í Rumenia. Landsgrannskoðanin ivast tí í, um tað er rætt at stuðla einum ávísum persóni av einari so breitt orðaðari játtan, uttan at hesin stuðulsmøguleiki er kunngjørdur og eisini stendur øðrum í boði. Rumenia verður eftir ætlan limur í ES 1. januar 2007, og landið kann neyvan longur verða at rokna sum menningarland.

Í september 2006 hevur løgmaður kunnað um, at hann ætlar at taka spurningin, um at veita einstaklingum og samkomum stuðul, upp við ráðgevandi nevndina fyri menningarsamstarv, ið er skipað sambært § 4 í Ll. nr. 34 frá 5. mai 2006 “um altjóða menningarsamstarv”.

Ad 6. Sat-7 Media, Kýpros 0,1 mió.kr.

Í juni 2006 kunnaði løgmaður um, at Sat-7 er ein rás, sum gjøgnum fylgisveinasjónvarp í mong ár hevur sent tilfar til kristna minnilutan í Miðeystri. Rásin verður sambært løgmanni stuðlað av flestu átrúnaðarligu bólkum í Miðeystri, og av meira enn 40 átrúnaðarligum felagsskapum og kirkjum í restini av heiminum.

Sambært løgmanni sendir rásin alt samdøgrið, og roynir hon at bera kristna boðskapin og mentanina til vanliga hyggjaran, og soleiðis vera við til at byggja brúgv millum muslimska og kristna heimin.

Sambært løgmanni varð hildið, at *"henda rás ger eitt sera týdningarmikið og langsiktað mennandi arbeiði í arabiska heiminum, og tí varð avgerð tikin um at stuðla hesi rás við 100 t.kr."*

Sambært heimasíðuni hjá SAT-7 sendir rásin á arabiskum máli til 50 lond, herímillum Danmark. Landsgrannskoðanini kunnugt verður rásin stuðlað av kristnum felagsskapum, kirkjum og einstaklingum, men fær ikki menningarhjálp frá ríkisstjórnum ella stovnum undir teimum. Landsgrannskoðanin ivast tí í, um tað kann vera ætlanin við játtanini til menningarhjálp at stuðla einari ávísari átrúnaðarligari sjónvarpsrás.

Í september 2006 hevur løgmaður kunnað um, at hann eisini ætlar at taka hendan spurningin upp við ráðgevandi nevndina fyri menningarsamstarv.

**Rakstrarútreiðslur**

Sambært landsroknskapinum er játtanin eisini nýtt til hesar rakstrarútreiðslur:

| | |
|---|---|
| Løn | 17.240 kr. |
| Ferðing og flutningur, uttanlands | 168.926 kr. |
| Sakkøn hjálp | 323.349 kr. |
| Umboðan o.a. | 9.484 kr. |
| Tilsamans | 518.999 kr. |

Eftir okkara tykki er spurningurin, um ikki nakrar av rakstrarútreiðslunum eru umsitingarútreiðslur, ið áttu at verðið hildnar av játtanini hjá Løgmanskrivstovuni, ið hevur ábyrgdina av at umsita játtanina.

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógaruppskotið, og sambært Ll. nr. 58 frá 12. mai 2005 "um altjóða menningarhjálp", er játtanin ætlað til menningarhjálp, og øll játtanin er í viðmerkingunum sett undir standardkontu 51 "Tilskot til útlandið o.a.". Eftir hesum at døma má Løgtingið roknað við, at játtanin verður brúkt til menningarhjálp og ikki til umsitingarútreiðslur, ið játtanin til Løgmansskrivstovuna er ætlað til.

Er ætlanin, at játtanin til menningarhjálp eisini skal fíggja umsitingina, heilt ella lutvíst, vil Landsgrannskoðanin mæla til í framtíðini at kunna Løgtingið um hesa avgerð.

Í svarskrivi sínum í september 2006 skrivar løgmaður m.a.:

*"Landsgrannskoðanin vísir á, at Løgmansskrivstovan hevur helst bókað ávísar útreiðslur til rakstur í sambandi við menningarhjálp á skeivan hátt. Við støði í viðmerkingum Landsgrannskoðarans fer Løgmansskrivstovan at taka málið upp við Fíggjarmálaráðið til tess at tryggja, at allar útreiðslur verða so rætt bókaðar sum gjørligt.*

*Viðvíkjandi umsitingarligum útreiðslum til menningarhjálp er í síni heild at siga, at í sambandi við, at játtanin til menningarhjálp varð munandi økt, vóru 300.000 kr. settar av til fulltrúa á lønarkontuna hjá Løgmansskrivstovuni at taka sær av økinum burturav. Harafturat varð mett, at vanligu føstu útreiðslurnar sum skrivstovuhald, telefon o.fl. eisini skuldu rindast av hesi høvuðskontu, meðan aðrar útreiðslur, ið meira ella minni beinleiðis eru tengdar at einstøku verkætlanunum ella royndunum, skuldu fara av høvuðskontuni til altjóða menningarsamstarv. Tað er væl møguligt, at onkrar av útreiðslunum, ið eru goldnar av kontuni fyri Menningarsamstarv av røttum heldur áttu at verði bókaðar á rakstrarkontuna hjá Løgmansskrivstovuni.*

*Í arbeiðinum at menna fyrisitingina av menningarhjálp bæði innihaldsliga og ikki minst skipanarliga, verður Løgmansskrivstovan eisini at fáa betur greiðu á, hvussu útreiðslurnar best verða býttar ímillum høvuðskonturnar ávikavist Løgmansskrivstovan og Menningarhjálp. Í hesum arbeiði fer Løgmansskrivstovan eisini at leggja upp fyri viðmerkingum Landsgrannskoðarans".*

### *3.3.3 Menningarhjálp, um lógargrundarlagið*

Landsgrannskoðanin hevur áður víst á fleiri ógreið viðurskifti viðvíkjandi játtanini til menningarhjálp, m.a. í frágreiðing okkara til løgtingsgrannskoðararnar 11. mars 2005:

> *“Tað einasta, ið er ásett um endamálið við játtanini, er ein regla í viðmerkingunum til fíggjarlógaruppskotið um, at “játtanin er ætlað til tiltøk, sum kunnu gagna menningarlondum, ella vera til hjálp í øðrum londum, um okkurt óvanligt er á vási”.*
>
> *Landsgrannskoðanin hevur víst á, at endamál, stuðulstreytir, málsviðgerð o.a. kundu verið væl betur lýst, og hevur mælt til at bøta um viðurskiftini.*
>
> *Í apríl 2004 legði løgmaður frágreiðing um altjóða menningarpolitikk Føroya fyri Løgtingið til aðalorðaskiftis. Løgmaður vónaði, at tað fór at skapa nýggjar karmar um, hvussu fyrisitingin í framtíðini kemur at leggja slíkt arbeiði best til rættis.*
>
> *4. mars 2005 hevur løgmaður lagt fram uppskot til løgtingslóg um altjóða menningarhjálp (Lm. nr. 79/2004).”*

Vísandi til Lm. nr. 79/2004 legði løgmaður í mars 2005 fyri Tingið soljóðandi uppskot til løgtingslóg um altjóða menningarhjálp:

> *“§ 1. Til tess at fremja samfelagsliga, heruppií fólkaræðisliga, búskaparliga og mentanarliga menning í menningarlondum, verður landsstýrismanninum heimilað at veita altjóða menningarhjálp.*
>
> *Stk. 2. Landsstýrismaðurin kann somuleiðis veita bráðfeingisneyðhjálp til kreppurakt lond.*
>
> *§ 2. Landsstýrismaðurin kann áseta í kunngerð nærri reglur og treytir fyri stuðulsveitingum, ið verða latnar eftir § 1.*
>
> *§ 3. Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd og fer úr gildi 31. desember 2005.”*

Málið varð beint í Uttanlandsnevndina. Meirilutin helt talan vera um leysar endamálsorðingar, og helt heldur ikki uppskotið vera nakað framstig í mun til verandi viðmerkingar í fíggjarlógini, *“hvat kørmunum fyri at veita menningar- og neyðhjálp viðvíkur”*.

Meirilutin helt, at nærri treytir áttu at verið ásettar við lóg, men vísti eisini til arbeiðsbólk, ið var í ferð við at gera uppskot til játtanarlóg, ið m.a. skal rúma almennar reglur fyri stuðulsveitingum.

Minnilutin helt tað vera spell, at *“fyrireikandi arbeiðið er so illa frágingið. Minnilutin heldur tí, at rættast hevði verið, um Landsstýrið tók uppskotið aftur fyri at leggja eitt nýtt og fullfíggjað uppskot um menningarhjálp fyri Løgtingið á ólavsøku”*.

Málið endaði við, at eitt broytingaruppskot frá meirilutanum, um at geva lógini tíðaravmarkað gildi til árslok 2005, varð samtykt.

Landsgrannskoðanini kunnugt, hevur løgmaður ikki í kunngerð ásett neyvari reglur og treytir fyri stuðulsveitingum.

Vísandi til Lm. nr. 60/2005 legði løgmaður í februar 2006 fyri Tingið uppskot til løgtingslóg um altjóða menningarsamstarv. Uttanlandsnevndin var eisini ónøgd við hetta lógaruppskotið og skrivaði m.a. í áliti sínum:

> *“Við tilvísing til viðgerðina av Lm. nr. 79 í seinastu tingsetu eftirlýsir nevndin framhaldandi, at nærri treytir verða ásettar við lóg. Lógaruppskotið í løgtingsmáli nr. 79 varð samtykt við tíðaravmarkaðum gildi. Sum fyrra uppskotið leggur fyriliggjandi uppskot eisini upp til, at heimildirnar at áseta nærri reglur verða lagdar til landsstýrismannin, meðan ásetingarnar í sjálvum lógaruppskotinum bert innihalda leysar endamálsorðingar. Sambært viðmerkingunum er grundgevingin tann, at so stutt er fráliðið, síðani farið var undir arbeiðið við hesum øki.”*

Eitt broytingaruppskot, um at geva lógini tíðaravmarkað gildi fram til 30. juli 2007, varð samtykt.

Spurdur, hevur løgmaður í september 2006 kunnað um, at hann ætlar at leggja fram eitt meira fullfíggjað lógaruppskot fyri Løgtingið. Hinvegin vísir løgmaður á, at hann neyvan kann tryggja, at tað verður heilt lýtaleyst, *“tí framvegis hava vit lítlar og ongar royndir í at fremja altjóða menningarhjálp í verki. Løgmaður vónar at kunna leggja eina lóg fram, sum kann gerast ein hampiliga støðugur karmur fyri fyrisitingina at arbeiða innanfyri, soleiðis at fyrisitingin eisini kann fáa tíð og tær royndir, ið skulu til, til tess at orða hóskandi kunngerðir á økinum.”*

### *3.3.4 Alment um studningsumsiting*

Uppskotið til játtanarlóg, *"ið m.a. skal rúma almennar reglur fyri stuðulsveitingum"*, sum meirilutin í Uttanlandsnevndini sipaði til í Lm. nr. 79/2004, varð lagt fram av løgtingsformanninum 3. mars 2006 (Lm. nr. 81/2005). Í kapittul 5 í lógaruppskotinum var ásett, at landsstýrismaðurin í fíggjarmálum fær heimild at áseta gjøllari reglur, ið skulu tryggja eina skynsama stuðulsfyrisiting. Uppskotið varð beint í serliga § 25 nevnd. Uppskotið kom ikki aftur úr nevnd, og fall tí burtur.

Í frágreiðing okkara í mars 2005 umrøddu vit á s. 60 - 61 studningslóggávu og studningsumsiting. Har stendur m.a., at løgtingsgrannskoðararnir áður hava mælt til, at Løgmansskrivstovan átók sær ein virknan og samskipandi leiklut í arbeiðinum at bøta um verandi studningslóggávu. Í juli 2006 spurdu vit, hvørji stig løgmaður ætlaði at taka.

Í september 2006 hevur løgmaður sagt seg harmast, at hóskandi reglur ikki enn eru settar í gildi um játtanarviðurskifti, serliga tí, at nøktandi reglur um studning og studningsumsiting hava manglað í fleiri ár. Løgmaður vísir á, at málið um at seta í gildi nýggja lóg um játtanarreglur liggur í Løgtinginum, og tað má tí ganga sína gongd, áðrenn onnur stig verða tikin av Landsstýrinum. Málið um lógaruppskotið um játtanarreglur er gjøllari viðgjørt í frágreiðingini undir fíggjarmálum, undir yvirskriftini "Ivamál um játtanarskipanina."

Til kunningar hava vit niðanfyri endurgivið tað, sum vit skrivaðu um studningslóggávu og studningsumsiting á s. 60-61 í frágreiðing okkara í mars 2005:

> "Vit hava í fleiri frágreiðingum víst á, at tørvur er á at bøta um studningsgrundarlagið/-lóggávuna og studningsumsitingina, so at endamál og treytir o.a. verða greiðari, og fyri at sleppa undan dupultarbeiði. Nógvar studningsjáttanir verða bert lýstar við fáum orðum í viðmerkingum til fíggjarlógina. Stovnar/feløg kunnu fáa studning til somu endamál frá fleiri studningsjáttanum, og í ávísan mun er talan um fleirfaldaða málsviðgerð av somu umsóknum til sama endamál. Umsitingin av studningi er fløkt, óskipað og merkt av tvørrandi heimild at áseta greið og einsháttað krøv til málsviðgerð og útgjalding.
>
> Viðvíkjandi studningsskipanum, sum venda sær til ein breiðan umsøkjaraskara, hava vit eisini víst á, at tað er góður lóggávusiður, at neyvari reglur verða ásettar í serstakari lóg.
>
> Í uppskoti til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin fyri fíggjarárið 2000 (Lm. nr. 85/2001) samtykti Løgtingið 12. mars 2002 at mæla til, at Løgmansskrivstovan átók sær ein virknan og samskipandi leiklut í arbeiðinum at bøta um verandi studningslóggávu.
>
> Í desember 2002 tók løgmaður stig til, at ein bólkur við starvsfólki úr miðfyrisitingini skuldi verða settur at arbeiða við málinum. Varð tað hildið at vera skilagott, skuldi bólkurin evna til eina almenna lóg um studning, sum skal áseta reglur fyri og krøv um roknskap, eftirlit, grannskoðan o.a. Harafturat skuldi bólkurin gera uppskot til eina skipan, sum skal tryggja, at verandi og nýggj studningslóggáva og viðmerkingar til studningsjáttanir á fíggjarlógini verða á fullgóðum støði.
>
> Í januar 2003 heitti løgmaður á Fíggjarmálaráðið um at taka á seg ábyrgdina og leiðsluna av hesi verkætlan og at samskipa hana við arbeiðið hjá Fíggjarmálaráðnum at broyta játtanarskipanina.
>
> Í november 2003 ásannaði løgmaður, at Fíggjarmálaráðið hevði ikki gjørt tað, ið løgmaður hevði biðið um í brævi sínum 21. januar 2003. Løgmaður vísti til skriv 28. oktober 2003, har landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevði boðað frá, at Fíggjarmálaráðið hevði arbeitt við øðrum tíðarkrevjandi verkætlanum so sum at endurskoða játtanarskipanina og gera nýggja budgetskipan. Í november 2004 kunnaði løgmaður um, at Fíggjarmálaráðið hevði gjørt uppskot til rundskriv um játtanarreglur, har reglur fyri studningsumsiting vóru tiknar við, og har varð mælt til at gera serstakar studningslógir, tá ið tað snúði seg um munandi upphæddir ella varandi studningsskipanir til breiðan móttakaraskara. Umsiting Løgtingsins boðaði frá, at hon kundi ikki taka undir við fleiri av ásetingunum í rundskrivinum, og hon var av tí áskoðan, at rættast var at gera eina játtanarlóg.
>
> Í mars 2005 hevur Løgtingið samtykt uppskot til samtyktar frá Fíggjarnevndini (Lm. nr. 38/2004) har Løgtingið tekur undir við, at formansskapur Løgtingsins setir ein serkønan arbeiðsbólk at fyrireika uppskot til eina játtanarlóg, ið skal áseta treytir og mannagongdir fyri játtanum."

# 4 FISKIVINNA

## 4.1 Meirnýtsla

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Meirnýtsla |
|---|---|---|---|
| Tilbúgving (rakstrarjáttan) | 1.432 | 1.597 | 165 |
| Limagjald í altjóða felagsskapum | 1.200 | 1.341 | 141 |
| Gjald til rækjuflotan (lógarbundin játtan) | 7.700 | 8.456 | 756 |
| Trygdarmiðstøðin (rakstrarjáttan) | 2.001 | 2.087 | 86 |

### *4.1.1 Tilbúgving (rakstrarjáttan) 5.11.1.43.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 1.432 t.kr. Meirnýtslan er 165 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum vóru inntøkur fyri tilbúgvingarráðstevnu, 117 t.kr., av misgáum ikki bókaðar í 2005. Harafturat varð neyðugt í skundi at keypa eina nýggja bjargingarpumpu ultimo 2005, tí tyrlan kundi ikki taka verandi bjargingarpumpu við, tá hon skuldi út at bjarga báti við leka.

### *4.1.2 Limagjald í altjóða felagsskapum 5.34.1.07.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 1.200 t.kr. Meirnýtslan er 141 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum varð limagjaldið til ICES fyri bæði 2004 og 2005 goldið í 2005.

### *4.1.3 Gjald til rækjuflotan (lógarbundin játtan) 5.34.4.14.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 7.700 t.kr. Meirnýtslan er 756 t.kr.

Á fíggjarlógini 2005 var upprunaliga eingin peningur játtaður. Á eykajáttanarlógini september 2005 vórðu játtaðar 7,7 mió.kr., vísandi til at Løgtingið 14. mai 2005 samtykti Ll. nr. 73/2005 “um endurgjald til rækjuflotan”.

Sambært § 1 í lógini *“verður landsstýrismanninum heimilað at veita rækjuskipum endurgjald fyri eykaútreiðslur og mista fiskitíð. Heimildin verður veitt, tí rækjuskipini stríðast við høgar oljuprísir, lágar rækjuprísir, stongdar havnir í Kanada o.a.”*

Sambært landsstýrismanninum blivu dagarnir fleiri, enn roknað var við, tá ið kunngerðin varð gjørd og gjaldið ásett. Roknað var við í mesta lagi 963 døgum, men úrslitið gjørdist næstan 100 dagar fleiri, ella 1057 dagar. Munurin stavar m.a. frá, at Fiskiveiðieftirlitið hevði roknað við fiskidøgum, meðan stuðulin verður goldin frá mynstringardegi til heimkomudag.

Sambært Búskaparskipan landsins hava hesi reiðaravirki fingið stuðul í 2005 sambært lógini:

| **Reiðaravirki** | **Skip** | **kr.** |
|---|---|---|
| P/F Líðin | Artic Viking | 432.000 |
| P/F Havborg | Havborg | 2.000.000 |
| P/F Kongshavnar Útgerðarfelag | Napoleon | 1.840.000 |
| P/F Krúnborg | Sólborg | 1.640.000 |
| P/F 14. juli 2004 | Kappin | 1.440.000 |
| P/F Samvinnufelagið í konkurs | Høgifossur | 1.104.000 |
| **Tilsamans** | | **8.456.000** |

Á fíggjarlógini 2006 eru játtaðar 3,5 mió.kr. Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina *"liggja fleiri rækjuskip í løtuni, men roknað verður við, at onkur teirra fara aftur til fiskiskap."*

30. september 2006 eru rindaðar 3,1 mió.kr.:

| **Reiðaravirki** | **Skip** | **t.kr.** |
|---|---|---|
| P/F Líðin | Artic Viking | 1.624 |
| P/F Havborg | Havborg | 1.520 |
| **Tilsamans** | | **3.144** |

Sambært § 3, stk. 2, ásetir landsstýrismaðurin í kunngerð reglur fyri endurgjaldinum. Tær reglur hevur landsstýrismaðurin sett í K. nr. 104 frá 14. september 2005 "um gjald til rækjuflotan":

*§ 1. Rætt til gjald hevur eigari av skipi við veiðiloyvi til rækjufiskiskap, sum er í vinnu undir føroyskum flaggi 1. januar 2005 til 31. desember 2006.*

*Stk. 2. Gjaldið fyri tey í stk. 1 nevndu skip kann í mesta lagi vera 2 mió.kr. um árið, og samlaða gjaldið fyri øll skipini kann í mesta lagi vera 10 mió.kr. fyri hvørt árið.*

*Stk. 3. At skipið er í vinnu merkir, at skipið í tíðarskeiðinum 1. januar 2005 til 31. desember 2006 hevur verið til rækjufiskiskap undir føroyskum flaggi.*

*Stk. 4. Túrur roknast at byrja, tá mynstrað verður, og lokin tá avmynstrað verður. Gjald verður ikki veitt fyri dagar, sum skipið liggur í havn eftir loknan túr, hóast avmynstrað ikki er.*

*§ 2. Umsóknir skulu sendast Lønjavningarstovuni í Fiskimálaráðnum. Við umsóknini skal fylgja uppgerð yvir nýtta dagatalið, sum skal skjalprógvast við avriti av skipsdagbókini.*

*§ 3. Gjaldið er ásett til kr. 8.000,- fyri hvønn dag, skipið er til rækjufiskiskap. Gjaldið verður veitt eftir loknan túr.*

Spurdur, hvørji ítøkilig úrslit/eyðkenni kunnu verða nýtt til at eftirmeta, um endamálið við studninginum er rokkið, svaraði landsstýrismaðurin í september 2006:

*"Enn er ov tíðliga at gera endaliga niðurstøðu um endamálið við gjaldinum er rokkið. Lógin fer úr gildi 31. desember 2006 og eftir tað fara eftirmetingar av tíðini, lógin hevur verið í gildi, at verða gjørdar. Tað kann tó leggjast afturat, at trý rækjuskip fara at vera í vinnu í 2006. Vónandi fer fiskiskapur teirra at vera so mikið góður, at skipini kunnu vera við til at verja okkara rækjurættindi á fjarleiðum. Hugsað verður serliga um okkara rættindi á 3L. Tað var eitt av høvuðsendamálunum við lógini".*

### *4.1.4 Trygdarmiðstøðin (rakstrarjáttan) 5.35.1.03.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 2.001 t.kr. Meirnýtslan er 86 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum stavar meirútreiðslan frá øktum virksemi og frá einum motorhavarí.

## 4.2 Minninýtsla

### *4.2.1 Inntøkutrygd hjá fiskimonnum (lógarbundin játtan) 5.34.4.01.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 33 mió.kr. Minninýtslan er 5,8 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum fylgir inntøkutrygdin hjá fiskimonnum faktorum, sum Fiskimálaráðið ikki hevur ávirkan á, og sum er trupul at meta um, m.a. fiskaprísir. Tískil kunnu stór frávik millum játtan og nýtslu koma fyri.

### 4.2.2 Fiskivinnumenning á landi 5.34.4.16.

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 1.350 t.kr. Minninýtslan er 669 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum játtaði Fiskimálaráðið pening til eina verkætlan, sum, tá avtornaði, ikki varð framd.

### 4.2.3 Útlán 5.34.5.01

t.kr.

| 5.34.5. Lán, effektiv veðhald o.t. | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 01. Útlán, inntøkur | - | -25.247 | - 25.247 |
| 01. Útlán, útreiðslur | - | 19.584 | 19.584 |

Á fíggjarlógini var eingin peningur játtaður til útlán. Sambært landsroknskapinum eru inntøkurnar 25.247 t.kr. og útreiðslurnar 19.584 t.kr. Sostatt er talan um stór frávik.

Av inntøkunum, 25.247 t.kr., eru um:

- 5,6 mió.kr. inngjaldingar frá skuldarum,
- 19,6 mió.kr. av- og niðurskriving av lánum, umframt tøkniligar broytingar og umleggingar.

Av útreiðslunum, 19.584 t.kr., eru um:

- 8,2 mió.kr. niðurskrivingar av lánum og 2,9 mió.kr. avskrivingar,
- 8,5 mió.kr. umlegging av lánum.

Fyri at lýsa, hvussu bókingarmannagongdin er, vil Landsgrannskoðanin vísa til síðu 324 í landsroknskapinum 2005, har tað undir "formlig viðurskifti" stendur, at útlán verða viðgjørd í rakstrarroknskapinum eftir hesum meginreglum:

- tá ið lán verða veitt (útgoldin), verða tey skrásett sum útreiðsla í rakstrarroknskapinum, á standardkontu 82.
- avsett verður ikki móti tapi á rakstrarroknskapinum, tí lánið er longu tikið við sum útreiðsla, tá ið goldið varð út.
- verða lán síðani avskrivað, verður avskrivingin bókað bæði sum inntøka og útreiðsla í rakstrarroknskapinum við somu upphædd, ávikavist á standardkontu 52/53 og 86.

Í juni 2005 vísti landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum á, at Fiskimálaráðið formliga varðar av hesum kontum, men at Toll- og Skattstovan og Realurin umsita tær. Fyri at gera eina neyvari meting av játtanunum í framtíðini hevði Fiskimálaráðið tikið upp samband við partarnar, ið umsita konturnar.

Í september 2006 kunnaði landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum um, at Fiskimálaráðið síðani juli 2006 hevði verið í samband við Fíggjarmálaráðið um, hvørjar kontur Fiskimálaráðið skuldi umsita, og hvørjar Fíggjarmálaráðið skuldi umsita, tó uttan at nøkur politisk avtala varð gjørd.

Landstýrismaðurin í fiskivinnumálum heldur, at Fiskimálaráðið skal umsita tær kontur, sum eru grundaðar á lógir, sum eru í gildi, meðan Fíggjarmálaráðið eigur at umsita kontur, har eingin galdandi lóg er á økinum – tað verið seg innheinting av skuld o.s.fr.

Í oktober 2006 hevur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum kunnað um, at ongar ætlanir eru hjá Fíggjarmálaráðnum um at yvirtaka umsitingina av nøkrum av hesum undirkontum. Fíggjarmálaráðið er av tí fatan, at fyri tað um Toll- og Skattstovu Føroya stendur fyri innheintingini, so hevur tað ikki við sær, at tað er lættari hjá Fíggjarmálaráðnum enn øðrum myndugleika at meta um gongdina á hesum undirkontum. Tað avgerandi er, hvør umsitur

ábyrgdarøkið; og tað er landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum. Tað ber til at fáa upplýsingar t.d. frá innheintingini, so til ber at meta um gongdina.

## Gjaldførislán

Í 2005 er bókað:

- 2,4 mió.kr. sum rentuinntøkur
- 8,5 mió.kr. sum útlán
- 11,7 mió.kr. sum afturgjaldan av útlánum o.a.

Í september 2006 greiddi landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum frá, at tað er serliga undirkonta 05. "Gjaldførislán" smb. Ll. nr. 76 frá 5. november 1998 "um umsiting av gjaldførislánum", sum er trupul at leggja fíggjarætlan fyri.

Í viðmerkingunum til uppskotið til Ll. nr. 76/1998 er eitt yvirlit yvir gongdina viðvíkjandi gjaldførislánum, har tað m.a. sæst, at Landsstýrið yvir 15 ár hevur mist góðar 14 mió.kr. og fingið í rentu slakar 37 mió.kr.

| | **Tíðarskeiðið 1985-2000** |
|---|---:|
| Landsstýrið útgoldið lán | 97.818.000,00 |
| Játtað 1998-2000 | 6.000.000,00 |
| | 103.818.000,00 |
| Afturgoldið í samband við sølu av skipum | 30.142.238,72 |
| Mist í samband við tvingsilssølur | 14.119.761,28 |
| Verandi lán við veð í føroyskum skipum | 53.556.000,00 |
| Renta goldin til Føroya Landsstýri | 36.735.834,16 |
| **Heimildin til endurútlán snýr seg um** | **59.556.000,00** |

Sambært landsstýrismanninum er Fiskimálaráðið av teirri fatan, at hesar um 60 mió.kr. eru stovnsfæ, sum er goldið úr landskassanum, og at tað ikki skal verða bókað, hvørja ferð Realkredittstovnurin veitir lán, ella tá lán verða afturgoldin. Tískil heldur Fiskimálaráðið, at tað einans eru rentuinntøkurnar av stovnsfænum, sum skulu bókast, og Fiskimálaráðið fer í framtíðini einans at seta mettu rentuinntøkurnar í fíggjarlógaruppskotið.

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í mars 2000 umrøddi Landsgrannskoðanin m.a. umsitingina av gjaldførislánum:

> *"Sambært § 1 í Ll. nr. 76 frá 5. november 1998, um umsiting av gjaldførislánum, skal avtala gerast millum landsstýrismannin og Føroya Realkredittstovn um "framhaldandi umsiting av gjaldførislánum, sum eru veitt ella játtað sambært Ll. nr. 24 frá 1. juni 1978 um endurnýggjan av fiskiskipaflotanum, sum m.a. broytt við Ll. nr. 35 frá 3. mai 1984". Í § 2 er ásett, at í tann mun likviditetslán verða goldin aftur, fær landsstýrismaðurin heimild at avtala við Føroya Realkredittstovn, at "frígjørda" lánsupphæddin kann lænast útaftur."*

Landsgrannskoðanin heldur sostatt, at tað neyvan kann vera rætt, at bert rentuinntøkurnar skulu verða tiknar við á fíggjarlógina, og vit bóðu landsstýrismannin í fíggjarmálum um hansara sjónarmið.

Í oktober 2006 hevur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum kunnað um, at løgliga og roknskaparliga er staðfest, at upphæddin til endurútlán av gjaldførislánum er gjaldføri landskassans. Roknskaparliga hava broytingar í útlánsupphæddini verið skrásettar sum inntøkur og útreiðslur í fíggjarárinum. Tískil er fatanin hjá Fiskimálaráðnum ikki røtt. Fíggjarmálaráðið vil

tó viðmerkja, at henda roknskaparliga praksis ger, at tað kunnu verða stór sveiggj í gongdini á játtanini, eins og fíggjarliga heimildin hjá Realinum kann vera ógreið.

Samanumtikið mælir Fíggjarmálaráðið til, í sambandi við játtanarmeting til fíggjarlógaruppskotið, at bert mettu rentuinntøkurnar verða tiknar við á játtanina, til ein skilabetri loysn verður funnin fyri skipanina við gjaldførislánunum. Tað verður væntandi gjørt, tá ið landsstýrismaðurin í fíggjarmálum og Realurin fyri 1. mai 2009 skulu samráðast um, hvørt skipanin skal halda fram

Sambært fundarfrágreiðing 22. mars 2000 millum Realin og Fíggjarmálaráðið *"varð á fundinum staðfest, at gjaldføri, sum Realurin skal umsita, er ein partur av gjaldføri landsins. Og avtalað var, at Realurin skuldi fáa í lag ein fund við landsbankastjóran, um hvussu farast skal fram við gjaldførinum í framtíðini. Fíggjarmálastýrið fekk frá Realinum uppskot til løgtingslóg um broytingar í løgtingslóg nr. 76 frá 5. november 1998 um umsiting av gjaldførislánum, og uppskot til broyting í avtaluni at leggja fyri politisku myndugleikarnar við tí fyri eyga, at um meirluti fæst fyri at leggja uppskotið fyri Tingið, at gera hetta í ólavsøkutingsetuni."*

Landsgrannskoðanini kunnugt varð einki lógaruppskot lagt fyri Tingið tá, og vit heittu tí á Fíggjarmálaráðið um at greiða frá, hvat síðani var hent í málinum.

Í oktober 2006 hevur landsstýrismaðurin í fíggjarmálum kunnað um, at lógin er ikki broytt, og at tað heldur ikki er ætlanin. Avtalan millum landsstýrismannin og Realin um umsiting av gjaldførislánunum varð undirskrivað 24. januar 2002, og er bert smávegis broytt 17. februar 2004.

### *4.2.4 Effektivar veðhaldsútreiðslur 5.34.5.07.*

t.kr.

| 5.34.5. Lán, effektiv veðhald o.t. | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 07. Effektivar veðhaldsútreiðslur, inntøkur | 6.000 | 5.348 | - 652 |
| 07. Effektivar veðhaldsútreiðslur, útreiðslur | 1.000 | 4.709 | 3.709 |

Á fíggjarlógini var ein inntøkujáttan 6.000 t.kr. og ein útreiðslujáttan 1.000 t.kr.

Vísandi til roknskapin eru inntøkurnar 5.348 t.kr. og útreiðslurnar 4.709 t.kr. Av samlaðu inntøkuni eru umleið 361 t.kr. inngjaldingar frá skuldarum.

Landsstýrismaðurin vísir til Fíggjarmálaráðið viðvíkjandi meir- og minninýtslu á hesari kontu.

Landsgrannskoðanin hevur víst á, at Fiskimálaráðið formliga varðar av hesari kontu, og er tað tí Fiskimálaráðið, ið eigur at geva frágreiðing um meir- og minninýtslu.

### *4.2.5 Sjóvinnufyrisitingin (Skipaskrásetingin) (rakstrarjáttan) 5.35.1.01.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 542 t.kr. Minninýtslan er 458 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum kom ein fulltrúi í farloyvi ikki aftur í starv, sum væntað, og hevði tað við sær lægri lønarkostnað. Inntøkurnar vóru eisini hægri, enn væntað, millum annað tí fleiri FAS skrásetingar vóru.

## 4.3 <u>Aðrar viðmerkingar</u>

### *4.3.1 Viðlíkahald (rakstrarjáttan) 5.11.1.05.*

Høvuðskontan ber heitið "Viðlíkahald", og sambært viðmerkingunum til fíggjarlógaruppskotið er *"játtanin til at røkja og tillaga bygningarnar, sum Fiskimálaráðið nýtir"*. Mettu útreiðslurnar eru sambært viðmerkingunum "játtaðar" á standardkontu 14 "Keyp av vørum og tænastum", og ikki á standardkontu 16 "Leiga, viðlíkahald og skattir", sum vanligt er fyri aðrar høvuðskontur á fíggjarlógini, ið bera heitið "Viðlíkahald".

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 600 t.kr. Minninýtslan er 17 t.kr.

Sambært landsroknskapinum eru í 2005 nýttar kr. 156.929 í sambandi við, at Fiskimálaráðið flutti í onnur høli:

- kr. 139.260 til at flyta innbúgv
- kr. 9.888 til at flyta alarm
- kr. 6.119 til at flyta telefon
- kr. 1.662 til kunngerðir í Útvarpi Føroya

Harafturat eru nýttar kr. 185.974 til innbúgv o.a.:

- kr. 67.350 til at keypa innbúgv (leðursofu, sofaborð o.l.)
- kr. 60.280 til at konvertera totalview og til at seta upp tíðarskráseting
- kr. 28.898 til vindeygavask
- kr. 26.600 til at keypa ein projector
- kr. 2.844 til at keypa eina lampu og stólaundirlag

Í 2006 eru útreiðslur til m.a. vindeygavask, ruskkoyring, systemvegg við tilhoyrandi hurðum og glasrútum bókaðar á hesa høvuðskontu.

Sundurgreiningin á standardkontur í viðmerkingunum til fíggjarlógaruppskotið er ikki bindandi, men eftirsum talan er um eina høvuðskontu, ið er markað til viðlíkahald, má Løgtingið rokna við, at játtanin í høvuðsheitinum verður brúkt til viðlíkahald.

Útreiðslurnar at flyta innbúgv o.a. í onnur høli, vindeygavask, keyp av innbúgvi o.t. eru vørur, tænastur og útbúnaður, ið vanliga ikki er at rokna sum viðlíkahald ella tilfar í sambandi við viðlíkahald, soleiðis sum hetta hugtak er allýst í konteringarleiðbeiningini til Kontuskipan Landsins.

Sambært landsstýrismanninum vóru útreiðslurnar avleiddar av, at flutt varð í nýggj hølir, og neyðugt var at tillaga bygningin til endamálið.

Landsgrannskoðanin ivast í, um Løgtingið hevur ætlað, at ein høvuðskonta, markað til viðlíkahald, skal verða brúkt til umrøddu útreiðslur. Eisini á øðrum málsøkjum eru nógv ivamál, hvørt ein útreiðsla er viðlíkahald, og nær talan er um útreiðslur, ið skulu verða bókaðar á stovnin sjálvan ella sum felags viðlíkahald. Landsgrannskoðanin hevur mælt til, at Fíggjarmálaráðið tryggjar, at sama mannagongd verður nýtt á øllum málsøkjum, tá ræður um tílíkar játtanir til viðlíkahald.

Spurningurin um viðlíkahald er meira alment viðgjørdur undir fíggjarmálum.

# 5 VINNUMÁL

## 5.1 Meirnýtsla

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | *Frávik* |
|---|---|---|---|
| Søla av seismiskum kanningarúrslitum | -150 | -89 | *61* |
| El-nevndin (rakstrarjáttan) | 200 | 239 | *39* |
| Lánsafturgjald | -2.500 | -1.762 | *738* |
| Partabrøv, ymisk viðurskifti | -3.000 | - | *3.000* |
| Postverk Føroya (løgujáttan) | -36.000 | - | *36.000* |
| Kringvarpssendistøðir (rakstrarjáttan) | 4.000 | 4.598 | *598* |
| Postverk Føroya, eftirlønir (lógarbundin játtan) | 2.000 | 2.463 | *463* |

### *5.1.1 Søla av seismiskum kanningarúrslitum 6.32.1.04.*

Á fíggjarlógini var ein inntøkujáttan 150 t.kr. Minniinntøkan er 61 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum ber ikki til frammanundan neyvt at siga, hvussu stór sølan verður.

### *5.1.2 El-nevndin (rakstrarjáttan) 6.37.1.10.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 200 t.kr. Meirnýtslan er 39 t.kr.

El-nevndin tók í 2005 lut á fundum hjá norðurlendska felagskapinum NSS, undir Norðurlandaráðnum. Sambært landsstýrismanninum varð roknað við, at Innlendismálaráðið fór at veita endurgjald av játtanini til Norðurlanda samstarv fyri meginpartin av útreiðslunum. Innlendismálaráðið helt ikki, at endurgjald kundi verða veitt til slík endamál. Endurgjald verður tó veitt frá 2006 at rokna.

### *5.1.3 Lánsafturgjald 6.37.6.01.*

Á fíggjarlógini var ein inntøkujáttan 2.500 t.kr. Minniinntøkan er 738 t.kr.

Talan er um á leið sama frávik sum í 2004. Vinnumálaráðið hevur áður greitt frá, at Gjaldstovan umsitur játtanina, og at talan er um lán frá grunnum, sum eru niðurlagdir.

### *5.1.4 Partabrøv, ymisk viðurskifti 6.37.6.11.*

Á fíggjarlógini var ein inntøkujáttan 3 mió.kr., men ongar inntøkur eru í landsroknskapinum.

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógaruppskotið 2005 var ætlanin at selja partapeningin, sum landið eigur í samtakinum Skipafelagið Føroyar.

Sambært landsstýrismanninum kom onki nøktandi tilboð í mun til innaravirði felagsins.

### *5.1.5 Postverk Føroya (løgujáttan) 6.38.3.03.*

Á fíggjarlógini var ein inntøkujáttan 36 mió.kr., men ongar inntøkur eru í landsroknskapinum.

Talan er um ætlaða søluprísin fyri posthúsið á Argjum, sum á fíggjarlógini 2004 og aftur í 2005 var mettur til 36 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum í vinnumálum var ætlanin at bjóða ognina alment til sølu. Fíggjarmálaráðið vísti áhuga fyri at nýta bygningin til at hýsa Hagstovu Føroya og Føroya Gjaldstovu. Ongin endalig avgerð varð tó tikin, og tí varð bygningurin ikki seldur í 2004.

Á landsstýrisfundi 5. september 2005 legði landsstýrismaðurin í vinnumálum fram upprit um at selja posthúsið á Argjum. Sølan var tó av ongum.

Í desember 2005 kunnaði landsstýrismaðurin í fíggjarmálum um, at Fíggjarmálaráðið arbeiðir við ætlanum um, at bygningurin í framtíðini kann verða nýttur til Hagstovuna, Landsbankan umframt Lendisfyrisitingina og aðrar stovnar, ið Innlendismálaráðið varðar av.

Í september 2006 kunnaði landsstýrismaðurin í vinnumálum um, at leigusáttmálarnir við Tórshavnar kommunu og P/F Postverk Føroya eru uppsagdir við 1 ára freist til 1. august 2007, tí Fíggjarmálaráðið og Innlendismálaráðið skulu nýta bygningin til virksemi sítt.

Sambært Innlendismálaráðnum er ætlanin, at Náttúrugripasavnið, Tinglýsingin, Matrikulstovan, Landsfólkayvirlitið og Umhvørvisdeildin hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni skulu húsast í posthúsbygninginum á Argjum, og sambært Fíggjarmálaráðnum skulu eisini Landsbankin og Hagstova Føroya inn í bygningin.

### *5.1.6 Kringvarpssendistøðir (rakstrarjáttan) 6.38.3.07.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 4.000 t.kr. Meirnýtslan er 598 t.kr. netto.

Játtanin er til at halda og reka útvarps- og sjónvarpssendistøðirnar. Sambært landsstýrismanninum vísti Føroya Tele á, at felagið royndi at reka málsøkið so bíliga, sum til ber. Skuldi felagið lækka rakstrarkostnaðin enn meira, merkti tað, at partar av sendinetinum (virkseminum) máttu steðgast.

Í uppskotinum til eykajáttanarlóg apríl 2005 varð skotið upp at hækka játtanina 1.900 t.kr. Í viðmerkingunum til eykajáttanarlógina varð greitt frá, at *"endamálið er at tryggja ein støðugan og optimalan rakstur av millumbylgjusendistøðini. Sendirørið til millumbylgjusendaran fór herfyri, og er ætlanin at keypa tvey nýggj sendirør til millumbylgjusendaran. Eitt sendirør fyri tað, sum júst er farið, umframt at neyðugt er at hava eitt sendirør á goymslu, til at taka, um verandi sendirør skuldi farið. Sendirørini kosta samanlagt 1,2 mió.kr. Harumframt er eisini átrokandi tørvur á at keypa ymiskar eykalutir til sendaran fyri eini 600 t.kr., og at fremja eitt størri eftirlit fyri umleið 100 t.kr."*

Fíggjarnevndin mælti frá at veita eykajáttan vísandi til, at landsstýrismaðurin eigur at leggja eina verklagslóg fyri tingið, har hædd verður tikin fyri møguleikanum at skifta til nýggjari og betri tøkni. Broytingaruppskot um at strika eykajáttanina varð samtykt.

Í uppskotinum til eykajáttanarlóg september 2005 varð skotið upp at hækka játtanina 400 t.kr. Fíggjarnevndin mælti frá at veita eykajáttan vísandi til, at *"ein verklagslóg liggur til viðgerðar í tinginum, ið hevur til endamáls at endurnýggja sendinetið."* Broytingaruppskot um at strika eykajáttanina varð samtykt.

15. desember 2005 samtykti Løgtingið Ll. nr. 153 frá 20. desember 2005 "um at gera íløgur í útvarps- og sendinetið."

### *5.1.7 Postverk Føroya, eftirlønir (lógarbundin játtan) 6.38.3.08.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 2.000 t.kr. Meirnýtslan er 463 t.kr. netto.

Í uppskotinum til eykajáttanarlóg september 2005 varð skotið upp at hækka játtanina 600 t.kr., tí *"Postverkið hevur gjørt vart við, at tørvur er á eini eykajáttan uppá 600 t.kr. í ár, tí fleiri starvsmenn eru farnir frá við eftirløn, enn roknað var við í fíggjarætlanini."*

Fíggjarnevndin mælti frá at veita eykajáttan, vísandi til at tað, at *"landskassin skal gjalda eftirlønir postverksins, er ein partur av einari samlaðari loysn. Nevndin sær bert henda partin framdan. Tað metir nevndin ikki vera rætt og ynskir tí ikki at mæla til, at umbønin verður eftirlíkað."* Broytingaruppskot um at strika eykajáttanina varð samtykt.

Í viðmerkingunum til fíggjarlógaruppskotið 2005 stóð m.a., at *"á fíggjarlógini fyri 2005 eru 2 mió.kr. settar av á høvuðskontu 6.38.3.08. til eftirlønir til tænastumenn á Postverki Føroya. Postverkið rindar yvir raksturin tað, sum annars svarar til eftirlønina fyri "vanligar" sáttmálasettar starvsmenn (starvsfólk, sum eru sett í starv eftir yvirtøkuna). Útreiðslur landskassans til endamálið fara leysliga mett at vaksa til umleið 5 mió.kr. næstu 5-6 árini. Síðan fara útreiðslurnar at falla líðandi."*

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í oktober 2005 "um frávik millum játtan og nýtslu o.a." fyri fíggjarárið 2004 umrøddu vit, at eftir áheitan frá Postverki Føroya lat LÍV 31. mars 2004 úr hondum eitt yvirlit yvir kapitaliseraðu eftirlønarskyldurnar hjá yvirtiknum tænastumonnum. Sambært yvirlitinum *"er samlaði kostnaðurin fyri eftirlønarskyldurnar av LÍV mettur til 95,6 mió.kr. Í uppgerðini av eftirlønarskylduni ger LÍV annars vart við, at av tí at upplýsingar vanta, er ikki roknað við møguligum hjúnafelaga. LÍV vísir eisini á, at 14 starvsfólk, ið eru farin úr starvi, og tí hava ein uppsettan eftirlønarrætt, eru ikki við í útrokningunum, tí upplýsingar vanta. Postverkið boðaði í februar 2005 frá, at harafturat vanta 4 persónar í bólki 1.*

*Landsgrannskoðanin spurdi tí landsstýrismannin, hvussu stór samlaða kapitaliseraða eftirlønarskyldan er, sum landið hevur tikið á seg í sambandi við umskipanina av Postverki Føroya til partafelag. Vinnumálaráðið boðaði frá, at tað kennir ikki samlaðu kapitaliseraðu eftirlønarskylduna."*

Í uppskoti til samtyktar um at góðkenna landsroknskapin 2004 (Lm. nr. 54-6/2005), sum Løgtingið samtykti 21. apríl 2006, halda løgtingsgrannskoðararnir, at eftirlønarskyldan átti at verið gjørd endaliga upp.

Í juli 2006 kunnaði Vinnumálaráðið um, at Vinnumálaráðið hevði heitt á P/F Postverk Føroya um at kanna, hvussu stórar samlaðu eftirlønarskyldur landskassans vóru. Skuldi tað hent seg, at tað onkursvegna ikki bar til at fáa at vita, innan fyri rímiliga tíð, hvussu stórar samlaðu eftirlønarskyldurnar vóru, helt Vinnumálaráðið bestu loysn vera, at Fíggjarmálaráðið kannaði málið; tí Fíggjarmálaráðið var helst tann myndugleiki, sum hevði besta førleika at meta um fíggjarlig viðurskifti, og kundi geva eina heildarmynd av støðuni.

Í august 2006 mælti P/F Postverk Føroya Vinnumálaráðnum til, at Fíggjarmálaráðið kannaði málið, tí eftirlønir ikki var ein partur av ábyrgdarøki felagsins longur. Vinnumálaráðið heitti tó aftur á felagið um at kanna málið.

Í september 2006 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at tað eru ikki útlit til at Vinnumálaráðið verður kunnað um, hvussu stórar samlaðu eftirlønarskyldur landskassans verða, áðrenn lønarumsitingin verður miðsavnað undir Fíggjarmálaráðnum. Vinnumálaráðið heldur tí bestu loysn vera, at lønardepilin kannar samlaðu eftirlønarskyldur landskassans.

## 5.2 Minninýtsla

### *5.2.1 Vinnumálaráðið (rakstrarjáttan) 6.11.1.06.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 8.981 t.kr. netto. Minninýtslan er 748 t.kr. netto.

Á fíggjarlógini 2005 vóru upprunaliga játtaðar 8.531 t.kr. Á eykajáttanarlógini september 2005 varð játtanin hækkað 450 t.kr. til at skipa fastan gerðarætt.

Eykajáttanarlógin varð ikki samtykt fyrr enn í november 2005, og tí vórðu bert um 140 t.kr. nýttar. Harafturat gjørdust inntøkurnar hjá Vinnumálaráðnum (Skráseting Føroya) 450 kr. hægri, enn roknað var við.

### *5.2.2 Oljufyrisitingin og Jarðfrøðisavnið (rakstrarjáttan) 6.32.1.02.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 18.933 t.kr. Minninýtslan er 1.471 t.kr.

Á fíggjarlógini 2005 vóru upprunaliga játtaðar 19.533 t.kr. Á eykajáttanarlógini september 2005 varð játtanin lækkað 600 t.kr.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Oljufyrisitingin | 5.554 | 3.613 | 1.941 |
| 21. Jarðfrøðisavnið | 7.279 | 8.715 | -1.436 |
| 22. Vísindaligar kanningar | 6.100 | 5.134 | 966 |
| **Tilsamans** | **18.933** | **17.462** | **1.471** |

Undirkonta 20. Oljufyrisitingin og undirkonta 21. Jarðfrøðisavnið: Sambært landsstýrismanninum skulu undirkonturnar 20 og 21 síggjast sum ein, eftirsum stovnarnir vórðu lagdir saman í 2005, og av praktiskum grundum varð valt at bóka flestu útreiðslurnar á undirkontu 21.

Undirkonta 22. Vísindaligar kanningar: Sambært landsstýrismanninum var inntøkan frá ymiskum granskingarverkætlanum størri enn mett frammanundan, og partar av virkseminum viðvíkjandi landgrunsverkætlanini kundu ikki verða gjørdir í 2005, sum annars ætlað.

### *5.2.3 Endurgjald til skipasmíð 6.37.2.04.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 2.500 t.kr. Minninýtslan er 860 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum var virksemið á føroyskum skipasmiðjum minni, enn roknað var við.

### *5.2.4 Granskingarlund (løgujáttan) 6.37.5.06.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 500 t.kr. Minninýtslan er 155 t.kr.

### *5.2.5 Havnir (løgujáttan) 6.38.1.14.*

Á fíggjarlógini 2005 vóru upprunaliga játtaðar 5,0 mió.kr.:

- 3 mió.kr. til samferðsluhavnina í Suðuroy
- 2 mió.kr. til samferðsluhavnina á Syðradali (Kalsoy)

Á eykajáttanarlógini mars 2005 varð játtanin hækkað 2,8 mió.kr.:

- 2,5 mió.kr. til samferðsluhavnina í Suðuroy
- 0,3 mió.kr. til samferðsluhavnina á Syðradali (Kalsoy)

Á fíggjarlógini vóru sostatt játtaðar tilsamans 7,8 mió.kr. Minninýtslan er 436 t.kr.

Samferðsluhavnin á Trongisvágsfirði

Við Ll. nr. 28 frá 8. apríl 2005 varð karmurin at byggja samferðsluhavn á Trongisvágsfirði víðkaður við 5 mió.kr., til 65 mió.kr., til eina varandi loysn av landgongd og farstøð.

Sambært landsroknskapunum 2003-2005 vóru útreiðslurnar av samferðsluhavnini á Trongisvágsfirði 64,1 mió.kr., og karmurin er sostatt hildin.

Samferðsluhavnin á Syðradali

Sambært Ll. nr. 15 frá 20. februar 2003 "um at byggja samferðsluhavn á Syðradali" kunnu útreiðslurnar hjá landskassanum í mesta lagi vera 21 mió.kr.

Sambært landsroknskapunum 2003-2005 vóru útreiðslurnar av samferðsluhavnini á Syðradali 22,2 mió.kr., og sostatt er farið 1,2 mió.kr. upp um ásetta karmin.

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at sambært viðmerkingunum til uppskotið til Ll. 15/2003 vóru útreiðslurnar til forkanningar og prosjektering ikki umfataðar av karminum. Umleið 500 t.kr. vóru nýttar til prosjektering og tílíkt, og meirnýtslan í mun til verklagslógina var tískil um 600 t.kr.

Sambært landsstýrismaninum var grótið, sum varð sprongt í Kalsoynni, so vánaligt, at tað kundi ikki verða nýtt til verjugrót. Tí varð neyðugt at flyta grót norður, og tað dýrkaði verkætlanina.

### 5.2.6 Flogferðsla (lógarbundin játtan) 6.38.2.10.

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 500 t.kr. Minninýtslan er 182 t.kr.

Játtan fer til at gjalda aftur toll- og MVG-útreiðslurnar hjá Statens Luftfartsvæsen í Vágum, sum standast av m.a. út- og umbyggingum í Vága Floghavn.

Sambært landsstýrismanninum varð trygdarhegnið kring flogvøllin ikki gjørt liðugt í 2005 sum ætlað, tí málið um at ognartaka lendið ikki var loyst.

### 5.2.7 P/F Flogsamband 6.38.2.11.

Á fíggjarlógini var ein inntøkujáttan 3,6 mió.kr. Meirinntøkan er 385 t.kr.

Landið átti meirilutan av partabrøvunum í P/F Flogsambandi. Felagið varð tikið av í 2005, og landsins partur av eginpeninginum varð rindaður landskassanum.

### 5.2.8 Flogferðsla (løgujáttan) 6.38.2.13.

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 1.000 t.kr. Minninýtslan er 997 t.kr.

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina skuldi játtanin verða nýtt til at betra um tyrlupallin á Kirkju.

Sambært landsstýrismanninum bar ikki til at byggja nýggjan tyrlupall á Kirkju í 2005, tí annar eigarin av lendinum, har tyrlupallurin skal standa, vildi ikki selja sín part.

### 5.2.9 Postverk Føroya, umskipað til partafelag 6.38.3.02.

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 72 mió.kr. til útreiðslur og 72 mió.kr. til inntøkur.

Á fíggjarlógini 2005 var upprunaliga eingin játtan. Á eykajáttanarlógini mars 2005 vórðu játtaðar 80,5 mió.kr. til útreiðslur og 72 mió.kr. til inntøkur. Í viðmerkingunum til eykajáttan-arlógina varð m.a. greitt frá:

> *"Endamálið við eykajáttanini er at fáa fíggjarliga heimild til at skjóta nettoogn Postverksins inn í partafelagið. Nettoognin verður í løtuni mett til 96,2 mió.kr. Við í hesum eru eisini tær 21,5 mió. kr., sum longu eru settar í felagið. Tískil er talan um at skjóta 74,7 mió.kr. í partapeningi inn í felagið. Ognarmetingin skal tó takast við fyrivarni, tí endaligu roknskapartølini fyri 2004 fyri-liggja ikki í løtuni.*
>
> *Játtanin hevur ongar útreiðslur við sær fyri landskassan, tí talan er bert um eina fíggjarlógar-tekniska uppseting."*

Í álitinum frá 10. mai 2005 skrivaði Fíggjarnevndin m.a.:

> *"Fíggjarnevndin hevur fingið upplýst, við støði í nýggjari ognarmeting frá Rasmussen og Weihe og endaligu roknskapartølunum hjá Postverki Føroya, at Postverkið í morgun er komið til, at nettoognin er 93.458.041 kr. Við í hesum eru eisini tær 21,5 mió.kr., sum landið longu hevur sett í felagið. Tískil skulu 71.958.041 kr. skjótast inn í felagið.*
>
> *Fíggjarnevndin ætlar at hækka hesa upphædd við 8,5 mió.kr. Orsøkin til hetta er, at alt post-virksemið eftir umskipanina verður mvg-skyldugt, eisini tær tænastur, ið eru fevndar av postskylduni. Hetta fer at hava við sær eina meirútreiðslu fyri P/F Postverk Føroya upp á 3 mió.kr. Hækkingin við teimum 8,5 mió.kr. skal síggjast sum ein kompensasjón soleiðis, at Postverkið hevur eitt tíðarskeið at tillaga seg øktu útreiðslunum.*
>
> *Fíggjarnevndin ætlar eisini, at upphæddin, ið verður skotin inn í partafelagið, skal býtast sundur í tvær upphæddir. Ein upphædd á 30 mió.kr., ið verður skotin inn sum lán, ið skal rentast við 2,5 % yvir diskontuna, og ein restupphædd, ið verður innskotin sum vanligur ábyrgdar-peningur."*

Á eykajáttanarlógini november 2005 varð innskotið lækkað 8,5 mió.kr., tí *"lógaruppskot er lagt fyri Løgtingið, sum frítekur P/F Postverk Føroya at gjalda MVG í trý ár av tí virkseminum, har ongin*

*kapping er (postvirksemi). Innskotið til P/F Postverk Føroya, sum varð játtað við eykajáttanarlógini fyri mars 2005, verður tí lækkað við 8,5 mió.kr., sum skuldi verða endurgjald fyri MVG.”*

Í álitinum frá 16. desember 2005 skrivaði Fíggjarnevndin m.a.:

*“Í hesum sambandi verður hildið neyðugt, at fluttar verða 21,5 mió.kr. frá ábyrgdarpeninginum, soleiðis at samlaði innskotspeningurin kemur at síggja soleiðis út (talva: Landsgrannskoðanin):*

*(mió.kr.)*

| | ***EYJ- lóg mars 2005*** | ***EYJ-lóg nov. 2005*** | ***Broyting*** |
|---|---|---|---|
| *Lán* | *21,5* | *21,5* | *-* |
| *Partapeningur* | *21,5* | *43,0* | *21,5* |
| *Ábyrgdarpeningur* | *50,458* | *28,958* | *-21,5* |
| ***Samlað innskot*** | ***93,458*** | ***93,458*** | *-* |

*Hetta hevur alstóran týdning, nú postverkið endaliga verður umskipað til partafelag.”*

Sambært landsroknskapinum 2005 eru inntøkurnar av kapitalinnskotinum 72,2 mió.kr., og útreiðslurnar eru 72,2 mió.kr.:

- 21,5 mió. til at hækka partapeningin til 43 mió.kr.
- 21,5 mió.kr. skrásett sum lán
- 29,2 mió.kr. skrásett sum rentu- og avdráttarfrí útlán (ábyrgdarpeningur)

Sostatt er samsvar ímillum játtanar- og roknskapartøl, og lánið er rentað sambært ásetingunum frá Fíggjarnevndini.

Postvirksemi undantikið mvg-skyldu

4. november 2005 legði landsstýrismaðurin í fíggjarmálum fram uppskot um at broyta Ll. nr. 136/1992 “um meirvirðisgjald”, m.a. at sett varð inn nýggj § 2, stk. 3, litra g: *“Postflutningur, sum er fevndur av § 3, stk. 4, ella § 4 í løgtingslóg um postvirksemi, hjá Postverki Føroya ella P/F Postverki Føroya, í tann mun, teir ikki selja tænastur í kapping við vinnurekandi virki. Frítøkan fer úr gildi 31. desember 2008.”*

Meirilutin í Fíggjarnevndini skjeyt upp, at § 2, stk. 3, litra g, varð orðað soleiðis: *“Postflutningur, sum er fevndur av løgtingslóg um postvirksemi § 3, stk. 4, og § 4, stk. 2, nr. 1 og 5.”* Broytingaruppskotið hjá meirilutanum í Fíggjarnevndini varð samtykt. Tískil er mvg-frítøkan av postflutningi ikki tíðaravmarkað.

Spurdur, hvønn fíggjarligan týdning tað hevur fyri P/F Postverk Føroya, at nevndi post-flutningur er frítikin fyri mvg-skyldu, svaraði landsstýrismaðurin í august 2006, at P/F Post-verk Føroya er betri kappingarført í mun til elektroniskan post yvirhøvur, og í mun til post-virksemi uttanlands.

Størstu vinnulívskundarnir, m.a. banka- og tryggingarvirksemi, umframt almennir stovnar o.t., eru undantiknir mvg. Tess hægri kostnaðurin er fyri vanligar posttænastur, tess størri insitament hava kundarnir til at brúka elektroniskan post, heldur enn vanligar posttænastur.

Eftir ES direktivi (77/388/EØF) eru posttænastur í ES mvg-frítiknar, tí hevði vandi verið fyri, at størri kundar fluttu teirra postavgreiðslur til eitt ES-land við mvg-frítøku. Viðvíkjandi frítøku av mvg á frímerkjum er Postverkið javnt stillað við frímerkjaseljarar í ES, sum hava mvg frítøku, og tað hevur týdning, tí frímerki eru ein týðandi útflutningur og inntøka fyri Postverkið.

### *5.2.10 Kringvarpssendistøðir (løgujáttan) 6.38.3.10.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 6 mió.kr. Minninýtslan er 5,4 mió.kr.

Á fíggjarlógini 2005 var upprunaliga eingin játtan. Á eykajáttanarlógini september 2005 vórðu játtaðar 6 mió.kr. til at bøta um rakstrartrygdina á høvuðssjónvarpssendaranum og millumbylgjusendaranum og harumframt at gera smávegis íløgur, sum skulu tryggja, at líkindini at hoyra útvarp á FM frá Kringvarpi Føroya verða betrað.

Fíggjarnevndin gjørdi vart við, at peningurin átti ikki at verða nýttur, fyrr enn ein verklagslóg var samtykt.

15. desember 2005 samtykti Løgtingið Ll. nr. 153 frá 20. desember 2005 "um at gera íløgur í útvarps- og sendinetið."

Verklagslógin varð samtykt so seint í árinum, at sambært landsstýrismanninum var bert møguligt at nýta ein lítlan part av játtanini til at keypa smávegis av útbúnaði, áðrenn fíggjarárið var lokið.

Í 2006 eru 1,2 mió kr. játtaðar til íløgur í sendinetið. Løgmaður gjørdi av at flyta málsøkið frá 1. januar 2006 til § 7 "Útbúgving og gransking", og tí eru 4 mió.kr. játtaðar í 2006 á 7.38.3.07. "Kringvarpssendistøðir (rakstrarjáttan)", til at halda og reka kringvarpssendistøðirnar.

### *5.2.11 Barsilsskipan (lógarbundin játtan) 6.39.4.01.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 70 mió.kr. Minninýtslan er 4 mió.kr.

Við løgtingslóg nr. 29 frá 19. mai 2004 "um broyting í løgtingslóg um barsilsskipan", við gildi frá 1. juni 2004, varð hægsta mánaðarliga barsilsútgjaldið lækkað frá 35 t.kr. til 25 t.kr., og rætturin hjá mammum til útgjald fyri føðing varð lækkaður úr 13 vikum til 8 vikur.

Sambært landsstýrismanninum hevði lógarbroytingin størri virknað enn roknað var við í fíggjarætlanini fyri 2005, soleiðis at sparingin varð størri enn mett frammanundan.

# 6 ÚTBÚGVING OG GRANSKING

## 6.1 Meirnýtsla

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Meirnýtsla |
|---|---|---|---|
| Viðlíkahald (rakstrarjáttan) | 6.114 | 6.538 | 424 |
| Ymiskar felagsútreiðslur (rakstrarjáttan) | 2.068 | 2.477 | 409 |
| Skúlabókagrunnurin (rakstrarjáttan) | 4.500 | 4.723 | 223 |
| Fólkaskúlin (rakstrarjáttan) | 221.814 | 222.728 | 914 |
| Sernámsdepilin (rakstrarjáttan) | 40.877 | 41.058 | 181 |
| Føroya Læraraskúli (rakstrarjáttan) | 17.405 | 18.029 | 624 |
| Ymiskar verkætlanir (rakstrarjáttan) | 1.387 | 1.419 | 32 |
| Listasøvn (rakstrarjáttan) | 1.957 | 2.041 | 84 |
| Kringvarp Føroya (landsfyritøka) | 0 | 1.893 | 1.893 |
| Lánsafturgjald | -100 | -42 | 58 |

### *6.1.1 Viðlíkahald (rakstrarjáttan) 7.11.1.14.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 6,1 mió.kr. Meirnýtslan er 424 t.kr.

Í viðmerkingum til fíggjarlógina stendur, at játtanin er ætlað til ymiskt viðlíkahald á undirvísingar- og mentamálaøkinum. Sambært landsstýrismanninum fevnir játtanin um viðlíkahald av so nógvum ymiskum stovnum, at tað er sera trupult at stýra játtanini so neyvt, at eingin meirnýtsla verður. Harafturat gjørdi umlegging av roknskaparhaldinum tað trupult at fylgja við játtanini. Eisini vórðu bráðneyðug arbeiði framd, sum ikki vóru við í ætlanini: Umvæling eftir vatnskaða á Læraraskúlanum og skift oljutanga á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði í Hoydølum.

**Viðmerkingar til einstakar útreiðslur**

Viðlíkahald, Føroya Studentaskúli- og HF-skeið í Hoydølum

Í 2004 og 2005 eru av høvuðskontu 7.11.1.14. "Viðlíkahald" nýttar ávikavist 1,1 mió.kr. og 2,1 mió.kr. til viðlíkahald á skúlanum í Hoydølum.

Á fíggjarlógini 2006 er stovnað nýggj høvuðskonta 7.23.3.28. "Studentaskúlin í Hoydølum (løgujáttan)", har 2 mió.kr. eru játtaðar til neyðugar íløgur og ábøtur/umbyggingar í sambandi við krøv frá Brunaumsjón Landsins og Arbeiðseftirlitinum, umframt at arbeitt verður við at fyrireika neyðugar ábøtur/umbyggingar.

Sum víst á, vóru í 2005 2,1 mió.kr. nýttar av høvuðskontu "Viðlíkahald", sum er ein felagsjáttan.

Vit spurdu, hví nýggj høvuðskonta, 2 mió.kr., varð stovnað í 2006 til sama endamál. Landsstýrismaðurin svaraði, at játtanin til ábøtur og umbyggingar á skúlanum er sambært krøvum frá Brunaumsjón Landsins og Arbeiðseftirlitinum. Her er talan um so stórar íløgur og so stór inntriv í bygningarnar, at Mentamálaráðið heldur talan vera um eina løgujáttan og ikki vanligt viðlíkahald.

Á eykajáttanarlógini apríl 2006 varð játtanin "studentaskúlin í Hoydølum" (løgujáttan) hækkað 5,5 mió.kr.

Spurdur, hví henda upphædd ikki var tikin við á fíggjarlógina 2006, sum varð samtykt í desember 2005, svaraði landsstýrismaðurin, at tað var eitt politiskt ynski at raðfesta viðurskiftini í Hoydølum hægri, enn gjørt varð í sambandi við fíggjarlógararbeiðið fyri 2006; millum annað tí at ferðsluviðurskiftini í Hoydølum eru ótolandi.

Viðlíkahald, Føroya Fornminnisavn og friðaðir bygningar

Árini 1997–2005 eru av høvuðskontu 7.11.1.14. “Viðlíkahald” nýttar 3,6 mió.kr. til “Føroya Fornminnissavn og friðaðir bygningar”.

Í sama tíðarskeiði eru av høvuðskontu 7.24.3.19. ”Friðað hús og fornminni” nýttar 4,5 mió.kr. Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina er játtanin ætlað *”til at reka friðaðar landsognir, sum eru álagdar Fornminnissavninum at umsita, umframt at samsýna fornminnisnevnd og stuðul til friðað hús og fornminni, sum ikki eru landsogn.”*

Vit spurdu, hvørjar viðlíkahaldsútreiðslur verða rindaðar av felagskontu 7.11.1.14. “Viðlíkahald“, og hvørjar verða rindaðar av kontu 7.24.3.19. ”Friðað hús og fornminni”.

Sambært landsstýrismanninum verður játtanin til “Friðað hús og fornminni” brúkt til friðaðar landsognir, sum Fornminnissavnið umsitur, og til privatar ognir, ið eru friðaðar, meðan aðrar friðaðar landsognir verða viðlíkahildnar av játtanini ”Viðlíkahald”.

Landsgrannskoðanin hevur spurt, hvørjar “aðrar friðaðar landsognir” talan er um. Í september 2006 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at talan er um prestagarðin í Sandagerði. Eisini verður viðlíkahald av gamla bókasavnshúsinum og hvalastøðini við Áir rindað av játtanini 7.11.1.14. Hetta eru gamlir bygningar, ið kanska verða friðaðir.

Viðlíkahald, Føroya Listasavn

Í uppskotinum til eykajáttanarlóg september 2005 varð skotið upp at hækka játtanina 7.11.1.14. “Viðlíkahald” 330 t.kr. til at bøta um trygdina á Listasavninum.

Fíggjarnevndin mælti frá at veita eykajáttan, tí Fíggjarnevndin helt tað ikki vera rætt at játta pening av hesari kontu til endamálið. Broytingaruppskot um at strika eykajáttanina varð samtykt.

Sambært landsroknskapinum eru av høvuðskontu 7.11.1.14. “Viðlíkahald” nýttar 453 t.kr. til trygdarskipan á Listasavninum.

Fakturadagarnir á rokningunum kundu bent á, at søkt er um eykajáttan, eftir at trygdarskipanin er bíløgd, og at útreiðslur at bøta um trygdina á Listasavninum eru bókaðar á høvuðskontu 7.11.1.14. “Viðlíkahald”, hóast Fíggjarnevndin ikki helt tað vera rætt at játta pening av hesari kontu til endamálið.

Vit hava biðið landsstýrismannin um viðmerkingar. Í juni 2006 hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at:

> *Í sambandi við at Listasavnið skuldi hava eina Munch-framsýning, mátti leiðslan á Listasavninum hækka trygdarstøðið á savninum munandi. Savnið hevði ikki játtan til útgerðina á savnsjáttanini, tí tók Mentamálaráðið stig til at biðja fíggjarnevndina um eykajáttan til endamálið.*
>
> *Fyrst í september 2005 kom fram í bløðunum, at savnið hevði fingið trygdarútgerðina, og tí spurdi Mentamálaráðið savnsleiðsluna fyrst í september 2005, hvussu henda varð fíggjað. Savnsleiðslan upplýsti, at “Uppá fyrispurningin frá blaðfólkinum, hvat kostnaðurin av tílíkari trygdarútgerð er, var upplýst, at um Listasavnið vil keypa sær hesa útgerð, er kostnaðurin uml. kr. 300.000,-. Eisini fingu tey at vita, at um henda framsýning skuldi fáa innivist á Listasavninum, var tílík trygdarútgerð neyðug. Tessvegna var slík trygdarútgerð leigað til framsýningina.”*
>
> *Umbønin at hækka viðlíkahaldskontuna við eini eykajáttan varð ikki gingin á møti av fíggjarnevndini. Byggiumsiting landsins metti tó, at pláss kom at verða á viðlíkahaldsjáttanini at rinda útgerðina fyri, og góðkendi tí, at útgerðin varð keypt.”*

Ein rokning, kr. 114.355, er útreiðsluførd tvær ferðir í landsroknskapinum. Rokningin er goldin úr landskassanum beinleiðis til veitaran, og síðani eisini endurgoldin Listasavninum.

Sambært landsstýrismanninum er Mentamálaráðið gjørt varugt við mistakið og hevur biðið Listasavnið flyta upphæddina, kr. 114.355, aftur til høvuðskontu 7.11.1.14. “Viðlíkahald”.

Viðlíkahald, innbúgv o.a. til Mentamálaráðið

Sambært landsroknskapinum eru av høvuðskontu 7.11.1.14. “Viðlíkahald” í 2004 nýttar kr. 89.900 og í 2005 kr. 114.100 til innbúgv til ávikavist fundarhøli og skrivstovu hjá landsstýrismanninum. Í 2004 eru eisini nýttar kr. 29.292 til uppvaskimaskinu til Mentamálaráðið.

## Almennar viðmerkingar um viðlíkahaldsútreiðslur

Høvuðskontan ber heitið “Viðlíkahald”, og sambært viðmerkingunum til fíggjarlógaruppskotið er “játtanin til ymiskt viðlíkahald á undirvísingar- og mentamálaøkinum”. Mettu viðlíkahaldsútreiðslurnar eru í viðmerkingunum “játtaðar” á standardkontu 16 “Leiga, viðlíkahald og skattur”.

Sundurgreiningin á standardkontur í viðmerkingunum til fíggjarlógaruppskotið er ikki bindandi, men eftirsum talan er um eina høvuðskontu, ið er markað til viðlíkahald, má Løgtingið rokna við, at játtanin í høvuðsheitum verður brúkt til viðlíkahald (standardkonta 16), soleiðis sum hetta útreiðsluslag er allýst í konteringarleiðbeiningini til Kontuskipan Landsins, og ikki til beinleiðis keyp av vørum og tænastum (standardkonta 14) ella keyp av útbúnaði (standardkonta 15). Verður tilfarsparturin av viðlíkahaldsarbeiðinum gjørdur upp fyri seg, skal tilfarið verða bókað undir standardkontu 14.

Útreiðslurnar til trygdarskipan hjá Listasavninum eru bókaðar undir standardkontu 16, á StRk 1651 “Umvælingar og viðlíkahaldsútreiðslur – bygningar”.

Útreiðslurnar til at keypa uppvaskimaskinu og innbúgv til Mentamálaráðið eru bókaðar undir standardkontu 15, á StRk 1540 “Innbúgv, maskinur og útbúnaðar annars”.

Av hesari høvuðskontu eru í 2005 nýttar 970 t.kr og í 2004 1,4 mió.kr. til at keypa vørur og tænastur og útbúnað.

Í juni 2006 er m.a. bókað rokning 316 t.kr., sum er fyri at keypa 400 fundarstólar við skriviplátu til Føroya Læraraskúla. Rokningin er bókað á StRk 1540.

Landsgrannskoðanin hevur víst á, at útreiðslurnar til innbúgv, uppvaskimaskinu, trygdarskipan, fundarstólar o.t. eru farnar til vørur, tænastur og útbúnað, ið vanliga ikki er at rokna sum viðlíkahald ella tilfar í sambandi við viðlíkahald, soleiðis sum hetta hugtak er allýst í konteringarleiðbeiningini til Kontuskipan Landsins.

Sambært landsstýrismanninum verða útreiðslur vanliga verksettar í samráð við Byggiumsiting Landsins, ið ger eina meting av, um talan er um viðlíkahald ella er ein útreiðsla, sum hoyrir til sjálvan raksturin av stovninum. Sambært landsstýrismanninum verður tað neyvan øðrvísi, fyrr enn Byggiumsiting Landsins hevur gjørt reglugerð fyri, hvat skal roknast sum viðlíkahald, og hvat skal takast við í sjálvan stovnsraksturin.

Landsgrannskoðanin hevur í hesum sambandi víst á, at tað er neyvan rætt, at Byggiumsiting Landsins skal gera reglugerð fyri, hvat skal konterast sum viðlíkahaldsútreiðslur. Tann uppgávan liggur, sambært roknskaparkunngerðini, hjá Fíggjarmálaráðnum/Gjaldstovuni, og ein møgulig broyting av verandi allýsing av útreiðslusløgum kann sjálvandi gerast í samráð við Byggiumsiting Landsins, men formliga má Fíggjarmálaráðið/Gjaldstovan standa fyri møguligum broytingum av verandi kontuskipan/konteringarvegleiðing.

Í september 2006 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at Mentamálaráðið og Landsverk eru samd um, at ein reglugerð um viðlíkahaldsjáttanina verður send Fíggjarmálaráðnum til hoyringar, soleiðis at møgulig andsøgn við Kontuskipan Landsins verður staðfest og kann verða rættað. Hesin spurningur er eisini umrøddur í frágreiðingini undir fíggjarmálum.

Spurningurin um viðlíkahald er meira alment viðgjørdur í frágreiðingini undir fíggjarmálum.

### 6.1.2 Ymsar felagsútreiðslur (rakstrarjáttan) 7.23.1.07.

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 2.068 t.kr. Meirnýtslan er 409 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum stavar meirnýtslan m.a. frá, at PISA-kanningin og aðrar verkætlanir vórðu drúgvari og dýrari enn upprunaliga mett.

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina er játtanin ætlað til felagsútreiðslur fyri Mentamálaráðið, t.d. til verkætlanir, sum vera hildnar at kunna menna føroyska undirvísingarverkið og mentamálaøkið, herímillum samsýning fyri nevndararbeiði at menna eina lønarforskipan til skúlaverkið, arbeiðið hjá málkommissiónini, oljuútbúgvingartiltøk, dygdarmenning umframt OECD-kanningar og mátingar í skúlaverkinum.

Vit hava heft okkum við, at í 2005 eru ferðaútreiðslur, kr. 162.840, bókaðar á høvuðskontuna. Ferðaútreiðslurnar eru fyri ein fyrisitingarleiðara, ein undirvísingarleiðara, ein lønarfulltrúa og ein ráðgeva, ið øll starvast í Mentamálaráðnum. Vit hava eisini heft okkum við, at kr. 14.079 til umboðan eru bókaðar á høvuðskontuna.

Í uppskotinum til eykajáttanarlóg apríl 2006 varð skotið upp at hækka játtanina 1.000 t.kr. til verkætlanina "Skúlafyrisitingarforrit".

Í álitinum til eykajáttanarlógina helt Fíggjarnevndin *"tað ikki vera nøktandi, at stórar verkætlanir verða játtaðar undir eini felags "ymsar útreiðslur" kontu. Tað eigur greitt at framganga, hvørjar verkætlanir verða fíggjaðar av eini slíkari kontu. Nevndin ynskir, at landsstýrismaðurin til komandi fíggjarlóg setir hvørja verkætlan sær undir serstaka undirkontu, so til ber hjá Løgtinginum at vita, hvat játtanin verður nýtt til, og til ber at fylgja við."*

Sambært landsstýrismanninum hevur Mentamálaráðið í mong ár havt hesa serligu játtan til at rinda ymiskar verkætlanir hjá Mentamálaráðnum. Á løgtingsfíggjarlógini 2007 verður uppbýti gjørt, ið vísir eina raðfesting av, hvørjar uppgávur játtanin er ætlað til tað árið.

Sambært landsstýrismanninum hevur siðvenja verið í mong ár, at ávísar verkætlanir í ein ávísan mun rinda fyri beinleiðis útreiðslur, ið hoyra til verkætlanina, eisini fyri meirútreiðslur hjá starvsfólki í Mentamálaráðnum. Tað hevur verið gjørt, t.d. tá ið fyrireikingar verða gjørdar til størri byggimál, edv-verkætlanir ella afturvendandi tiltøk, har Mentamálaráðið er við, t.d. European Business Games. Luttøka í norðurlendska samstarvinum verður í stóran mun eisini rindað av serligari játtan, heldur enn av Mentamálaráðnum.

Landsgrannskoðanin ivast í, um tað er rætt at hava eina tílíka serstaka høvuðskontu til felagsútreiðslur hjá Mentamálaráðnum. Spurningurin er, um ikki hesar útreiðslur áttu at verið partur av játtanini til Mentamálaráðið. Mentamálaráðið er einasta ráð, ið hevur eina tílíka kontu til felagsútreiðslur.

### 6.1.3 Skúlabókagrunnurin (rakstrarjáttan) 7.23.1.16.

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 4.500 t.kr. Meirnýtslan er 223 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum er meirnýtslan eftirregulering av eftirløn til stjóran.

### 6.1.4 Fólkaskúlin (rakstrarjáttan) 7.23.2.01.

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 221,8 mió.kr. Meirnýtslan er 914 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum koma áleið 500 t.kr. frá, at stovnurin ikki fekk endurgjald fyri lønarhækkingina sambært sáttmála 1. oktober 2005.

Á fíggjarlógini 2005 vóru upprunaliga játtaðar 222 mió.kr. Á eykajáttanarlógini mars 2005 varð játtanin lækkað 200 t.kr., sum vórðu nýttar til at hækka játtanina til privatar skúlar (stuðul til Adventistaskúlan).

Í viðmerkingunum til fíggjarlógina verður Løgtingið kunnað um, at *"játtanin er til at reka virksemið í fólkaskúlanum. Sambært løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997, seinast broytt við løgtingslóg nr. 53 frá 9. mai 2005 um fólkaskúlan, er fólkaskúlin tann almenni skúlin, ið býður undirvísing eftir hesari lóg."*

Í viðmerkingunum sæst eisini, at av játtanini 222 mió.kr. eru um 220 mió.kr. til lønir. Aðrar útreiðslur er mettar til um 2 mió.kr. Sambært landsroknskapinum er talan um hesar útreiðslur:

kr.

| | |
|---|---|
| Ferðing og flutningur, alment sett – innanlands | 72.466 |
| Ferðing og flutningur, alment sett – uttanlands *) | 107.052 |
| Ferðing og flutningur, onnur | 35.846 |
| Umboðan | 41.487 |
| Keyp av pappíri og prentlutum | 72.610 |
| Keyp av vørum annars | 11.123 |
| Postgjøld | 30.727 |
| Grannskoðanar-, roknskapar- og løgfrøðiligar tænastur | 420 |
| Trygging | 2.724 |
| Keyp av tænastum í sambandi við edv og kunningartøkni | 662.630 |
| Keyp av tænastuveitingum annars | 922.119 |
| **Tilsamans** | **1.959.204** |

*) m.a. fyri ein undirvísingarleiðara í Mentamálaráðnum.

Umleið helvtin av útreiðslunum eru nýttar til eftirútbúgving av lærarum. Hin helvtin er meira vanligar umsitingarútreiðslur, serliga til edv og kunningartøkni.

**Viðmerkingar**

Mentamálaráðið hevur 4 deildir:

- Aðalskrivstovan
- Fólkaskúladeildin
- Vinnu- og miðnámsskúladeildin
- Mentamáladeildin

Fólkaskúladeildin fyrisitur og hevur yvirumsjón við m.a. fólkaskúlunum. Tað er tí ein spurningur, um ikki framman fyri nevndu umsitingarútreiðslur, hildnar av játtanini til fólkaskúlan, áttu at verið hildnar av játtanini til Mentamálaráðið, ið m.a. fevnir um Fólkaskúladeildina.

### *6.1.5 Sernámsdepilin (rakstrarjáttan) 7.23.2.02.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 40,9 mió.kr. Meirnýtslan er 181 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum kemst ein partur av meirnýtsluni av, at stovnurin ikki fekk endurgjald fyri lønarhækkingina sambært sáttmála 1. oktober 2005.

### *6.1.6 Føroya Læraraskúli (rakstrarjáttan) 7.23.6.13.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 17.405 t.kr. Meirnýtslan er 624 t.kr.

Á fíggjarlógini 2005 vóru upprunaliga játtaðar 15.905 t.kr. Við fíggjarnevndarskjali 30. mai 2005 varð játtanin hækkað 400 t.kr. til eykaútreiðslur til starvsvenjing, eftir semju millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag.

Sambært landsstýrismanninum stóðst meirnýtslan av, at starvsfólk og leiðsla vóru nógv burtur í 2005 vegna sjúku.

Á eykajáttanarlógini desember 2005 varð játtanin hækkað 1.100 t.kr. til eftirlønir. Við sáttmálanum millum Magistarafelagið og Fíggjarmálaráðið í mars 1999 fingu starvsfólk, ið hava hálvt starv í 3 mánaðir ella meira, rætt til eftirløn. Landsstýrismaðurin kunnaði í januar

2006 um, at Læraraskúlin hevði ikki givið sær far um henda eftirlønarrætt, fyrr enn Magistarafelagið tók málið upp í februar 2004.

### *6.1.7 Ymiskar verkætlanir (rakstrarjáttan) 7.23.6.23.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 1.387 t.kr. netto. Meirnýtslan er 32 t.kr. netto.

Sambært landsstýrismanninum minkaðu inntøkurnar, m.a. stuðulin frá kommunum, og trupulleikar vóru at laga raksturin til skerdu játtanina á fíggjarlógini.

### *6.1.8 Listasøvn (rakstrarjáttan) 7.24.3.22.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 1.957 t.kr. Meirnýtslan er 84 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum hava tað verið serligar umstøður á Listasavninum í 2005. Nýggj leiðsla byrjaði 1. mars 2005, samstundis sum starvsfólk á savninum vórðu sjúkraskrivað og seinni loyst úr starvi við uppsagnarløn. Trupla støðan førdi við sær fleiri arbeiðstímar til tey leysu hjálparfólkini og harvið øktar lønarútreiðslur. Harumframt gjørdist Edvard Munch-framsýningin meira kostnaðarmikil, enn mett var frammanundan.

### *6.1.9 Kringvarp Føroya (landsfyritøka) 7.24.4.06.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 0 kr. netto. Meirnýtslan er 1.893 t.kr.

Á fíggjarlógini 2005 var upprunaliga ein nettojáttan 0 kr. til ávíkavist Sjónvarp Føroya og Útvarp Føroya.

Við løgtingslóg nr. 91 frá 21. desember 2004 "um broyting í løgtingslóg um kringvarp v.m." vórðu Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya løgd saman.

Á eykajáttanarlógini mars 2005 vórðu játtanirnar til Sjónvarp Føroya og Útvarp Føroya niðurlagdar, og játtan til samanlagda stovnin Kringvarp Føroya varð sett á fíggjarlógina.

Sambært landsstýrismanninum stavar meirnýtslan frá serligu útreiðslunum til at leggja Útvarp Føroya og Sjónvarp Føroya saman til ein stovn, Kringvarp Føroya.

Á s. 26 í frágreiðing okkara til løgtingsgrannskoðararnar í februar 2006 stendur m.a.: *"Í sambandi við avstemman av fíggjarstøðuni hevur Gjaldstovan í áravís víst á, at landsstovnar/-fyritøkur (t.d. Útvarp Føroya, Apoteksverkið, Húsalánsgrunnurin, Trygdargrunnurin og Rúsdrekkasøla Landsins) hava nógvan pening standandi á kontum í øðrum peningastovnum. Gjaldstovan hevur sett spurningin, um ikki hesin peningur átti at staðið í Landsbankanum."*

Í september 2006 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at hann fer at taka spurningin upp við leiðsluna í Kringvarpinum.

### *6.1.10 Lánsafturgjald 7.24.8.01.*

Á fíggjarlógini var ein inntøkujáttan 100 t.kr. Minniinntøkan er 58 t.kr.

## 6.2 Minninýtsla

### *6.2.1 Kringvarp Føroya (løgujáttan) 7.24.4.03.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 3,5 mió.kr. Minninýtslan er 190 t.kr.

Á fíggjarlógini 2005 var upprunaliga eingin peningur játtaður. Á eykajáttanarlógini september 2005 vórðu játtaðar 3,5 mió.kr. til at útvega byggilendi.

### *6.2.2 Stuðul til fólkaskúlar 7.23.2.03.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 3.966 t.kr. Minninýtslan er 429 t.kr.

Á hesari kontu verður stuðul veittur til skúlabarnaflutning, privatar skúlar og føroyskar skúlar uttanlands.

Á fíggjarlógini 2005 vóru upprunaliga játtaðar 3.766 t.kr. Á eykajáttanarlógini mars 2005 varð játtanin hækkað 200 t.kr., vísandi til, at stuðulin til Adventistaskúlan, sum sambært lóg er 85% av læraralønum, fór at verða 200 t.kr. hægri enn upprunaliga mett.

Sambært landsstýrismanninum eru fleiri kommunur lagdar saman, og tær hava tí ikki rætt til stuðul til skúlabarnaflutning.

### *6.2.3 Skúlatilboð uttan fyri fólkaskúlan (løgujáttan) 7.23.2.08.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 500 t.kr. Eingin peningur er nýttur í 2005.

### *6.2.4 Miðnámsskúlin í Suðuroy (løgujáttan) 7.23.3.06.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 12,9 mió.kr. Minninýtslan er 11,4 mió.kr. sambært landsroknskapinum 2005.

Veruliga minninýtslan er 12 mió.kr., tí rokningar, 676 t.kr., viðvíkjandi 2004 vórðu bókaðar í 2005.

Á fíggjarlógini 2005 vóru upprunaliga játtaðar 23 mió.kr. Á eykajáttanarlógini mars 2005 varð játtanin lækkað 1,2 mió.kr. Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina varð m.a. *"biðið um at flyta løgujáttan 1.150 t.kr. frá Miðnámsskúlanum í Suðuroynni til skúlatilboð fyri menningartarnað."*

Á eykajáttanarlógini september 2005 varð játtanin lækkað 9 mió.kr. Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina varð m.a. *"biðið um, at løgujáttanin til Miðnámsskúlan í Suðuroy verður lækkað 9 mió.kr. Av hesum verður biðið um, at 3,5 mió.kr. ístaðin verða nýttar til at keypa grundøki til Kringvarp Føroya. Biðið verður eisini um, at lestrarstuðulin hækkar 6,6 mió.kr."*

### *6.2.5 Tekniski skúli í Klaksvík (løgujáttan) 7.23.3.07.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 2,6 mió.kr. Minninýtslan er 2,3 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum er fyrireikingararbeiðið í sambandi við útbyggingina nógv seinkað. Løgtingslóg um útbygging av Tekniska Skúla í Klaksvík er samtykt í mai 2006, og prosjekteringin verður væntandi liðug í juli 2006.

### *6.2.6 Fiskivinnuskúlin (løgujáttan) 7.23.3.08.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 4,6 mió.kr. Minninýtslan er 4,3 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum var arbeiðið at projektera nýggja Fiskivinnuskúlan nógv seinkað. Forprojektið varð liðugt í apríl 2006. Útbjóðing og lisitatión skuldi vera í juli og august 2006.

### *6.2.7 Skúladepil í Marknagili (løgujáttan) 7.23.3.09.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 5,6 mió.kr. Bert 5 t.kr. eru nýttar í 2005.

Sambært landsstýrismanninum var ætlanin um skúladepil í Marknagili til politiska viðgerð í 2005. Løgtingslóg um at byggja miðnámsskúla í Marknagili er síðani samtykt í mai 2006.

### *6.2.8 Studningur til læarupláss (lógarbundin játtan) 7.23.3.14.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 15,3 mió.kr. Minninýtslan er 5 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum stóðst minninýtslan av:

*at* lærlingatilgongdin er ymisk frá ári til ár. Seinasta 10 ára skeiðið er tilgongdin farin úr 173 í 1996 upp í 306 í 2002 og niður aftur í 234 í 2005. Tað ger tað sera trupult at rokna út, hvørjar útreiðslurnar til lønarendurgjald fara at verða.

*at* talið á lærlingum, sum komu í læru í 2004 og 2005, var um 10% minni enn roknað var við.

*at* eingi skúlaskeið eru líka mong ella líka long í teimum umleið 70 yrkisútbúgvingunum.

*at* Yrkisdeplin kann ikki stýra, nær lærlingar verða kallaðir inn til skúlaskeiðini. Tað gera læruplássini.

Landsstýrismaðurin hevur greitt frá, at tá ið Yrkisdeplin tók yvir avgreiðsluna av lønarendurgjøldum, vóru nógv gjøld ikki avgreidd fleiri ár aftur í tíðina. Tað hevur Yrkisdepilin lagt upp fyri, tá ið fíggjarætlanir eru lagdar. Tað sær út til, at gjøldini nú eru avgreidd, og er tað eisini tí, at minninýtslan er so stór í ár.

Yrkisdepilin hevur bert havt 5 ár at royna seg at gera fíggjarætlan fyri hesar útreiðslur, og hevur ikki havt neyðuga talgrundarlagið fyri slíka torgreidda útrokning. Hildið verður, at við tí talgrundarlagi og teimum royndum Yrkisdeplin nú hevur, kunna neyvari útrokningar verða gjørdar í framtíðini.

### *6.2.9 Almanna- og Heilsuskúli Føroya (løgujáttan) 7.23.6.08.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 1 mió.kr. Eingin peningur er nýttur í 2005.

Sambært landsstýrismanninum varð gjørt av, at skúlin skuldi verða partur í skúladeplinum í Suðuroynni, og tí er eingin peningur nýttur.

### *6.2.10 Lestrarstuðul (lógarbundin játtan) 7.23.7.04.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 73.904 t.kr., netto. Minninýtslan er 3.218 t.kr. netto.

Á fíggjarlógini 2005 vóru upprunaliga játtaðar 67.304 t.kr., netto. Á eykajáttanarlógini september 2005 varð játtanin hækkað 6,6 mió.kr. Fíggjarnevndin helt játtanina hækka alt ov nógv og mælti landsstýrismanninum til at endurskoða skipanina.

Í juni 2006 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at hann hevur sett eina nevnd at endurskoða stuðulsskipanirnar.

Niðanfyri hevur Landsgrannskoðanin sett upp roknskapartøl fyri árini 2001–2005:

t.kr.

| | **2001** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** | **Játtan 2006** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Stuðul | 55.015 | 57.034 | 60.838 | 67.439 | 73.270 | 79.140 |
| Útlán | 8.528 | 8.555 | 8.370 | 7.542 | 8.980 | 8.600 |
| Stuðul/útlán tils. | 63.543 | 65.589 | 69.208 | 74.981 | 82.250 | 87.740 |
| Afturgjaldan | - 7.418 | - 7.889 | - 7.468 | - 9.185 | - 9.776 | - 8.600 |
| Rentuinntøkur | - 2.783 | - 2.262 | - 2.050 | - 986 | - 1.788 | - 1.500 |
| Inntøkur tils. | - 10.201 | - 10.151 | -9.518 | - 10.171 | - 11.564 | - 10.100 |
| **Nettoútreiðslur** | **53.342** | **55.438** | **59.690** | **64.810** | **70.686** | **77.640** |

Sambært talvuni eru útreiðslurnar til stuðul og lán hækkaðar 18,7 mió.kr. frá 2001 til 2005 (umleið 30%). Í sama tíðarskeiði eru inntøkurnar hækkaðar 1,4 mió.kr. (13%).

### *6.2.11 Ungdóms- og bygdahús 7.24.1.25.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 200 t.kr. Eingin peningur er nýttur í 2005.

Sambært landsstýrismanninum vóru ongar verkætlanir so mikið áleiðis komnar, at stuðul kundi verða goldin út.

Í 2006 er játtanin 200 t.kr. Ongin peningur er nýttur síðani 2003.

### *6.2.12 Sjónleikarhús 7.24.2.16.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 225 t.kr. Eingin peningur er nýttur í 2005.

Sambært landsstýrismanninum vóru ongar verkætlanir so mikið áleiðis komnar, at stuðul kundi verða goldin út.

Í 2006 er játtanin 125 t.kr.

### *6.2.13 Savnshús (løgujáttan ) 7.24.3.09.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 500 t.kr. Eingin peningur er nýttur í 2005.

Sambært landsstýrismanninum kom verkætlanin ikki so langt, sum ætlanin var.

Í 2006 er játtanin eisini 500 t.kr. Sambært landsroknskapinum í oktober 2006 er einki brúkt.

### *6.2.14 Føroya Náttúrugripasavn (løgujáttan) 7.24.3.14.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 500 t.kr. Eingin peningur er nýttur í 2005.

Sambært landsstýrismanninum kom verkætlanin ikki so langt, sum ætlanin var.

Í 2006 er eingin peningur játtaður á hesari kontu.

### *6.2.15 Kirkjubømúrurin (løgujáttan) 7.24.3.23.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 1 mió.kr. Minninýtslan er 570 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum kom verkætlanin ikki so langt, sum ætlanin var.

### *6.2.16 Ítróttaanlegg 7.24.6.12.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 1.067 t.kr. Minninýtslan er 521 t.kr.

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í oktober 2005 umrøddu vit, at í frágreiðing um "Ymsar stuðulsveitingar á mentanarøkinum", sum landsstýrismaðurin legði fram 16. november 2004 til aðalorðaskiftis - Lm. nr. 101-2/2004 – stóð m.a.:

> ***Í løtuni eru givnar tilsagnir um stuðul fyri umleið kr. 7 mió, og tá er ætlaða ítróttahøllin í Sandoy íroknað.*** *Hesar tilsagnir eru givnar við fyrivarni fyri, at ávísar nærri ásettar treytir verða loknar. Søkt er harafturat um stuðul fyri aðrar umleið kr. 20 mió.*

Vísandi til hesa frágreiðing spurdi Landsgrannskoðanin, hvørja lógarheimild landsstýrismaðurin hevði at veita tilsagnir um stuðul, m.a. til ítróttahøll á Sandoynni.

Í august 2005 svaraði landsstýrismaðurin, at talan var um somu mannagongd, ið hevur verið nýtt seinastu nógvu árini, har stuðul verður játtaður, og í tilsøgnini stendur m.a. eitt fyrivarni um, at stuðulin er treytaður av, at játtan er tøk til endamálið.

Landsgrannskoðanin helt ikki, at ein landsstýrismaður kann geva tílíkar tilsagnir uttan frammanundan at hava fingið heimild frá Løgtinginum. Landsgrannskoðanin vísti í hesum sambandi til Ll. nr. 81 frá 8. mai 2003 "um broyting í løgtingslóg um studningslán til ellis- og røktarheim". Sambært hesari lógarbroyting fekk landsstýrismaðurin heimild at veita tilsagnir í árunum 2003 - 2005 upp á í mesta lagi 57 mió.kr. Landsgrannskoðanin heldur hesa lóg vera dømi um, hvussu lóggivið kann vera um tilsagnir tvørtur um fíggjarár.

Sambært landsstýrismanninum arbeiðir Mentamálaráðið við at gera lóg um ítróttaanlegg, og tekur spurningin um at geva tilsøgn um stuðul tvørtur um fíggjarár við í viðgerðina, m.a. við støði í Ll. nr. 81/2003.

Sambært landsstýrismanninum verður uppskot til løgtingslóg um ítróttaanlegg lagt fyri tingið í komandi tingsetu (2006/07).

## 6.3 Aðrar viðmerkingar

### *6.3.1 Próvtøkur (rakstrarjáttan) 7.23.1.31.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 5.899 t.kr. á høvuðskontu 7.23.1.31. “Próvtøkur (rakstrarjáttan)”

Í viðmerkingunum til fíggjarlógina verður Løgtingið kunnað um, at *“játtanin verður brúkt til løn og amboð fyri próvtøkugerð og próvdøming, umframt at rinda fyri ferðaútreiðslur í sambandi við próvtøkuna.”* Sambært landsroknskapinum er talan um hesar útreiðslur:

| | kr. |
|---|---:|
| Mánaðarlønt | 977.579 |
| Samsýningar, viðbøtur o.a. | 3.245.944 |
| Arbeiðsmarknaðargjøld | 73.344 |
| Eftirlønir | 91.212 |
| Ferðing og flutningur, alment sett – innanlands | 170.812 |
| Ferðing og flutningur, alment sett – uttanlands *) | 36.477 |
| Ferðing og flutningur, onnur | 247.617 |
| Umboðan | 3.150 |
| Keyp av pappíri og prentlutum | 20.130 |
| Keyp av vørum annars | 87.843 |
| Telefon | 1.387 |
| Postgjøld | 61.506 |
| Trygging | 5.616 |
| Keyp av tænastum í sambandi við edv og kunningartøkni | 41.934 |
| Keyp av tænastuveitingum annars | 605.920 |
| Telduútbúnaður og edv-menning | 119.030 |
| Útreiðslugreiddar veitingar | 215 |
| **Tilsamans** | **5.789.716** |

* m.a. ferðaútreiðslur til ein undirvísingarleiðara í Mentamálaráðnum.

Av útreiðslunum eru um 1,1 mió.kr. lønarútreiðslur til tey 4 starvsfólkini á Próvstovuni á aðalskrivstovuni í Mentamálaráðnum. Um 550 t.kr. tykjast vera vanligar umsitingarútreiðslur, serliga pappír, keyp av vørum annars, edv og kunningartøkni og telduútbúnaður og edv-menning.

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina er játtanin til Mentamálaráðið m.a. ætlað til at skipa fyri, at tær próvtøkur og royndir, sum ásettar eru í lóggávuni, verða hildnar.

Til og við fíggjarárið 2003 var kostnaðurin til lønir fyri at gera próvtøkutilfar rindaður av rakstrarjáttanini til Mentamálaráðið. Í 2004 varð játtanin flutt til høvuðskontu 7.23.1.31. “Próvtøkur”. Sambært landsstýrismanninum var endamálið at samla allan kostnaðin í sambandi við próvtøkugerð á eina kontu, og harvið skapa betri gjøgnumskygni fyri, hvat próvtøkugerðin veruliga kostar.

Landsgrannskoðanin hevur spurt, um ikki lønar- og umsitingarútreiðslurnar frammanfyri áttu at verið hildnar av játtanini til Mentamálaráðið, ið hevur ábyrgdina av Próvstovuni.

Sambært landsstýrismanninum er tað ein spurningur, um útreiðslur til Próvstovuna kunnu roknast sum ein útreiðsla, ið eigur at teingjast at einum stjórnarráð, ella skal verða víst sum ein sjálvstøðug útreiðsla, soleiðis at politiski myndugleikin beinleiðis sær, hvat uppgávan kostar.

Sum umrøtt frammanfyri verða lønarútreiðslur til tey 4 starvsfólkini á Próvstovuni á aðalskrivstovuni í Mentamálaráðnum bókaðar á høvuðskontu 7.23.1.31. “Próvtøkur”, og ikki

longur á høvuðskontu 7.23.2.01. “Mentamálaráðið ”. Sambært starvsfólkayvirlitinum í viðmerkingunum til fíggjarlógina 2006 eru 25 fulltíðarstørv í Mentamálaráðnum, við einum lønarparti upp á 11,1 mió.kr. Men einki starvsfólkayvirlit er í viðmerkingunum til fíggjarlógina á høvuðskontu 7.23.1.31. “Próvtøkur”.

Sambært landsstýrismanninum í juni 2006 verða stig tikin til at gera eitt starvsfólkayvirlit til høvuðskontu 7.23.1.31. “Próvtøkur”.

Landsgrannskoðanin kann viðmerkja, at í fíggjarlógaruppskotinum 2007 er einki starvsfólkayvirlit.

### 6.3.2 *Spjaðing av umsitingar-/fyrisitingarútreiðslum*

Landsgrannskoðanin hevur millum ár og dag gjørt fleiri stovnar varugar við, at tað er ikki rætt at blanda umsitingar-/fyrisitingarútreiðslur á einum stovni uppí aðrar játtanir, ið ein stovnur ella eitt aðalráð umsitur.

Á fíggjarlógini 2005 vóru játtaðar 13.802 t.kr. á høvuðskontu 7.11.1.09. “Mentamálaráðið ”. Í viðmerkingunum til fíggjarlógina stendur m.a.:

> *Mentamálaráðið situr fyri undirvísingarmálum, gransking, mentamálum, kirkjumálum, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi. Stjórnarráðið hevur, undir landsstýrismanninum, yvirskipaða, fyrisitingarliga og fíggjarliga eftirlitið við teimum stovnum, sum eru undir ráðnum, og yvirskipaðu ráðleggingina viðvíkjandi øllum málsøkjum, nevnd eru omanfyri. Mentamálaráðið er bygnaðarliga skipað við stápi og trimum deildum.*

Samamumtikið ivast Landsgrannskoðanin í, um játtanin til umsitingar/fyrisitingarútreiðslur til Mentamálaráðið í nóg stóran mun er gjøgnumskygd.

Vísandi til viðmerkingar okkara til høvuðskontu:

- 7.11.1.14. “Viðlíkahald”,
- 7.23.1.07. “Ymsar felagsútreiðslur”,
- 7.23.2.01. “Fólkaskúlin”, og
- 7.23.1.31. “Próvtøkur”

er spurningurin, um játtanin til høvuðskontu 7.23.2.01. “Mentamálaráðið” í veruleikanum átti at verið 4-5 mió.kr. hægri.

Sambært landsstýrismanninum fer Mentamálaráðið at viðgera frammanfyri framførdu sjónarmið. Landsgrannskoðanin vil mæla til, at tað verður gjørt í samráð við Fíggjarmálaráðið.

Spurningurin um at spjaða umsitingar- og fyrisitingarútreiðslur er gjøllari viðgjørdur í frágreiðingini undir fíggjarmálum.

### 6.3.3 *Ymiskar løgujáttanir*

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í oktober 2005 vístu vit á, at seinastu árini er tað ofta komið fyri, at meira ella minni ítøkiligar løgujáttanir verða settar á fíggjarlógina, og tað tykist, sum fleiri av hesum játtanum, og serstakliga játtanin til Miðnámsskúlan í Suðuroy, síðani verða nýttar til at tryggja “útreiðsluneutralitet”, soleiðis at løgujáttanir verða lækkaðar á eykajáttanarlógum fyri at nýta peningin til rakstrarútreiðslur.

Niðanfyri hevur Landsgrannskoðanin sett upp játtanar- og roknskapartøl seinastu árini fyri ymiskar løgujáttanir:

mió.kr.

| | Játtanartøl | | | | | | Roknskapartøl | | | | Játtan | Uppskot |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | 2003 F-lóg | 2003 Ey-lóg | 2004 F-lóg | 2005 F-lóg | 2005 Ey-lóg | **Tilsamans** | 2003 | 2004 | 2005 | **Tilsamans** | 2006 | 2007 |
| Skúladepilin í Suðuroy | 9,7 | -7,1 | 4,5 | 23 | -10,2 | **19,9** | 1,8 | 4,3 | 1,5 | **7,6** | 18 | 35 |
| Tekniski skúli í Klaksvík | 1 | -0,5 | 1 | 2,6 | - | **4,1** | 0,3 | - | 0,3 | **0,6** | 5 | 5 |
| Fiskivinnuskúlin | 1,2 | -1 | 1 | 4,6 | - | **5,8** | - | 0,3 | 0,3 | **0,6** | 8 | 9,8 |
| Skúladepil í Marknagili | - | - | 3 | 5,6 | - | **8,6** | - | 0,1 | - | **0,1** | 4 | 1 |
| Almanna- og heilsuskúli | - | - | 1 | 1 | - | **2,0** | - | - | - | **0,0** | 1,2 | - |
| Bókasøvn | 0,5 | - | 1,5 | 1,5 | - | **3,5** | - | 0,4 | 1,5 | **1,9** | 1 | 0,5 |
| Savnshús | - | - | - | 0,5 | - | **0,5** | - | - | - | **0,0** | 0,5 | - |
| Føroya Náttúrugripasavn | - | 0,5 | - | 0,5 | - | **1,0** | 0,5 | - | - | **0,5** | - | - |
| Kirkjubømúrurin | 2,2 | - | 1,6 | 1 | - | **4,8** | 1,7 | 1,1 | 0,4 | **3,2** | 1 | 0,2 |
| **Tilsamans** | 14,6 | -8,1 | 13,6 | 40,3 | -10,2 | **50,2** | 4,3 | 6,2 | 4,0 | **14,5** | **38,7** | **51,5** |

Sambært talvuni eru árini 2003–2005 upprunaliga játtaðar 68,5 mió.kr. til ymiskar løgujáttanir. Við eykajáttanarlógum eru játtanirnar síðani lækkaðar 18,3 mió.kr., til 50,2 mió.kr. Nýtslan hesi árini er bert 14,5 mió.kr.

Landsgrannskoðanin ivast í, um tað er rætt ár um ár at játta pening til meira ella minni óítøkiligar íløgujáttanir.

Tað tykist, sum ætlanin var, at sama mannagongd skuldi halda fram í 2006. Í uppskotinum til eykajáttanarlóg apríl 2006 var ætlanin at skarva 5,5 mió.kr. av ymiskum løgujáttanum til onnur endamál.

Í álitinum til eykajáttanarlógina helt Fíggjarnevndin *"tað ikki vera rætt at lækka játtanina til hesar íløgur, í ongum føri er talan um sparingar, men bara at útseta ein íløgu. Løgtingið hevur fyri stuttum avsett hesar upphæddir, tí Løgtingið metir, at rætt er at fremja hesar íløgur. Nevndin heldur tað tí ikki vera rætt, at landsstýrismaðurin her fáar mánaðir eftir, at fíggjarlógin er viðtikin, broytir hesar játtanir."* Broytingaruppskotið frá Fíggjarnevndini varð samtykt, og løgujáttanirnar vórðu ikki lækkaðar.

Sambært landsstýrismanninum verða raðfestar íløgur á ávísum økjum ikki veruleiki, og tí kemur játtanin at standa næstan óbrúkt. Er tørvur á játtan til annað øki, er mannagongdin, at játtanin, ið væntandi ikki verður nýtt tað árið, verður minkað so mikið, sum tørvur er á, til annað endamál. Á henda hátt verða krøvini frá Fíggjarmálaráðnum um útreiðsluneutralitet gingin á møti. Ofta hevur Fíggjarnevndin havt sama ynski um útreiðsluneutralitet.

Spurningurin um útreiðsluneutralitet er gjøllari viðgjørdur í frágreiðingini undir fíggjarmálum.

# 7 INNLENDISMÁL

## 7.1 Meirnýtsla

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Meirnýtsla |
|---|---|---|---|
| Innlendismálaráðið (rakstrarjáttan) | 7.565 | 9.391 | 1.826 |
| Skógrøkt Landsins (rakstrarjáttan) | 2.680 | 2.848 | 168 |
| Strandfaraskip Landsins (landsfyritøka) | 65.193 | 79.949 | 14.756 |

### *7.1.1 Innlendismálaráðið (rakstrarjáttan) 15.11.1.39.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 7.565 t.kr. Meirnýtslan er 1.826 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum var roknað við, at Tinglýsingarstovan varð yvirtikin í seinnu helvt av 2005, og tí vóru nettoinntøkurnar mettar til 2 mió.kr. Yvirtøkan varð ikki framd í 2005, og tað er grundin til meirnýtsluna hjá Innlendismálaráðnum.

Tinglýsingarstovan varð yvirtikin 1. februar 2006, og hevur fingið egna høvuðskontu á løgtingsfíggjarlógini 2006.

### *7.1.2 Skógrøkt Landsins (rakstrarjáttan) 15.33.2.04.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 2.680 t.kr. Meirnýtslan er 168 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum varð viðarlundin í Langadali í Hoyvík rakt av einum umfatandi skriðulopi, og neyðugt var at fremja ávíst eyka arbeiði við at taka upp eftir lopið, og til at tryggja økið.

### *7.1.3 Strandfaraskip Landsins (landsfyritøka) 15.38.2.01.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 65,2 mió.kr. Meirnýtslan er 14,8 mió.kr.

Á hesi høvuðskontu er eisini ein inntøkujáttan 15 mió.kr., tí ætlanin var at einskilja farmaleiðir í 2005. Einskiljingin fór fram í 2006, og tí er ongin inntøka bókað í 2005.

## 7.2 Minninýtsla

### *7.2.1 Lánsafturgjald 15.11.2.07.*

Á fíggjarlógini var ein inntøkujáttan 179 t.kr., ætlað til afturgjald av lánum. Meirinntøkan er 613 t.kr.

Hesi lán eru veitt kommununum til at fíggja keyp av lendi til sethúsaøki, at gera sethúsaøki byggibúgvin, at útstykkja, til vegagerð og til at leggja kloakkir. Sambært landsstýrismanninum hevur ein skuldari goldið alla sína skuld inn aftur í landskassan í 2005.

### *7.2.2 Træplanting 15.33.2.05.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 450 t.kr. Minninýtslan er 262 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum vóru ikki so nógvar skikkaðar umsóknir í 2005.

### *7.2.3 Strandfaraskip Landsins (løgujáttan) 15.38.2.02.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 32,25 mió.kr. netto. Minninýtslan er 1,5 mió.kr.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 03. Suðuroyarskip | 36.500 | 30.953 | 5.547 |
| 11. Søla av Smyrli | - 6.750 | - 2.635 | - 4.115 |
| 13. Landgongd til nýggja Smyril | 2.500 | 2.447 | 53 |
| **Tilsamans** | **32.250** | **30.765** | **1.485** |

Undirkonta 03. Suðuroyarskip: Strandfaraskip Landsins fingu umleið 32 mió.kr. aftur í dagbótum, av tí at skipið var so nógv seinkað. Sambært landsstýrismanninum var *"hinvegin fitt av peningi nýttur til at hava eitt so gott byggieftirlit sum møguligt. At tað umfatandi byggieftirlitið var ein skilagóð 'disposition', kann eingin ivi vera um, nú endaliga er gjørt upp. Samlaði kostnaðurin fyri Suðuroyarskipið gjørdist umleið 301 mió.kr., um forkanningar og prosjektering í tíðarskeiðinum 1999-2002 verða tiknar við í samlaða kostnaðin."*

Landsgrannskoðanin hevur í september 2006 heitt á landsstýrismannin um at útvega ein "byggiroknskap" fyri Suðuroyarskipið, ið neyvt útgreinar, hvussu nógvur peningur tilsamans er brúktur, íroknað byggieftirlit o.a., samanborið við tað, ið samlaða verkætlanin sambært sáttmála/kostnaðarmeting skuldi kosta.

Undirkonta 11. Søla av Smyrli: Á fíggjarlógini var mett, at sølan av "gamla Smyrli" fór at geva umleið 1 mió.$. Sambært landsstýrismanninum var ikki møguligt at fáa henda prís fyri skipið, bæði vegna vánaliga marknaðin fyri gamlar ferjur og av ótryggleikanum um, nær skipið kundi verða latið einum nýggjum eigara. Tá ið skipið varð selt, vórðu inntøkuførdar umleið 2,6 mió.kr. netto, sum er um 4,1 mió.kr. minni enn ætlað.

Undirkonta 13. Landgongd til nýggja Smyril: Í uppskotinum til eykajáttanarlóg mars 2005 varð skotið upp at hækka játtanina 3 mió.kr. til at gjalda landgongdina í Tórshavn til nýggja Suðuroyarskipið. Fíggjarnevndin setti fram broytingaruppskot um at játta 2,5 mió.kr. Broytingaruppskotið varð samtykt.

# 8 ALMANNAMÁL

## 8.1 Meirnýtsla

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Meirnýtsla |
|---|---|---|---|
| Vanlukkutryggingarráðið (rakstrarjáttan) | 322 | 454 | 132 |
| Barnaforsorg (lógarbundin játtan) | 30.469 | 34.113 | 3.644 |
| Barnap. veittur í forskoti (lógarbundin játtan) | 100 | 883 | 783 |
| Ættleiðingarstuðul (lógarbundin játtan) | 350 | 550 | 200 |
| Dagpeningaskipanin (lógarbundin játtan) | 50.172 | 52.306 | 2.134 |
| Vanlig forsorg (lógarbundin játtan) | 142.571 | 143.410 | 839 |
| Fólkapensjón (lógarbundin játtan) | 368.466 | 372.376 | 3.910 |
| Fyritíðarpensjón (lógarbundin játtan) | 193.947 | 195.892 | 1.945 |

### *8.1.1 Vanlukkutryggingarráðið (rakstrarjáttan) 8.21.1.13.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 322 t.kr. Meirnýtslan er 132 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum vóru inntøkurnar frá Tryggingarfelagnum Føroyar minni, enn mett var. Inntøkurnar frá Tryggingarfelagnum eru tengdar at talinum av málum, og málini vóru færri, enn roknað var við.

### *8.1.2 Barnavernd (lógarbundin játtan) 8.21.3.01.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 30.469 t.kr. Meirnýtslan er 3.644 t.kr.

Á eykajáttanarlógini november 2005 varð skotið upp at hækka játtanina 1.907 t.kr. Sambært Fíggjarnevndini var talan um vanligar framrokningar, sum mega verða staðfestar í roknskapinum. Broytingaruppskot um at strika eykajáttanina varð samtykt.

Spurdur, hví uppskotið um eykajáttan varð lagt fyri Løgtingið so seint, hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at útreiðslurnar til barnaforsorg eru skiftandi frá mánaði til mánað, og tí varð hildið rættast at bíða til seinri í árinum at biðja um eykajáttan, tá ein meira nágreinilig meting kundi verða gjørd, um játtanin fór at halda.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 01. Frípláss | 2.064 | 1.220 | - 844 |
| 02. Tilmæli frá barnaverndarnevndum v.m. | 28.205 | 32.818 | 4.613 |
| 03. Tilnevndi løgfrøðingurin | 200 | 75 | -125 |
| **Tilsamans** | **30.469** | **34.113** | **3.644** |

Meirnýtslan stavar frá undirkontu 02. “Tilmæli frá barnaverndarnevndum v.m.”, har útreiðslurnar eru 4.613 t.kr. hægri, enn mett var. Í 2004 vóru hesar útreiðslur 30,1 mió.kr., sum eru 1,9 mió.kr. hægri enn játtanin 2005. Tað kundi bent á, at játtanin 2005 upprunaliga var ov lítil.

Í september 2006 ger landsstýrismaðurin vart við, at barnaforsorgin hevur verið ein av teimum kontunum, ið hevur verið truplast at meta um, m.a. tí at kommunurnar reka økið, og landið rindar.

### 8.1.3 Barnapeningur veittur í forskoti (lógarbundin játtan) 8.21.3.04.

Á fíggjarlógini vóru játtaðar netto 100 t.kr. Meirnýtslan er 782 t.kr. Talan er um eina netto-játtan, sum hevur tvær undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 01. Forskotsrindan av barnapeningi | 11.200 | 11.437 | 237 |
| 02. Innkrevjing av forskotsrindaðum barnapeningi | -11.100 | -10.555 | 545 |
| **Netto, tilsamans** | **100** | **883** | **782** |

Sambært landsstýrismanninum er torført hjá Toll- og Skattstova Føroya at krevja peningin inn, m.a. tí talan er um alt fleiri útlegg, har gjaldsskyldugi býr uttanfyri Norðurlond.

### 8.1.4 Ættleiðingarstuðul (lógarbundin játtan) 8.21.3.13.

Á fíggjarlógini vóru játtaðar netto 350 t.kr. Meirnýtslan er 200 t.kr.

Á eykajáttanarlógini november 2005 varð skotið upp at hækka játtanina 100 t.kr. Sambært Fíggjarnevndini var talan um vanligar framrokningar, sum mega verða staðfestar í roknskapinum. Broytingaruppskot um at strika eykajáttanina varð samtykt.

Spurdur, hví uppskotið um eykajáttan varð lagt fyri Løgtingið so seint, hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at ikki er møguligt frammanundan at spáa um talið av umsóknum.

### 8.1.5 Dagpeningaskipanin (lógarbundin játtan) 8.21.4.01.

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 50,2 mió.kr. Meirnýtslan er 2,1 t.kr.

Á eykajáttanarlógini september 2005 varð skotið upp at hækka játtanina 1,1 mió.kr., vísandi til at *"talið av umsóknum er vaksið, harumframt eru sjúkrameldingar við langari sjúkralegu. Eisini viðvíkjandi sjálvstøðugum vinnurekandi er talan um ein stóran vøkstur í teimum fyrstu 6 mánaðunum í mun til sama tíðarskeið í 2004. Rákið, sum fyrr hevur víst seg, at økt arbeiðsloysi minkar um útreiðslurnar hjá dagpeningaskipanini, sæst ikki aftur í løtuni."*

Fíggjarnevndin helt ikki grundgevingar landsstýrismansins vera nøktandi, og tók ikki undir við umbønini. Broytingaruppskot um at strika eykajáttanina varð samtykt.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 01. Løntakarar | 51.496 | 53.425 | 1.929 |
| 02. Sjálvstøðug og húsarhaldsfólk | 1.580 | 2.169 | 589 |
| 04. Gjald fyri læknaváttanir | 840 | 530 | - 310 |
| 09. Arbeiðsgevarans partur, dagpeningur | - 3.744 | - 3.818 | - 74 |
| **Tilsamans** | **50.172** | **52.306** | **2.134** |

Sambært landsstýrismanninum hava fleiri persónar fingið dagpening í fleiri dagar í 2005 enn í 2004.

### 8.1.6 Vanlig forsorg (lógarbundin játtan) 8.21.7.01.

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 142,6 mió.kr. Meirnýtslan er 839 t.kr. netto.

Á fíggjarlógini vóru útreiðslurnar upprunaliga mettar til 136 mió.kr. Á eykajáttanarlógini september 2005 varð játtanin hækkað 6,6 mió.kr.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

mió.kr.

| Undirkonta | F-lóg | EYJ-lóg sep. 2005 | Játtan | Rokn-skapur | Frávik |
|---|---|---|---|---|---|
| 01. Fyribils hjálp § 9 | 13,0 | - 2,8 | 10,1 | 11,6 | 1,5 |
| 02. Varandi veiting § 13 | 2,2 | - 0,2 | 2,0 | 1,7 | - 0,3 |
| 03. Stakútreiðslur § 15 | 4,3 | - 1,3 | 3,0 | 3,2 | 0,2 |
| 04. Meirútreiðslur brekað barn § 17 | 47,4 | 1,0 | 48,4 | 49,7 | 1,3 |
| 05. Endurbúgving § 18 | 19,2 | 1,8 | 21,0 | 22,3 | 1,3 |
| 06. Hjálparamboð v.m. § 18 | 40,2 | 4,4 | 44,6 | 42,0 | - 2,6 |
| 07. Arbeiðsloysisforsorg § 9, stk. 2 | 9,4 | 3,7 | 13,2 | 12,4 | - 0,8 |
| 08. Hjálp til viðgerð o.a. á serligum stovnum § 16 | 0,3 | - | 0,3 | 0,5 | 0,2 |
| Tilsamans | 136,0 | 6,6 | 142,6 | 143,4 | 0,8 |

Á eykajáttanarlógini november 2005 varð skotið upp at hækka játtanina til "Stakútreiðslur § 15" 400 t.kr. og játtanina til "Meirútreiðslur brekað barn § 17" 1.530 t.kr. Sambært Fíggjarnevndini var talan um vanligar framrokningar, sum mega verða staðfestar í roknskapinum sum yvirtrekk. Broytingaruppskot um at strika eykajáttanina varð samtykt.

Spurdur, hví uppskotið um eykajáttan varð lagt fyri Løgtingið so seint, hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at eftir nøkrum fáum mánaðum kunnu viðurskiftini verða broytt, so at metingarnar ikki halda. Landsstýrismaðurin heldur tað hava týdning at vísa á, at hann bað um eykajáttan bæði í september og í november 2006.

Undirkonta 04 "Meirútreiðslur brekað barn § 17"

Útreiðslurnar á kontuni "Meirútreiðslur brekað barn § 17" eru hækkaðar nógv, og niðanfyri hevur Landsgrannskoðanin sett upp roknskapartølini 2000-2005:

t.kr.

| | **2000** | **2001** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** | Játtan **2006** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Løn v.m. (stuðulsfólk) | 10.684 | 12.507 | 13.274 | 16.410 | 20.383 | 23.338 | |
| Endurgjald fyri inntøkumiss | 4.891 | 5.403 | 6.271 | 6.207 | 6.502 | 9.131 | |
| Heilivágur | 2.489 | 3.875 | 3.859 | 3.958 | 4.150 | 5.464 | |
| Stuðulsfólk, Tórsh. kommuna | - | - | - | 5.379 | 5.478 | 5.922 | |
| Annar stuðul | 3.026 | 3.888 | 4.254 | 4.496 | 5.531 | 5.842 | |
| **Tilsamans** | **21.090** | **25.673** | **27.658** | **36.450** | **42.044** | **49.697** | **18.592** |

Sambært talvuni eru útreiðslurnar hækkaðar úr umleið 21 mió.kr. í 2000 til slakar 44 mió.kr. (110%) í 2005, um sæð verður burtur frá útreiðslunum til stuðlar hjá brekaðum børnum í Tórshavnar kommunu, sum áður vórðu bókaðar á høvuðskontu "Barnaforsorg".

Sambært landsstýrismanninum er talan um lógarbundnar útreiðslur, sum hava verið truplar at tálma.

Frá fíggjarárinum 2006 er játtanin á fíggjarlógini minkað nógv, tí umsitingin av stuðlum til børn partvíst er løgd til kommunurnar, í sambandi við at § 5 í dagstovnalógini varð broytt sambært Ll. nr. 152/2005.

Útreiðslurnar av stuðlunum, sum eru undir Almannastovuni, eru lagdar í eina rakstrarjáttan, høvuðskontu 8.21.3.08. "Børn og ung: Stuðlar til børn".

Í 2006 verða tó framvegis útreiðslur til stuðlar bókaðar á kontuni "Meirútreiðslur brekað barn § 17", tí talan er um eina skiftisskipan. Uppsagnartíðirnar hjá verandi stuðulsfólkum eru millum 1 og 6 mánaðir.

Undirkonta 06 "Hjálparamboð v.m. § 18"

Útreiðslurnar til "Hjálparamboð v.m. § 18" eru hækkaðar nógv, og niðanfyri hevur Landsgrannskoðanin sett upp roknskapartølini 2000-2005:

t.kr.

| | **2000** | **2001** | **2002** | **2003** | **2004** | **2005** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Kostískoyti o.a. | 774 | 1.021 | 1.184 | 1.469 | 1.647 | 1.838 |
| Heilivágur | 3.595 | 3.622 | 6.622 | 6.244 | 6.068 | 6.470 |
| Tannviðgerð | 823 | 1.158 | 571 | 686 | 872 | 868 |
| Protesur | 926 | 1.165 | 1.046 | 1.109 | 1.255 | 1.573 |
| Ortopedisk fótbúnaður | 855 | 758 | 1.563 | 1.320 | 1.583 | 2.036 |
| Hoyritól | 6.778 | 4.779 | 4.343 | 9.443 | 5.926 | 6.218 |
| Bústaðarbroytingar | 1.433 | 1.273 | 2.589 | 2.592 | 2.772 | 2.825 |
| Avlamisbilar | 1.855 | 2.197 | 4.197 | 5.089 | 2.086 | 2.086 |
| Koyristólar | 1.182 | 1.900 | 2.241 | 3.870 | 2.439 | 3.078 |
| MVG | - | 1.632 | 2.494 | 3.757 | 2.773 | 2.571 |
| Annar stuðul | 8.675 | 8.023 | 10.362 | 12.811 | 12.879 | 12.426 |
| **Tilsamans** | **26.896** | **27.528** | **37.212** | **48.390** | **40.300** | **41.989** |

Sambært talvuni eru útreiðslurnar hækkaður úr umleið 27 mió.kr. í 2000, til umleið 42 mió.kr. í 2005 ella við 56%.

Í álitinum til eykajáttanarlógina september 2005 mælti Fíggjarnevndin landsstýrismanninum til at steðga vøkstrinum í útreiðslum til hjálpartól. Fíggjarnevndin helt, at landsstýrismaðurin, við reglum ásettum í kunngerð, átti at kunna hildið seg innan fyri givnar karmar.

Landsgrannskoðanin vil í hesum sambandi vísa á, at landsstýrismaðurin í september 2003 og aftur í desember 2003 boðaði frá, at "*Almannamálaráðið arbeiðir í løtuni við at gera kunngerðir á økinum, men roknað verður ikki við, at kunngerðirnar náa at fáa ávirkan á útreiðslurnar í ár.*" Eisini boðaði landsstýrismaðurin frá í november 2004, at kunngerðirnar fóru at verða lidnar í 2005.

Eftir øllum at døma hevur ikki verið arbeitt við kunngerðunum í tann mun, landsstýrismaðurin áður hevur kunnað um.

### *8.1.7 Fólkapensjón (lógarbundin játtan) 8.21.8.01.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 368,5 mió.kr. Meirnýtslan er 3,9 t.kr.

Á fíggjarlógini vóru útreiðslurnar upprunaliga mettar til 366,7 mió.kr. Á eykajáttanarlógini september 2005 varð játtanin hækkað 1,7 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum øktust útreiðslurnar til fólkapensjón meira seinna hálvárið í 2005, enn roknað var við. Vøksturin stavaði ikki frá, at tilgondin var broytt munandi, men at inntøkan, sum pensjónistar hava havt við síðuna av pensjónini, var lækkað. Tað sást aftur í útgjaldinum av viðbótum til fólkapensjónistar, sum var hækkað 6 mió.kr. í mun til 2004 – ein vøkstur upp á 6,5 %.

Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina september 2005, tá biðið varð um 1,7 mió.kr., "*er hædd tá tikin fyri broytingini í kunngerð nr. 100 frá 20. desember 1999 um stuðul til*

*heilivág, sum væntandi fær gildi 1. oktober 2005."* Ætlanin var, at henda broyting m.a skuldi minka um "persónligt ískoyti", ið er ein partur av játtanini til fólkapensjón.

Í juni 2006 kunnaði landsstýrismaðurin um, at ein broyting í K. nr. 100/1999 skuldi koma í gildi 1. oktober 2005, soleiðis at stuðul bert varð veittur til heilivág, ið fekk stuðul frá sjúkrakassunum. Tað vísti seg tó, at ávísir sjúklingar fingu stuðul eftir § 18, stk. 5, í forsorgarlógini til lívsneyðugan dýran heilivág, ið ikki fekk stuðul frá sjúkrakassa. Varð broytingin framd, hevði tað fingið sera óhepnar fylgjur fyri hesar sjúklingar. Hesin trupulleiki hevur gjørt arbeiðið at broyta kunngerðina torførari, men tað verður í løtuni kannað, hvussu tað skal verða gjørt.

Í september 2006 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at *"málið er tíverri enn ikki búgvið til at fremja ætlaðu broytingina í kunngerðini."*

### *8.1.8 Fyritíðarpensjón (lógarbundin játtan) 8.21.8.05.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 193,9 mió.kr. Meirnýtslan er 1,9 mió.kr.

Á fíggjarlógini vóru útreiðslurnar upprunaliga mettar til 199,1 mió.kr. Á eykajáttanarlógini september 2005 varð játtanin lækkað 5,2 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum eru fleiri umsóknir játtaðar í seinnu helvt av 2005, enn roknað var við.

## 8.2 Minninýtsla

### *8.2.1 Almanna- og Heilsumálaráðið (rakstrarjáttan) 8.11.1.08.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 19.365 t.kr. Minninýtslan er 465 t.kr.

Á fíggjarlógini 2005 vóru upprunaliga játtaðar 19.565 t.kr. Á eykajáttanarlógini september 2005 varð játtanin lækkað 200 t.kr.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | Játtan | Roknskapur | Frávik |
|---|---|---|---|
| 20. Vanligt virksemi | 16.230 | 16.196 | -34 |
| 22. Ráð og nevndir | 265 | 60 | -205 |
| 27. KT-økið | 2.000 | 1.780 | -220 |
| 28. Tilbúgving | 870 | 864 | -6 |
| Tilsamans | 19.365 | 18.900 | -465 |

Undirkonta 22. Ráð og nevndir: Sambært landsstýrismanninum er játtanin ætlað til sjúkrahúsráðini og til Ráðið fyri brekað. Frá 2006 eru sjúkrahúsráðini niðurløgd. Landsstýrismaðurin velur, út frá landafrøðiligum atliti, eitt sjúklingaráð við níggju limum, sum skal viðgera heildarmál um viðurskifti, ið hava týdning fyri veitingar til sjúklingar, og sum skal ráðgeva landsstýrismanninum hesum viðvíkjandi.

Undirkonta 27. KT-økið: Sambært landsstýrismanninum var avlop á lønarkarminum, tí KT-leiðarin ikki varð settur fyrr enn í august 2005.

### *8.2.2 Javnstøðunevndin (rakstrarjáttan) 8.11.1.22.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 291 t.kr. Minninýtslan er 162 t.kr.

Í juni 2005 boðaði táverandi forkvinnan í Javnstøðunevndini Almanna- og Heilsumálaráðnum frá, at hon segði seg frá sum forkvinna. Nýggjur formaður tók við í august 2005. Formansskiftið hevði við sær, at Javnstøðunevndin ikki var so virkin, og tí varð øll játtanin ikki nýtt.

### *8.2.3 Alv-skúlin (rakstrarjáttan) 8.21.1.08.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 3.125 t.kr. Minninýtslan er 225 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum varð játtanin til Alv-skúlan í 2005 hækkað, millum annað av sáttmálaviðurskiftum, leiðaraskifti og av krøvum til FHS-útbúgvingina. Teir lærarar, sum vórðu settir við skúlan, høvdu tann kravda førleikan, og sostatt var ikki neyðugt at brúka alla játtanina, sum varð sett av til førleikamenning. Heldur ikki var tørvur á at nýta handilsskúlalærarar sum stuðulslærarar, soleiðis sum roknað var við frammanundan.

### *8.2.4 Stuðul til rakstur til Barnaverndarstovuna 8.21.3.02.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 760 t.kr. Minninýtslan er 235 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum skuldi “Barnaverndarstovan”, eftir uppskotinum til barnaverndarlóg, vera ein landsstovnur, men tá lógin varð samtykt, var stovnurin vorðin felags kommunalur. Kommunufeløgini bóðu tí landsstýrismannin um stuðul til at fyrireika stovnin. Kommunufeløgini høvdu gjørt fíggjarætlan, og søkt varð um eykajáttan við fíggjarætlanini sum grundarlag (alt varð ikki tikið við). Tað vísti seg, at fyrireikingarnar vóru seinkaðar, og tí var ikki neyðugt at nýta so nógvan pening, sum roknað var við.

### *8.2.5 Børn og ung (rakstrarjáttan) 8.21.3.08.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 15.947 t.kr. Minninýtslan er 726 t.kr.

Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | F-lóg | Roknskapur | Frávik | Játtan 2006 |
|---|---|---|---|---|
| 20. Føroya Barnaheim | 8.426 | 8.191 | 235 | 7.095 |
| 21. Samdøgursstovnurin Rókin | 3.906 | 3.527 | 379 | 3.178 |
| 22. Samdøgursstovnurin Slóðin | 3.615 | 3.503 | 112 | 2.905 |
| | (15.947) | (15.221) | (726) | (13.178) |
| 23. Samdøgursstovnurin Reiðrið | - | - | - | 2.338 |
| 24. Serdagstovnur | - | - | - | 2.260 |
| 25. Stuðlar til børn | - | - | - | 16.813 |
| **Tilsamans** | **15.947** | **15.221** | **726** | **34.589** |

Sambært landsstýrismanninum boðaði leiðarin á Barnaheiminum í juni 2005 frá, at tað fór at verða trupult hjá Barnaheiminum at halda játtanina, serliga lønarkarmin. Avtalað varð, at Barnaheimið skuldi seta tiltøk í verk at tálma útreiðslunum, og samstundis fekk Barnaheimið loyvi at flyta 264 t.kr. frá rakstrarkarminum til lønarkarmin.

Viðvíkjandi undirkontu 21, Samdøgursstovnurin Rókin, hevði stovnurin eitt barn minni enn vanligt, og stovnurin hevði eisini ein næming úr Danmark í starvsvenjing í ½ ár.

### 8.2.6 Serforsorg (rakstrarjáttan) 8.21.6.01.

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 116,3 mió.kr. Minninýtslan er 1,4 mió.kr. Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | F-lóg | Fíggjarn. skjal 2004 | Játtan | Rokn-skapur | Frávik |
|---|---|---|---|---|---|
| 20. Serforsorg, vanligt virksemi | 79.273 | - 1.000 | 78.273 | 77.891 | 382 |
| 21. Stovnsuppihald í Danmark | 18.596 | - | 18.596 | 18.832 | - 236 |
| 22. Endurgjald av pensjón til føroyingar í DK | 1.287 | - | 1.287 | 1.012 | 275 |
| 23. Ferðaútreiðslur til klientar og av-varðandi | 50 | - | 50 | 48 | 2 |
| 24. Viðbót til uttanhýsis viðskiftafólk | 200 | - | 200 | 102 | 98 |
| 26. Bústaðar- og virknisdeild fyri sinnisveik | 13.971 | - | 13.971 | 13.450 | 521 |
| 27. Heim fyri heilaskadd | 3.919 | - | 3.919 | 3.528 | 391 |
| **Tilsamans** | **117.296** | **- 1.000** | **116.296** | **114.863** | **1.433** |

Á talvuni sæst, at á fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 117,3 mió.kr. Við fíggjarnevndar-skjali 5. juli 2005 varð játtanin lækkað 1 mió.kr., í sambandi við at játtanin til umsorganar-arbeiði varð hækkað.

Á eykajáttanarlógini september 2005 varð skotið upp at hækka játtanina til "Stovns-uppihald o.a. í Danmark" 1 mió.kr. Sambært Fíggjarnevndini eigur landsstýrismaðurin at finna hesa meirútreiðslu innan fyri høvuðskontuna. Broytingaruppskot um at strika eyka-játtanina varð samtykt.

### 8.2.7 Bústovnar o.a. (løgujáttan) 8.21.6.02.

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 3 mió.kr. Minninýtslan er 2,2 mió.kr.

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina skal játtanin m.a. verða nýtt til eitt størri sambýli til sinnisveik.

Sambært landsstýrismanninum varð bygginevndin fyri ætlaða sambýlið sett í september 2005. Landsstýrismaðurin væntar at fáa handað eitt tilmæli seinasta ársfjórðing 2006.

### 8.2.8 Eldrarøkt (rakstrarjáttan) 8.21.6.04.

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 246 mió.kr. Minninýtslan er 1,6 mió.kr. Talan er um eina nettojáttan, sum hevur fleiri undirkontur:

t.kr.

| Undirkonta | F-lóg | EYJ-lóg sep. 2005 | Játtan | Rokn-skapur | Frávik |
|---|---|---|---|---|---|
| 20. Røktarheim | 128.878 | - 3.291 | 125.587 | 126.178 | - 591 |
| 23. Eldrarøkt í Sandoynni | 10.807 | - | 10.807 | 10.815 | - 8 |
| 25. Heimarøktin | 105.986 | 2.458 | 108.444 | 106.635 | 1.809 |
| 27. Økisterapi | 1.109 | - | 1.109 | 724 | 385 |
| **Tilsamans** | **246.780** | **- 833** | **245.947** | **244.352** | **1.595** |

Á talvuni sæst, at á fíggjarlógini vóru upprunaliga játtaðar 246,8 mió.kr. Á eykajáttanarlógini september 2005 varð játtanin lækkað 833 t.kr., netto.

Undirkonta 25 Heimarøktin: Sambært landsstýrismanninum vístu framrokningar, sum vórðu gjørdar fyrst í árinum, at við óbroyttum virksemi fór Heimarøktin av hava eina meirnýtslu. Tí varð heitt á økisleiðararnar um at tálma nýtsluna og tillaga virksemið eftir játtanini. Miðskeiðis í august mánaði boðaði Heimarøktin frá, at Vallalíð ikki fór at lata upp fyrr enn seinni í 2005, og tí var teirra uppskot, at játtanin varð flutt frá undirkontu 20 til undirkontu 25.

Hóast játtanin varð flutt, varð tað gjørt so seint í árinum, at ikki var møguligt at seta tímatalið upp, fyri síðani at tálma nýtsluna aftur til komandi fíggjarár.

Harafturat varð starvið sum økisterapeutur ikki lýst leyst fyrr enn í oktober 2005.

### *8.2.9 Námsfrøðingar í framhaldsútbúgving (rakstrarjáttan) 8.21.9.04.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 188 t.kr. Eingin peningur er nýttur í 2005.

Sambært landsstýrismanninum vóru ongar umsóknir um stuðul til framhaldsútbúgving í 2005.

Landsgrannskoðanin undrast á, at neyðugt er við einari høvuðskontu til endamálið, og spurdur, veit landsstýrismaðurin ikki, hví henda játtan er á einari sjálvstøðugari høvuðskontu, men hann heldur ikki, at henda játtan hevur nakað við raksturin av Almanna- og Heilsumálaráðnum at gera.

Landsstýrismaðurin hevur ongar ætlanir um at gera nakrar broytingar, so leingi talan er um ein part av sáttmálanum millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag.

Í viðmerkingunum til fíggjarlógina stendur, at *"sambært galdandi sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag fyri sáttmálasettar pedagogar skal miðast ímóti, at Almannastovan árliga sendir pedagogar til framhaldsútbúgving við fullari løn."*

Sambært § 20, stk. 2, í sáttmálanum millum Føroya Pedagogfelag, Fíggjarmálaráðið, Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya *"verður miðað ímóti, at Almannastovan sendir 5 pedagogar árliga til víðari útbúgving á DLH ella á líknandi útbúgvingarskeið við fullari løn frá Almannastovuni, uttan aðrar treytir og eyka útreiðslur fyri pedagogin."*

Sambært § 1 í sáttmálanum fevnir sáttmálin um pedagogar, ið starvast:

1. á teimum stovnum, sum eru riknir sambært løgtingslóg nr. 67 um dagstovnar og dagrøkt,
2. sum dagrøktarleiðarar,
3. á sjálvsognarstovnunum Frítíðarheiminum, Dáanum og Barnaheiminum, á Næmingaheimunum á Sernámsdeplinum, á samdøgursstovnum fyri børn og ung, og fyri verkstaðarassistentar og vikarar á serforsorgarstovnum landsins,
4. sum stuðulspedagogar, leiðarar, varaleiðarar og millumleiðarar á stuðulsstovnum og stuðulsskipanum,
5. sum pedagogar á Landssjúkrahúsinum,
6. á Sernámsdeplinum,
7. sum pedagogiskir ráðgevar í barnaforsorgarmálum.

Orðingin í § 20, stk. 2, í sáttmálanum leggur upp til, at henda útreiðsla er ein útreiðsla hjá Almannastovuni. Almannastovan hevur tó einki við størstapartin av umrøddu pedagogum at gera, og Almanna- og Heilsumálaráðið umsitur játtanina.

Landsgrannskoðanin vil eisini vísa á, at sambært landsroknskapinum er so at siga einki brúkt av hesari játtan síðani 2001, og vit mæla til, at henda høvuðskonta verður endurskoðað, saman við Fíggjarmálaráðnum.

## 8.3 <u>Aðrar viðmerkingar</u>

### *8.3.1 Spjaðing av umsitingar-/fyrisitingarútreiðslum hjá Hjálpartólamiðstøðini*

Í frágreiðing til landsstýrismannin í februar 2004 umrøddu vit m.a., at sakkøn hjálp og flutningsútreiðslur verða bókaðar sum lógarbundnar útreiðslur. Vit hildu talan vera um umsitingarútreiðslur.

Í februar 2005 er landsstýrismaðurin samdur við Landsgrannskoðanini í, at hesar útreiðslur eru vanligar rakstrarútreiðslur, ið ikki eiga at verða bókaðar sum lógarbundnar útreiðslur, men sum ein partur av rakstrinum á Hjálpartólamiðstøðini. Sambært landsstýrismanninum verður málið tikið upp við Almannastovuna, og væntandi verða útreiðslurnar bókaðar á rakstrinum hjá Hjálpartólamiðstøðini frá 2006.

Sambært landsroknskapinum 2006 verða umsitingarútreiðslur tó framvegis bókaðar sum lógarbundar útreiðslur.

Í juni 2006 hevur Hjálpartólamiðstøðin greitt frá, at skulu flutningsútreiðslur og sakkøn hjálp gjaldast av rakstrarjáttanini hjá Hjálpartólamiðstøðini, krevur tað eina árliga meirjáttan til raksturin millum 1,1 og 1,3 mió.kr.

Í august 2006 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at hann fer at tillaga uppskotið til løgtingsfiggjarlóg fyri 2007 soleiðis, at hesar umsitingarútreiðslur verða fluttar av høvuðskontu 8.21.7.01. “Vanlig forsorg *(lógarbundin játtan)*” til høvuðskontu 8.21.1.07. “Hjálpartólamiðstøðin (rakstrarjáttan)”. Verður uppskotið samtykt, koma viðurskiftini í rættlag í 2007.

# 9 HEILSUMÁL

## 9.1 Meirnýtsla

t.kr.

| Høvuðskonta | Játtan | Roknskapur | Meirnýtsla |
|---|---|---|---|
| Kommunulæknaskipanin (rakstrarjáttan) | 8.940 | 9.584 | 644 |
| Apoteksverkið (landsfyritøka) | - | 765 | 765 |
| Landssjúkrahúsið (rakstrarjáttan) | 296.584 | 297.947 | 1.363 |
| Søla av íbúðabygningum (løgujáttan) | -30.000 | - | 30.000 |
| Landssjúkrahúsið, útbygging (løgujáttan) | 35.000 | 35.354 | 354 |
| Klaksvíkar Sjúkrahús (rakstrarjáttan) | 49.406 | 49.648 | 242 |
| Suðuroyar Sjúkrahús (rakstrarjáttan) | 38.329 | 38.670 | 341 |
| Eftirlønir innan heilsuverkið (lógarbundin játtan) | 10.000 | 10.390 | 390 |
| Viðgerðarstovnurin Heilbrigdi (rakstrarjáttan) | 4.710 | 5.110 | 400 |

### *9.1.1 Kommunulæknaskipanin (rakstrarjáttan) 8.20.2.04.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 8.940 t.kr. Meirnýtslan er 644 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum er størsti parturin av meirnýtsluni eftirregulering av lønum til hjálparfólk hjá kommunulæknum fyri árini 2003, 2004 og 2005. Sambært sáttmála skal Almanna- og Heilsumálaráðið rinda løn hjá hjálparfólki hjá kommunulæknaavloysarum. Ein av kommununum varnaðist ikki hesa avtalu fyrr enn við ársbyrjan 2006 og sendi tí rokning fyri fleiri ár. Almanna- og Heilsumálaráðið hevur ikki heimild at sýta at rinda hesa rokning.

Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógina 2005 *"er avtala gjørd við eina fyritøku um eina sonevnda rekrutteringsavtalu um kommunulæknar. Kostnaðurin av at loysa trupulleikan á henda hátt er varliga mettur til 270 t.kr. fyri hvønn kommunulækna."*

Í 2005 eru 125 t.kr. nýttar til lýsingar og 408 t.kr. til "formidlingsgebyr" til eitt "rekrutteringsbureau".

Á s. 72 í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í oktober 2005 høvdu vit m.a. hesar viðmerkingar:

> *"Landsgrannskoðanin heldur tað hevði verið skilabetri, um hesar útreiðslur vórðu hildnar av játtanini til Ráðið. Eitt "rekrutteringsbureau" avlastar í ávísan mun starvsfólk í Almanna- og Heilsumálaráðnum, ið hava ábyrgdina av at fyrisita játtanina. Velur Ráðið at fara yvir til eina dýrari fyrisiting, er tað væl natúrligt, at tað sæst aftur á játtanini til Ráðið.*
>
> *Á sama hátt kundi Almanna- og Heilsumálaráðið lutað ein stóran part av sínum útreiðslum millum eitt ótal av øðrum játtanum, Ráðið varðar av, t.d. lønarútreiðslur í mun til, hvussu nógvir arbeiðstímar hjá hvørjum starvsfólki eru farnir at fyrisita ymiskar játtanir t.d. heilsuátøk, útbúgving av yngri læknum, landssjúkrahúsið, serviðgerð uttanlands, almannapensjón, forsorgarhjálp, heimarøkt, ymsar studningsjáttanir, løgujáttanir o.s.fr."*

Í skrivi 19. desember 2005 kunnaði landsstýrismaðurin um, at tað ber ikki til at siga, at umsitingarliga arbeiðið í Almanna- og Heilsumálaráðnum er minkað við avtaluni við "rekrutteringsbureauet". Landsstýrismaðurin ger vart við, at játtanarslagið til kommunulæknaskipanina er rakstrarjáttan. Sambært landsstýrismanninum eru umrøddu útreiðslur vanligar rakstrarútreiðslur, sum sambært játtanarskipanini eru neyðugar útreiðslur til t.d. keyp av vørum og tænastum.

Í juni 2006 helt landsstýrismaðurin tað framvegis vera rætt, at beinleiðis útreiðslurnar til at fáa læknar til skipanina, bæði lýsingarútreiðslur og útreiðslur til rekrutteringsfyritøku, eiga at síggjast aftur á játtanini til kommunulæknaskipanina.

Sambært § 5 í Ll. nr. 28/1999 “um kommunulæknaskipan” rindar landskassin eina grundupphædd um mánaðin til kommunulæknan og til frítíðar- og langtíðaravloysara. Í lógini eru bert hesar útreiðslur nevndar, umframt at landsstýrismaðurin ásetir nærri reglur um, hvørjar útreiðslur frítíðar- og langtíðaravloysari kann fáa endurgoldnar frá landskassanum.

Landsgrannskoðanin heldur tað kanska vera tilvild, at játtanarslagið er rakstrarjáttan. Tað kundi eins væl verið “onnur játtan” ella “lógarbundin játtan”. At ongar aðrar útreiðslur eru nevndar í lógini bendir eisini á, at útreiðslurnar at umsita lógina eru fyrisitingarútreiðslur, sum skulu verða hildnar av høvuðskontu 8.11.1.08. “Almanna- og Heilsumálaráðið”.

Landsgrannskoðanin hevur í juli 2006 mælt landsstýrismanninum frá í framtíðini at bóka lýsingarútreiðslur og útreiðslur til rekrutteringsfyritøku á hesa kontu.

Í september 2006 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at hann ætlar at broyta lógina, so materiell heimild verður til at fíggja rakstrarútreiðslur.

Vísandi til viðmerkingar/grundgevingar okkara á s. 72 í frágreiðingini til løgtingsgrannskoðararnar í oktober 2005 heldur Landsgrannskoðanin framvegis, at tað hevði verið skilabetri, um hesar rakstrarútreiðslur vórðu hildnar av Almanna- og Heilsumálaráðnum.

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í oktober 2005 helt Landsgrannskoðanin ikki roknskapin vera nóg gjøgnumskygdan, um ein stovnur/ráð pilkar út nakrar av sínum útreiðslum, og spjaðir tær meira ella minni tilvildarliga út á aðrar játtanir, ið stovnurin hevur ræði á. Henda mannagongd kann eisini verða við til at fjala hækkandi fyrisitingarútreiðslur.

Landsgrannskoðanin skal eisini vísa á sjónarmiðið hjá Gjaldstovuni í oktober 2005:

> *”Vit síggja meira og meira, at stovnar, sum umsita stórar játtanir, leggja fyrisitingarútreiðslur undir hesar játtanir. Gjaldstovan heldur ikki, at hetta er beint, tí hetta verður brúkt í samanhangi við, at stovnarnir játtanarliga eru trýstir. Úrslitið er sjálvandi, at tað, sum hildið verður, er fyrisiting, í veruleikanum ikki er rætta myndin av fyrisiting, tá ið samanum kemur. Søguligar samanberingar, sum er tað týdningarmesta politiska stýringaramboðið, verða eisini órógvaðar, tí tað, sum avgerðartakarin vanliga roknar fyri góða stýring ella sparingar, í ávísan mun er bókførsla á eini aðrari høvuðskontu.”*

Spurningurin, um at spjaða fyrisitingarútreiðslur, er gjøllari viðgjørdur í frágreiðingini undir fíggjarmálum.

### *9.1.2 Apoteksverkið (landsfyritøka) 8.20.2.08.*

Á fíggjarlógini var ein nettojáttan 0 kr. Meirnýtslan er 765 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum er talan um vanligt frávik vegna ætlanaróvissu.

### *9.1.3 Landssjúkrahúsið (rakstrarjáttan) 8.20.3.04.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 296,6 mió.kr. Meirnýtslan er 1,4 mió.kr.

Á fíggjarlógini 2005 vóru upprunaliga játtaðar 290 mió.kr. Á eykajáttanarlógini mars 2005 varð játtanin hækkað 6,2 mió.kr.

Sambært landsstýrismanninum hevur Landssjúkrahúsið roynt at tálma útreiðslunum í 2005, men tað hevur verið trupult, og tí hevur á fleiri økjum verið meirnýtsla, í mun til innanhýsis ætlanina hjá sjúkrahúsinum:

1. Prísurin á olju er nærum tvífaldaður síðani 2002.
2. Landssjúkrahúsið nýtti umleið 600 t.kr. meira í olju í 2005, enn roknað var við í fíggjarætlanini.
3. Útreiðslurnar til el vórðu umleið 400 t.kr. hægri, enn roknað var við.
4. Heilivágsútreiðslurnar vórðu 1,5 mió.kr. hægri, enn mett var.

Sambært landsstýrismanninum hevur Landssjúkrahúsið gjørt stórar umleggingar og gjørt keypsavtalur um vørur til viðgerð og røkt, frakt o.a. fyri at royna at minka um vøksturin í útreiðslunum.

### *9.1.4 Søla av íbúðabygningum (løgujáttan) 8.20.3.05.*

Á fíggjarlógini var ein inntøkujáttan 30 mió.kr. Minniinntøkan er 30 mió.kr.

Talan er um ætlaða søluprísin fyri íbúðabygningarnar á Landssjúkrahúsinum, sum á fíggjarlógini 2005 og aftur í 2006 var mettur til 30 mió.kr.

Í juni 2006 kunnaði landsstýrismaðurin um, at framvegis verður arbeitt við at selja íbúðabygningarnar. Í tí sambandinum er neyðugt at gera broytingar í byggisamtyktini hjá Tórshavnar kommunu fyri økið, har bygningarnir standa. Tað tekur tíð, og er ein orsøk til, at bygningarnir ikki vórðu seldir í fjør.

Málið, at gera broytingar í byggisamtyktini fyri økið, hevur ligið frammi alment til ummælis til í januar í 2006. Ongar viðmerkingar komu til ætlaðu broytingina. Í løtuni (juni 2006) er broytingin í byggisamtyktini til viðgerðar hjá Innlendismálaráðnum.

### *9.1.5 Landssjúkrahúsið, útbygging (løgujáttan) 8.20.3.08.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 35 mió.kr. Meirnýtslan er 354 t.kr.

### *9.1.6 Klaksvíkar Sjúkrahús (rakstrarjáttan) 8.20.3.10.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 49,4 mió.kr. Meirnýtslan er 242 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum stava 167 t.kr. frá reguleringum og tíðaravmarkingum í lønum, sum Klaksvíkar Sjúkrahús ikki hevði roknað við.

### *9.1.7 Suðuroyar Sjúkrahús (rakstrarjáttan) 8.20.3.15.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 38,3 mió.kr. Meirnýtslan er 341 t.kr.

Á fíggjarlógini 2005 vóru upprunaliga játtaðar 37,1 mió.kr. Á eykajáttanarlógini september 2005 varð skotið upp at hækka játtanina 1,6 mió.kr. vísandi til *"óvæntaðar lønarútreiðslur vegna langtíðarsjúkrameldingar og vegna avtalu, sum Fíggjarmálaráðið hevur gjørt undir seinastu lønarsamráðingum um vaktargjøld til handverkarar. Príshækkingar hava verið á olju, heilivági og vørum til sjúkraviðgerð."*

Eftir fund við landsstýrismannin var Fíggjarnevndin ikki sinnað at játta hesa upphædd, men bert 1,2 mió.kr. Broytingaruppskotið varð samtykt.

Sambært landsstýrismanninum er meirnýtslan millum annað óvæntaðar útreiðslur, sum hava verið í árinum.

### *9.1.8 Eftirlønir innan heilsuverkið (lógarbundin játtan) 8.20.3.17.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 10 mió.kr. Meirnýtslan er 390 t.kr.

Á eykajáttanarlógini november 2005 varð skotið upp at hækka játtanina 405 t.kr. Sambært Fíggjarnevndini var talan um vanligar framrokningar, sum mega verða staðfestar í roknskapinum. Broytingaruppskot um at strika eykajáttanina varð samtykt.

Spurdur, hví uppskotið um eykajáttan varð lagt fyri Løgtingið so seint, hevur landsstýrismaðurin greitt frá, at tá uppskotið til eykajáttanina fyri september 2005 varð latin Fíggjarmálaráðnum, visti Almanna- og Heilsumálaráðið ikki um nakrir persónar, sum høvdu søkt um at fara á eftirløn.

### 9.1.9 *Viðgerðarstovnurin Heilbrigdi (rakstrarjáttan) 8.20.4.02.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 4,7 mió.kr. Meirnýtslan er 400 t.kr.

Sambært landsstýrismanninum keypti stovnurin í 2005 ein nýggjan bil fyri umleið 380 t.kr. Stovnsleiðarin visti ikki, at øll íløgan skuldi útreiðsluførast í keypsárinum.

## 9.2 Minninýtsla

### 9.2.1 *Heilsuátøk 8.20.1.06.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 4.000 t.kr. Minninýtslan er 1.600 t.kr.

Á fíggjarlógini 2005 var upprunaliga eingin játtan. Á eykajáttanarlógini apríl 2005 vórðu játtaðar 5.000 t.kr. Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina er játtanin ætlað til, at kommunur kunnu søkja um stuðul til at fremja tiltøk í skúlunum t.d. til frukt, grønmeti og annað til skúlabørn.

Í álitinum legði Fíggjarnevndin dent á, at ein heimildarlóg eigur at fáa til vega evnisligar rættarreglur, soleiðis at endamálsorðingarnar í heimildarlógini hava við sær veruligar avmarkingar. Tað er avgerandi neyðugt, at heimildarlógin hevur ásetingar um, hvussu játtanin skal verða umsitin, og um karmar fyri hesum heilsuátøkum.

Við fíggjarnevndarskjali 8. juli 2005 varð játtanin lækkað 1.000 t.kr., í sambandi við at játtanin til umsorganararbeiði varð hækkað.

Sambært Ll. nr. 71 frá 23. mai 2005 “um broyting í løgtingslóg um fyribyrgingarráð” verður heimilað Fyribyrgingarráðnum at veita kommunum studning til heilsufremjandi tiltøk í skúlunum. Lógin skuldi fara úr gildi 1. juli 2006. 5. mai 2006 samtykti Løgtingið at leingja tíðarfreistina til 31. desember 2006.

Neyvari reglur eru ásettar í K. nr. 108 frá 20. september 2005 “um studning til heilsupolitisk tiltøk í fólkaskúlanum”. Tá ið lógin fer úr gildi, er ætlanin at kommunurnar yvirtaka uppgávuna.

Sambært landsstýrismanninum søktu í 2005 28 av 34 kommunum um stuðul vegna 53 av 60 skúlum í landinum. Um 1,8 mió.kr. var stuðul til at keypa vatnkølarar. Um 600 t.kr. var stuðul til at keypa frukt o.a.

### 9.2.2 *Ílegusavnið (rakstrarjáttan) 8.20.2.11.*

Á fíggjarlógini vóru játtaðar 100 t.kr. Eingin peningur er nýttur í 2005.

Á fíggjarlógini 2005 var upprunaliga eingin játtan. Á eykajáttanarlógini september 2005 vórðu játtaðar 100 t.kr.

Sambært § 3 í løgtingslóg nr. 62 frá 17. mai 2005 um gransking í mannaílegum verður heimilað landsstýrismanninum at skipa ein stovn í heilsuverkinum, nevndur Ílegusavnið.

Sambært viðmerkingunum til eykajáttanarlógina var ætlanin at seta leiðaran í 2005, og tí varð neyðugt við lønarjáttan til umleið tveir mánaðir í 2005.

Eykajáttanarlógin fyri september 2005 varð lýst í Kunngerðablaðnum 15. november 2005. Sambært landsstýrismanninum varð ikki hildið vera ráðiligt at lýsa eftir leiðara tá, tí starvið kundi neyvan verða sett, áðrenn fíggjarárið var úti.

10. apríl 2006 setti Almanna- og Heilsumálaráðið stjóra fyri Ílegusavnið frá 1. juli 2006 at rokna.

## 9.3 Aðrar viðmerkingar

### 9.3.1 *Serviðgerð uttanlands (rakstrarjáttan) 8.20.3.20.*

Á fíggjarlógini 2005 vóru á høvuðskontu 8.20.3.20. (rakstrarjáttan) “Serviðgerð uttanlands” upprunaliga játtaðar 91 mió.kr.

Á eykajáttanarlógini september 2005 varð játtanin hækkað 8,7 mió.kr. Í álitinum førdi Fíggjarnevndin m.a. fram, at *"henda játtan er vaksin alt ov nógv gjøgnum árini. Nevndin saknar gjøgnumskygni, men tað tykist, sum alt fleiri útreiðslur til sjúklingaviðgerð verða lagdar á hesa kontu. Nevndin sær onga bata av, at landsstýrismaðurin hevur sett fólk burturav at umsita hesa kontu. Nevndin metir, at eftirlitsfólk við heilsufakligum royndum hevði verið betra loysnin. Nevndin metir, at landsstýrismaðurin eigur at seta tiltøk í verk, sum síggjast aftur."*

Í juni 2006 kunnaði landsstýrismaðurin um, at hann arbeiðir við at seta í verk eina kanning av sjúklingagongdini, tá ið sjúklingar verða sendir uttanlands til viðgerðar.

Landsstýrismaðurin hevur, vísandi til § 10 í Ll. nr. 64/2005 "um sjúkrahúsverkið", sett eina visitasjónsnevnd. Sambært stk. 2 í somu grein er uppgávan hjá visitasjónsnevndini m.a. at áseta leiðreglur viðvíkjandi visitasjón av sjúklingum til viðgerðar uttanlands. Landsstýrismaðurin vónar, at tað kemur at hava við sær størri gjøgnumskygni í útreiðslunum.

Konsulentútreiðslur

Sambært landsroknskapinum 2005 eru av hesari høvuðskontu nýttar 497 t.kr. til konsulentútreiðslur.

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í oktober 2005 greiddi Landsgrannskoðanin frá, at eftir okkara tykki er talan um útreiðslur, ið áttu at verið goldnar av sjúkrahúsunum.

Í álitinum um uppskot til løgtingsfíggjarlóg 2006 vísti meirilutin í Fíggjarnevndini á, at Landsgrannskoðanin hevði víst á fleiri ógreið viðurskifti. Fíggjarnevndin helt, *"at landsstýrismaðurin eigur at bera so í bandi, at størri gjøgnumskygni fæst á hesi kontu"*.

Landsgrannskoðanin hevur í juli 2006 mælt landsstýrismanninum frá at bóka konsulentútreiðslur o.t. á hesa kontu í framtíðini.

Í september 2006 hevur landsstýrismaðurin kunnað um, at tað er Almanna- og Heilsumálaráðið, ið hevur skrivað undir tær 3 avtalurnar við útlendskar konsulentar. Konsulentavtalurnar eru galdandi fyri øll sjúkrahúsini, og endamálið er at tryggja føroyska heilsuverkinum sum heild eina ráðgeving, ið gevur eitt hægri fakligt støði á viðkomandi øki. Talan er um tíðaravmarkaðar konsulentavtalur, ið fevna um øki, har møguliga ein partur av sjúklingunum annars vildi verið sendur uttanlands. Tí verður hildið rættast at bóka útreiðslurnar á kontuna "Serviðgerð uttanlands".

Landsgrannskoðanin vil vísa á, at tvær av avtalunum eru millum Almanna- og Heilsumálaráðið og Ríkissjúkrahúsið.

Onnur avtalan fevnir um onkologiska/-hematologiska konsulenthjálp:

> *"Med henblik på forbedring af den cancerbehandling, der i dag varetages på Færøerne, og om muligt at begrænse antallet af kontrolbesøg på Rigshospitalet."*

Hin avtalan fevnir um nefrologiska konsulenthjálp:

> *"Med henblik på at forbedre den nefrologiske behandling, der idag varetages på Færøerne, og om muligt at begrænse antallet af kontrolbesøg på Rigshospitalet"*.

Báðar avtalurnar fevna um 4 árligar vitjanir av serlæknum o.ø "på sygehuset i Tórshavn". Avtalurnar kosta ávikavist 160 t.kr. og 130 t.kr. (2002-prísir) um árið.

Triðja avtalan, landsstýrismaðurin sipar til, hevur Almanna- og Heilsumálaráðið gjørt við Bispebjerg Hospital um "Børne- og Ungdomspsykiatrisk konsulentfunktion". Endamálið er *"at yde børne- og ungdomspsykiatrisk konsulentbistand ved speciallæge over for ikke-retarderede børn og unge (0-18 år)"*. Avtalan fevnir um 2 árligar konsulentvitjanir á psykiatrisku deild á Landssjúkrahúsinum, sum hvør varir í 1 viku. Avtalan kostar 141 t.kr. (2005 prísir) um árið.

Í øllum 3 avtalunum er ásett, at sjúkrahúsverkið eisini rindar fyri gisting, ferðaútreiðslur, tíma- og dagpengar o.a. í sambandi við vitjanirnar.

Aðrar serviðgerðir "innanlands"

Sambært landsroknskapinum 2005 eru av hesari høvuðskontu nýttar 528 t.kr. til skurðviðgerðir á Klaksvíkar Sjúkrahúsi og 460 t.kr. til skurðviðgerðir á Landssjúkrahúsinum.

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í oktober 2005 "um frávík millum játtan og nýtslu o.a." vístu vit á, at játtanin til "Serviðgerð uttanlands" í 2004 eisini var nýtt til at gjalda útlendskum serlæknum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi løn og ferðaútreiðslur í sambandi við skurðviðgerðir av sjúklingum, sum annars høvdu verið sendir til Danmarkar.

Landsgrannskoðanin helt tá, at tað kundi tykjast fløkjasligt, at ein játtan, markað til serviðgerð uttanlands, eisini varð nýtt til serviðgerð innanlands.

Í álitinum um uppskot til løgtingsfíggjarlóg 2006 vísti meirilutin í Fíggjarnevndini á, at Landsgrannskoðanin hevði víst á fleiri ógreið viðurskifti. Fíggjarnevndin helt, *"at landsstýrismaðurin eigur at bera so í bandi, at størri gjøgnumskygni fæst á hesi kontu"*.

Í september 2006 hevur landsstýrismaðurin gjørt vart við, at í viðmerkingunum til fíggjarlógina er tilskilað, at tænastur kunnu verða keyptar frá útlandinum til serligar viðgerðir, soleiðis at sjúklingar kunnu verða viðgjørdir í Føroyum, í staðin fyri at verða sendir uttanlands, um tað hevur við sær sparingar í sjúkrahúsverkinum. Í tráð við hesa áseting heldur landsstýrismaðurin tað vera í lagi, at hesar útreiðslur verða bókaðar á kontuna "Serviðgerð uttanlands", har sum peningurin verður játtaðar.

Viðmerkingar til "konsulentútreiðslur" og "aðrar serviðgerðir innanlands"

Landsgrannskoðanin skal viðmerkja, at vit ikki hava sett spurnartekin við, um tað játtanarliga "er í lagi" at bóka hesar útreiðslur, sum gjørt verður. Landsgrannskoðanin hevur roynt at ávara ímóti, at høvuðskontan "Serviðgerð uttanlands" kann enda sum ein fløkja ímillum serviðgerðir uttanlands og serviðgerðir, ið eru framdar innanlands, fyri at minka um útreiðslurnar til serviðgerðir, ið annars vildu verið framdar uttanlands. Ein orsøk til, at játtanin kann enda sum ein fløkja, er, at til ber at føra fram, at ein stórur partur av øllum serviðgerðum, sum fara fram á sjúkrahúsunum í Føroyum, annars vildu verið framdar uttanlands.

Landsgrannskoðanin vil mæla til, at játtanin á hesari høvuðskontu verður endurskoðað saman við Fíggjarmálaráðnum.

Aðrar útreiðslur

Í frágreiðing okkara í oktober 2005 vístu vit eisini á, at játtanin til "Serviðgerð uttanlands" verður nýtt til at rinda:

1. lønar- og ferðaútreiðslur til ein fulltrúa, sum skal samskipa virksemið millum visiterandi yvirlæknarnar og landsstýrismannin, og kanna viðurskiftini millum sjúkrahúsini í Føroyum og í Danmark og Sjúklingahotellið Tórshavn,
2. grannskoðanarútreiðslur,
3. heilivág m.a. til dialysu til sjúklingar heima.

Ad 1. Lønar- og ferðaútreiðslur

Sambært landsroknskapinum eru 353 t.kr. nýttar til lønar- og ferðaútreiðslur í 2005.

Á fíggjarlógini 2006 eru hesar útreiðslur fluttar til rakstrarjáttanina hjá Almanna- og Heilsumálaráðnum.

Ad 2. Grannskoðanarútreiðslur

Sambært landsbókhaldinum eru kr. 29.790 nýttar til grannskoðanarútreiðslur í 2005.

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í oktober 2005 greiddi Landsgrannskoðanin frá, at eftir okkara tykki er talan um umsitingarútreiðslur, ið áttu at verið hildnar av játtanini til Almanna- og Heilsumálaráðið.

Sambært landsstýrismanninum í juni 2006 eru hetta útreiðslur, sum hava beinleiðis tilknýti til játtanina "Serviðgerð uttanlands".

Landsgrannskoðanin vil í hesum sambandi vísa á, at Fíggjarnevndin í álitinum um uppskot til løgtingsfíggjarlóg 2006 tók undir við sjónarmiðinum, at talan var um umsitingarútreiðslur. Fíggjarnevndin setti fram broytingaruppskot um at lækka játtanina til "Serviðgerð uttanlands" samsvarandi. Broytingaruppskotið varð samtykt.

Sostatt heldur Fíggjarnevndin heldur ikki, at henda játtan er ætlað til grannskoðanarútreiðslur, og Landsgrannskoðanin vil mæla landsstýrismanninum til at halda seg til hesa áskoðan.

Ad 3. Heilivágsútreiðslur

Sambært landsroknskapinum eru 877 t.kr. nýttar til heilivágsútreiðslur.

Í frágreiðing til løgtingsgrannskoðararnar í oktober 2005 greiddi Landsgrannskoðanin frá, at eftir okkara tykki eiga útreiðslur til heilivág at verða játtaðar av Almannastovuni sambært reglunum í K. nr. 100 frá 20. desember 1999 "um stuðul til heilivág eftir forsorgarlógini og almannapensjónslógini".

Í september 2005 kunnaði landsstýrismaðurin um, *"at Almanna- og Heilsumálaráðið er samt við Landsgrannskoðanini í, at útreiðslurnar til heilivág møguliga áttu at verið goldnar av aðrari játtan enn av játtanini til "Serviðgerð uttanlands". Í 2004 hevur verið arbeitt við at fáa greiði á, hvørjar útreiðslur til heilivág, ið verða goldnar av játtanini til "Serviðgerð uttanlands". Harumframt vórðu møguleikarnir fyri, at útreiðslurnar skula verða goldnar av játtanini til Almannastovuna, eisini lýstir. Almanna- og Heilsumálaráðið fer í næstum at arbeiða víðari við málinum."*

Í juni 2006 kunnaði landsstýrismaðurin um, at einki nýtt er í málinum, men ætlanin er at fara at hyggja nærri eftir málinum.

### *9.3.2 Viðlíkahald (rakstrarjáttan) 8.11.1.18.*

Á hesari høvuðskontu á fíggjarlógini, til felags viðlíkahald, vóru játtaðar 6,3 mió.kr. Sambært viðmerkingunum til fíggjarlógaruppskotið "verður játtanin til viðlíkahald nýtt til stovnar á almanna- og heilsuøkinum".

Sambært landsroknskapinum eru nýttar 5,6 mió.kr., ið eru útreiðsluførdar á standardkontu 71. "Innanhýsis flytingar millum almennar stovnar – útreiðslur":

| | |
|---|---|
| Landssjúkrahúsið | kr. 1.907.589 |
| Klaksvíkar Sjúkrahús | - 463.681 |
| Serforsorg | - 827.690 |
| Suðuroyar Sjúkrahús | - 915.000 |
| Eldrarøkt | - 1.432.493 |
| Føroya Barnaheim | - 73.506 |
| **Tilsamans** | **kr. 5.619.960** |

Almanna- og Heilsumálaráðið er einasta ráð, ið nýtir hesa mannagongd við innanhýsis flytingum í sambandi við viðlíkahald.

Landsgrannskoðanin vil mæla til at endurskoða hesa mannagongd í samráð við Fíggjarmálaráðið, soleiðis at sama mannagongd verður nýtt á øllum málsøkjum.

Í skrivi 19. oktober 2004 til Trivnaðarnevndina boðaði landsstýrismaðurin frá, at viðvíkjandi høvuðskontu 8.11.1.1.8. "Viðlíkahald", er *"játtanin til viðlíkahald á Landssjúkrahúsinum*

*minkað. Landsstýrismaðurin hevur tikið avgerð um, at tað ber til at minka játtanina, tá ið 35 mió.kr. er játtaðar til Landssjúkrahúsið vegna umbygging og umvæling".*

Í ummæli 22. oktober 2004 frá Trivnaðarnevndini, viðvíkjandi uppskoti til løgtingsfíggjarlóg 2005, heldur nevndin *"tað vera ørkymlandi, at viðlíkahald til sjúkrahúsini er á fleiri ymiskum kontum. Trivnaðarnevndin heldur, at hetta átti at verið meira greitt."*

Landsgrannskoðanin vil vísa á, at mannagongdin ikki er broytt, tá ræður um viðlíkahaldsútreiðslurnar á Landssjúkrahúsinum, ið framvegis verða játtaðar og bókaðar á trimum høvuðskontum í 2005:

1. Sum víst á frammanfyri, fekk Landssjúkrahúsið tillutað 1,9 mió.kr. av høvuðskontu viðlíkahald 8.11.1.18.
2. Sambært landsroknskapinum eru harafturat 0,4 mió.kr. bókaðar sum viðlíkahald á høvuðskontuni "Landssjúkrahúsið".
3. Sambært landsroknskapinum eru á høvuðskontu 8.20.3.08. "Landssjúkrahúsið útbygging (løgujáttan)" nýttar 4,7 mió kr. til umvælingar og størri ábøtur á Landssjúkrahúsinum.

Sambært landsstýrismanninum hevur Almanna- og Heilsumálaráðið í fleiri førum spurt Landsverk/Byggiumsiting Landsins, hvørjar útreiðslur eru viðlíkahald, og Almanna- og Heilsumálaráðið hevur út frá svarunum avvíst at gjalda summar útreiðslur. Sum dømi kann nevnast útskifting av telefonskipanini á Barnaheiminum.

Sambært landsstýrismanninum er nú gjørt av, at ein byggiumsiting skal vera hjá Landsverki. Tað fer helst at merkja, at Landsverk fer at fáa ein størri leiklut í viðlíkahaldsarbeiðinum. Av tí at arbeiðið hesum viðvíkjandi ikki er liðugt, er ikki greitt enn, hvønn leiklut Landsverk fer at hava.

Spurningurin um viðlíkahald er meira alment viðgjørdur í frágreiðingini undir fíggjarmálum.